Tórshavnar
Kommuna

# Kommunuætlan

# 2020



Kommunuætlan

# 2020

Tórshavnar Kommuna



# FORORÐ

TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER Í STØÐUGARI MENNING. BYGDIRNAR OG HØVUÐSSTAÐURIN STANDA Í BLÓMA. NÓGV NÝTT VERÐUR BYGT, OG BORGARAR OG VINNA HAVA TAÐ GOTT. NÓGV MENTANARLIG TILTØK ERU AT FARA TIL, OG ÍTRÓTTARTILBOÐINI ERU NÓGV Í TALI.

Tað frættist aðrastaðni, at fólkið í okkara kommunu trívist, og henda atdráttarmegin fær uppaftur fleiri at vilja búseta seg her.

Í Tórshavnar kommunu ganga trivnaður og vøkstur hond í hond. Tá ið borgararnir trívast, dregur hetta íløgur og vøkstur til sín. Og tá kunnu vit byggja nýtt, røkja øll øki í kommununi og flyta okkum fram á leið.

Kommunuætlanin, ið tú nú situr við, leggur dent á júst hetta: At lyfta lívsgóðskuna og geva rúmd fyri vøkstri. Vit leggja stóran dent á, at øll kunnu seta føtur undir egið borð. Stórur eftirspurningur er eftir bústøðum og ymiskum sløgum av bústøðum. Stórur eftirspurningur er eisini eftir plássi til vinnuligt virksemi, og stórur tørvur er á víðkaðum møguleikum fyri ítrótti og mentan. Vit vilja fegin skapa rúmd fyri, at høvuðsstaðurin og kommunan kunnu vaksa nógv ár fram í tíð.

Men vøksturin má ikki ganga út yvir lívsgóðskuna. Vit leggja stóran dent á at skapa eina samanhangandi og grøna kommunu. Vit eru øll fegin um og vilja varðveita grønu blettirnar. Vit vilja gera tað lættari og tryggari at ferðast í grønum økjum millum býlingar, til gongu og á súkklu. Vit vilja betra almennu ferðsluna og minka um nógvu bilarnar í býnum. Vit vilja tryggja góðan trivnað og felagsskap í øllum økjum, í bygd og í býi.

Samstundis vilja vit hava eina burðardyggari kommunu, sosialt, búskaparliga og umhvørvisliga. Vit vilja minka um orkunýtsluna og leggja okkum eftir at nýta orku frá varandi orkukeldum. Vit vilja tryggja, at øll hava góð kor og góðar møguleikar at støðast og liva - bæði núlivandi og komandi ættarlið.

Tað er at gleðast um, at arbeiðssamar hendur og gløgg høvd hava skapt eina kommunu, sum so nógv vilja búgva í. Tað er gott fyri kommunalu fíggjarstøðuna, at vit gerast fleiri til at fíggja kommunalu tænasturnar. Tað gevur okkum møguleika áhaldandi víðka og betra um tænasturnar. Men vøksturin leggur eisini trýst á útreiðslurnar. Dagstovnaplássini gerast fleiri í tali, fleiri ganga í skúlunum, mentanar- og ítróttartilboðini merkja eisini støðugt størri áhuga og eftirspurningurin eftir bústøðum er ovurstórur. Um somu leið er umráðandi at virða grønu økini og fríðka bý og bygd. Hetta setir stór krøv til okkum. Hetta setir krøv til, hvussu vit umsita og raðfesta. Og hetta setir krøv til kommunuætlanina.

Við hesu dagførdu kommunuætlan hava vit lýst tørvin og lagt leistin fyri áhaldandi menning og burðardyggum vøkstri yvir langa tíð. Alt verður gjørt til tess at tryggja trivnaðin hjá øllum borgarum. Málið er framhaldandi at menna eina sterka kommunu, har rúm er fyri øllum, og har vinnulívið blómar og fólkini trívast. Tí vit vita, at gongur tað væl í Tórshavnar kommunu, gongur tað eisini væl í Føroyum.

**Annika Olsen**
Borgarstjóri

**0.0** INNLEIÐING OG **LESIVEGLEIÐING** S. **8**







**1.0** FÓLK OG **BÚSTAÐIR** S. **18**

**2.0** NÁTTURA VARVEITING OG **UMHVØRVI** S. **54**

**3.0** VINNA S. **86**



# 4.0

UNDIRSTØÐU-
KERVIÐ

S. **108**



# 5.0

MENTAN
FRÍTÍÐ OG
**ÚTILÍV**

S. **140**



# 6.0

TÆNASTUØKIÐ

S. **166**

# INNLEIÐING OG **LESIVEGLEIÐING**

# 0.0 >

# 0.1 INNLEIÐING

Í 2014 KOM TÓRSHAVNAR KOMMUNA VIÐ FYRSTU KOMMUNUÆTLANINI Í FØROYUM. FRAMMANUNDAN VÓRU TVÆR HEILDARÆTLANIR GJØRDAR FYRI KOMMUNUNA, TANN FYRSTA Í 2003 OG SÍÐANI EIN DAGFØRD HEILDARÆTLAN Í 2006. Í 2010-2011 VAR ARBEITT VIÐ AT GERA EINA VISJÓN OG VAKSTRARÆTLAN FYRI KOMMUNUNA OG SEINNI VAR AVGJØRT AT DAGFØRA HEILDARÆTLANINA FRÁ 2006 TIL EINA KOMMUNUÆTLAN EFTIR DONSKUM LEISTI.

Í 2014 kom so fyrsta kommunuætlanin. Avbjóðingarnar tá vóru at seta ferð á menningarátøk og skapa fólkavøkstur í Tórshavn og kring býin. Mál vórðu sett fyri at gera tað lokkandi hjá nýútbúnum og øðrum tilflytarum at koma til kommununa at arbeiða ella seta á stovn fyritøkur, umframt at tryggja nóg mikið av lendi.

Nú vit skriva 2020 kemur næsta kommunuætlanin. Stórar broytingar eru farnar fram í samfelagnum og serliga í Tórshavnar kommunu síðan seinastu kommunuætlan. Talan er tí í stóran mun um eina heilt nýggja kommunuætlan, sum byggir víðari á stóra arbeiðið við fyrstu kommunuætlanini og leggur nógv nýtt afturat.

Kommunuætlanin 2020 er munandi meira víðfevnd enn tann fyrra, og viðgerð nýggja kommunuætlanin fleiri evni og ymisk politikkøki í kommununi. Tó so er talan um eina áhaldandi menning. Henda kommunuætlanin er so enn eitt stig í eini tilgongd, har byggjast skal víðari á tað arbeiði, ið er longu er framt.

Tær 11 bygdirnar verða einans í summum førum viðgjørdar í hesi kommunuætlan. Hetta merkir ikki, at bygdirnar ikki skulu mennast. Orsøkin er, at økini kring bygdirnar ikki eru greinaðar nóg nógv til, at menningarøki kunnu blíva peikað út innan ymsu evnini í ætlanini. Hetta er eitt arbeiði, ið er í gongd og kemur við í næstum.

## Hvat er ein kommunuætlan?

Kommunuætlanin er yvirskipaða stýringsamboðið fyri planlegging og menning av Tórshavnar kommunu.

Kommunuætlanin vísir, á hvørjum grundarlagi og innan hvørjar karmar avgerðir verða tiknar um lendisnýtslu í kommununi og hvørji atlit skulu takast og vigast upp móti hvørjum øðrum, tá avgerðir skulu takast um lendisnýtslu.

Kommunuætlanin samantvinnar landslógir um eitt nú býarskipan, vegir, náttúru- og umhvørvisvernd og almennar tænastur við politikkir hjá kommununi um bústaðir, umhvørvi og orku, parkering, frítíð og ítrótt, eldrapolitikk og barna- og ungdómspolitik. Harumframt lýsir kommunuætlanin framtíðar tørv á bústøðum, vegum, dagstovnum og skúlum, ellis- og røktarheimum og so framvegis.

Ein kommunuætlan hyggur ávikavist fýra og 12 ár fram. Ætlanin við eini kommunuætlan er, at hon skal dagførast fjórða hvørt ár, og at hvørt býráð skal meta, um tann galdandi kommunuætlanin skal dagførast lutvíst ella heilt.

Hetta merkir eisini at ein dagførd kommunuætlan natúrliga byggir víðari á nógv av tí, ið var í fyrru kommunuætlanini, sum framvegis er galdandi. Millum annað eru nógv av teimum økjum, sum í kommunuætlan 2014 vórðu víst á sum góð býarvakstrarøki, framvegis góð býarvakstrarøki.

Ætlanirnar broytast í størri mun við broytingum í fólkatalinum, tøkniligari menning, nýggjum krøvum, nýggjum møguleikum og avbjóðingum. Her mugu ætlanir tískil alla tíðina lagast til galdandi viðurskifti í samfelagnum og umheiminum sum heild.

Framhaldandi verður eitt politiskt fylgiskjal gjørt, ið er virkisskáin hjá sitandi býráði fyri menningina í Tórshavnar kommunu. Kommunuætlanin verður tá dagførd samsvarandi hesum.

## Hví eina kommunuætlan?

Ein kommunuætlan er ein høvuðsætlan fyri býarskipan og menning í kommununi. Hon er eitt týdningarmikið og hent amboð, sum er við til at seta eina kós og tryggja ein samanhangandi leist fyri virksemi og menning í kommununi.

Kommunuætlanin er samstundis eitt týdningarmikið amboð til kunning til borgarar, fyritøkur, stovnar og áhugafelagsskapir, sum her kunnu fáa vitan og kunning um grundleggjandi viðurskifti í kommununi, hvussu arbeitt verður og hvørjar ætlanir eru fyri framtíðina.

Í Føroyum er einki krav um kommunuætlan. Tórshavnar kommuna sær eina kommunuætlan sum eitt týdningarmikið og hent amboð í býarskipanini, og hevur tí av sínum eintingum valt at gera kommunuætlan fyri Tórshavnar kommunu.

Allar danskar kommunur skulu sambært donsku Planloven gera kommunuætlan fyri 12 ár í senn, sum verða endurskoðaðar fjórða hvørt ár. Henda kommunuætlanin er gjørd eftir líknandi leisti, sum nýttur verður í Danmark, tillagað til okkara viðurskifti og føroyska lóggávu. Kommunuætlanin er eitt sjálvboðið býarskipanarligt amboð, og krevur tí onga aðra góðkenning enn av býráðnum.

## Málbólkur

Kommunuætlanin er stutt sagt ætlað øllum.

Hon er gjørd sum eitt kunningaramboð til borgarar, fyritøkur, stovnar, áhugafelagsskapir, embætisfólk, politikarar, byggimeistarar, lógarsmiðir og so framvegis.

Hon er ætlað øllum teimum, ið so ella so koma í samband við Tórshavnar kommunu, brúka tænastur frá kommununi og merkja tey inntriv, ið verða gjørd av kommununi.

Kommunuætlanin er eitt týdningarmikið amboð, sum fyrisiting og politikarar í Tórshavnar kommunu nýta í teirra arbeiði, og hon er eitt týdningarmikið amboð til onnur at kunna seg um, hvussu fyrisiting og politikarar í Tórshavnar kommunu arbeiða.

Tí er kommunuætlanin ætlað øllum.

## Smart City í Tórshavnar kommunu

Á sumri 2020 gjørdist Tórshavnar kommuna partur av norðurlendska samstarvinum Nordic Smart City network, sum arbeiðir við at menna snildar loysnir innan ymisk øki. Komandi árini fer kommunan at seta nakrar royndarverkætlanir í gongd, eitt nú innan ferðslu og ljós umframt at heimasíðan verður brúkilig hjá borgarinum til skjótt og snilt samskifti.

Smart City snýr seg um, hvussu vit skipa og loysa kjarnauppgávur í kommunum og í samfelagnum sum heild. Hugtakið fevnir um at menna snildari loysnir við tøkni, sum longu finst, fyri betur at gagnnýta og menna tilfeingið í samfelagnum umframt at menna lívsgóðskuna hjá borgarum.

Við at sameina dáta og kunningartøkni (ICT) ber til at menna góðsku og virksemi av til dømis skipanum og tænastum, innan eldraøki, orku, brúkarasamskifti, burturkast o.s.fr. Tað er sostatt ikki sjálv tøknin, sum skapar ein snildan bý, men heldur hvussu vit skipa og brúka dáta og tøkni til at menna rakstur og tænastur til borgarar og vinnu.

# 0.2 LESIVEG-LEIÐING

HETTA ER EIN STUTT LESIVEGLEIÐING TIL KOMMUNUÆTLANINA HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU. KOMMUNUÆTLANIN ER TANN BERANDI OG YVIRSKIPAÐA ÆTLANIN, HAR BORGARAR, FYRITØKUR, STOVNAR OG ÁHUGAFELAGSSKAPIR KUNNU KUNNA SEG UM MÁL OG KARMAR FYRI LENDISNÝTSLU OG ÆTLANUM Í KOMMUNUNI.

## HVUSSU LESI EG KOMMUNUÆTLANINA?

Kommunuætlanin er ein sera víðfevnd ætlan, sum samantvinnar landslógir, kommunalar politikkir , ætlanir og samtyktir. Tí er Kommunuætlanin deild upp í seks ymisk evni, ið øll kunnu lesast einsæris.

- **Fólk og bústaðir**
- **Náttúra, varðveiting og umhvørvi**
- **Vinna**
- **Undirstøðukervið**
- **Mentan, frítíð og útilív**
- **Tænastuøkið**

Talan er tí ikki um eina ætlan, ið neyðturviliga skal lesast úr enda í annan, men heldur um eitt uppslagsverk, har borgarar, fyritøkur, stovnar og áhugafelagsskapir hava møguleika at kunna seg um ætlanir, mál og karmar, ið kommunan arbeiðir eftir innan eitt ávíst evni.

Kommunuætlanin skal í næstum gerast til eina talgilda ætlan, ið kemur at liggja úti á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu. Talgilda útgávan fer at gera tað munandi lættari at nýta ætlanina sum eitt uppslagsverk, at finna leinki til tilhoyrandi politikkir, ætlanir og lóggávur og at finna runt í talgildum kortum.



Av tí sama ganga onkur brot aftur. Eitt dømi um hetta er brotið um 'Gøtuskipanir', ið hevur týdning fyri og verður lýst saman við evninum um Fólk og bústaðir, tá kommunan við samantvinnaðum gøtuskipanum miðvíst roynir at skapa góðar karmar til at ferðast frítt og trygt til gongu millum býlingar í býnum. Gøtuskipanir eru eisini ein týðandi partur av undirstøðukervinum og hvussu fólk flyta seg í kommununi. Harumframt skulu gøtuskipanir eisini stuðla undir meira rørslu og aktivt frítíðarlív hjá borgarum, við góðum møguleikum at ferðast úti í náttúruni og burtur frá vegunum. Tískil kemur evnið 'Gøtuskipanir' fyri fleiri ferðir, undir ymiskum evnum.

Dømið omanfyri lýsir hvussu evni í kommunuætlanini eru samantvinnað og hava týdning fyri hvørt annað. Talan er um eina heildarætlan, har tað er samanhangur í hvussu kommunan arbeiðir við staðseting av nýggjum bústøðum, almennum stovnum og gerandistilboðum, gøtuskipanir, grøn øki, ítróttar- og mentanartilboð, vegir og ferðslu og so framvegis. Alt hevur týdning fyri hvørt annað og ávirkan á hvørt annað.

Hvørt evni kann soleiðis lesast einsæris og er bygnaðurin á evnunum lagaður til endamálið.

Ætlanin er somuleiðis, at ein partur skal skrivast afturat hvørjum evni í kommunuætlanini við íítøkiligum verkætlanum, ið eru staðfestar sum neyðugar fyri eina góða kommunu. Hetta verður antin at síggja sum eitt framhald av hvørjum kapitli í ætlanini ella sum ein serskildur faldari, ið hoyrir til kommunuætlanina.

**Hvør kapittul í kommunuætlanini er býttur í hesar fýra partar:**

- **Lýsing**
  Her verður ein stutt lýsing av evninum løgd fram, umframt ein listi yvir hvat kommunan virkar fyri innan ávísa evnið.
- **Leiðreglur**
  Her verða tær leiðreglurnar, ið arbeitt verður eftir, lýstar.
- **Karmar**
  Her verða løgfrøðiligu og politisku karmarnar, ið eru tey yvirskipaðu viðurskiftini, ið kommunan skal halda seg til, lýstar.
- **Grundarlag**
  Her verður farið í dýpdina í mun til ymsar kanningar og greiningar, og í summum førum verða ávís øki peikað út til ítøkiliga býarskipan og –menning innan ávísa evnið.

Tað kann vera broytingar í fólkatalinum, bústaðartørvur, lendistørvur og so framvegis. Tað kann eisini vera lýsingar av evninum og hvussu kommunan arbeiðir innan eitt ávíst evni.

Umframt tekst, eru kort og frágreiðandi talvur ein týðandi partur av kommunuætlanini, sum eisini kunnu stuðla undir frágreiðingar í tekstinum.

Í hvørjum kapitli verður víst á politikkir og ætlanir í hoyra til ávísa evnið í kapitlinum. Allar ætlanir og politikkir sum kommunan varðar av eru at finna inni á www.torshavn.fo

**Góðan lesihug!**









**Útgevari:** Tórshavnar kommuna 2020

**Lagt til rættis:** Býarskipanardeildin
**Stýrisbólkur:** Annika Olsen, borgarstjóri
Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóri
Eyðna Justinussen, miðfyrisitingarstjóri
Marius Müller, tekniskur stjóri
Eyðfríð L. Jacobsen, heilsu- og umsorganarstjóri
Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri
Birita Wardum, býararkitektur
Barbara Mikkelsen, deildarleiðari á býarskipanardeildini
**Samskipari og skrivari:** Rógvi Nybo og Sissal Christina Fosaa
**Kort:** Sissal Christina Fosaa / Tórshavnar kommuna
**Rættlestur:** Hanna Simonsen

**Snið og uppseting:** Sendistovan
**Myndir:** Høgni Heinesen

**Endurgeving:** Við endurgeving av innihaldi í hesi kommunuætlan, skal Tórshavnar kommuna sjónliga upplýsast sum kelda.









# FÓLK OG **BÚSTAÐIR**

# 1.0 >

# FÓLK OG BÚSTAÐIR


| | | |
|---|---|---|
| **1.1** | **LÝSING** | 21 |
| **1.2** | **LEIÐREGLUR** | 24 |
| 1.2.1 | Bygnaður | 25 |
| | Miðdepilin | 25 |
| | Bústaðardeplarnir | 26 |
| | Bygdirnar | 27 |
| 1.2.2 | Framtíðar bygging | 34 |
| | Býarvakstrarøki og krøv til staðseting | 34 |
| **1.3** | **KARMAR** | 36 |
| 1.3.1 | Lógir | 36 |
| 1.3.2 | Byggisamtyktir | 36 |
| 1.3.3 | Politikkir og ætlanir | 36 |
| | Bústaðarpolitikkur | 36 |
| | Parkeringspolitikkur | 37 |
| | Miðbýarætlan | 37 |
| | Gulaætlan | 37 |
| | Grønaætlan | 37 |
| **1.4** | **GRUNDARLAG** | 38 |
| 1.4.1 | Broytingar í fólkatalinum | 38 |
| 1.4.2 | Tørvur á bústøðum | 41 |
| | Bústaðarsløg í Tórshavnar kommunu | 42 |
| | Tørvur á øki til bústaðarbygging | 44 |
| 1.4.3 | Býarvøkstur fram til 2032 | 45 |
| | Egnað øki til býarvøkstur | 45 |
| | Raðfest øki til býarvøkstur | 48 |
| | Broytt nýtsla av kommunalum bygningum | 52 |
| 1.4.4 | Flogvøllur á Glyvursnesi | 52 |


FINSEN

# 1.1 LÝSING

TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER Í SKJÓTARI MENNING OG VIT FJØLGAST SKJÓTT, BÆÐI Í BYGD OG BÝ. FÓLKIÐ ER GRUNDARLAGIÐ Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU, OG VIT VILJA FEVNA OG HJÚKLA UM BORGARAN. SAMSTUNDIS VILJA VIT TRYGGJA ØLLUM MØGULEIKA AT SETA FØTUR UNDIR EGIÐ BORÐ

**Evnið Fólk og bústaðir** snýr seg um planlegging av býarvøkstri og bústaðarbygging. Greitt verður frá deplabygnaði, bústaðarpolitikki og staðseting av býarvakstrarøkjum. Greinað verður hvussu fólkatalið í kommununi broytist, hvussu stórur tørvurin á bústøðum verður í framtíðini og hvørjir møguleikar eru fyri at rúma bygging til bústaðir og teir hentleikar og stovnar, ið tørvur er á.

Trýstið á bústaðarmarknaðin er stórt. Ein stór avbjóðing hjá kommununi er at vera virkin viðleikari til at nøkta eftirspurningin eftir nøktandi og fjølbroyttum bústøðum í kommununi og at tryggja nóg mikið av byggilendi til at rúma vøkstrinum og geva fólki møguleika at seta føtur undir egið borð.

## Vit virka fyri

- at Tórshavnar kommuna framvegis er ein spennandi kommuna at búgva og liva í
- at nøkta bústaðartørvin og veita borgarum møguleika at seta føtur undir egið borð
- at fáa fjøltáttaða bústaðarbygging framda, sum kann stuðla undir stóra fólkavøksturin í kommununi
- at varðveita grøn øki í býnum og opið landslag í økjum kring býin
- at varðveita velt lendi til landbúnaðarvirksemi
- at bústaðarbygging verður í deplum, har hvør depil hevur sín egna samleika, og har sereyðkenni fyri deplarnar verða ment og styrkt í samstarvi við borgararnar
- at skúlar, dagstovnar, innkeypsmøguleikar og onnur líknandi gerandistilboð eru í ella nærhendis bústaðardeplunum
- at bústaðar-, summarhús- og vinnubygging fer fram eftir tørvi í bygdunum





# 1.2 LEIÐREGLUR

EVNIÐ FÓLK OG BÚSTAÐIR SNÝR SEG UM BÝARSKIPANARLIGA PLANLEGGING AV BÝI OG BYGDUM Í KOMMUNUNI. HVAR OG HVUSSU SKAPA VIT RÚM FYRI FÓLKI OG BÚSTØÐUM Í ALLARI KOMMUNUNI, HVØRJI KRØV VERÐA SETT TIL NÝGGJ BÚSTAÐARØKI OG HVUSSU SKAPA VIT SAMBAND MILLUM BÚSTAÐARØKI, SAMSTUNDIS SUM VIT VARÐVEITA GRØN ØKI. TAÐ SNÝR SEG EISINI UM, HVUSSU VIT SKIPA ØKINI Í KOMMUNUNI, SOLEIÐIS AT TEY ERU LIVANDI OG ÁHUGAVERD. TÓRSHAVNAR KOMMUNA ARBEIÐIR EFTIR HESUM LEIÐREGLUM, TÁ UM FÓLK OG BÚSTAÐIR RÆÐUR.



## 1.2.1 BYGNAÐUR

Ein ávís miðsavnan er farin fram ymsastaðni í býnum. Tórshavnar Kommuna ynskir at varðveita og flokka hesa miðsavnan í deplar og arbeiða fyri víðari býarvøkstri í hesum økjum. Tað verður gjørt við útbygging av virksemi so sum handlum við gerandisvørum, stovnum og skúlum, mentanarligum virksemi umframt við býlingshúsum og fleiri bústøðum í økjunum.

Orðið "deplar" verður nýtt, tá talan er um eina miðsavnan av ávísum viðurskiftum og hentleikum í einum øki. Eitt nú bústaðardepil, ið er ein savnan av bústøðum, stovnum og gerandishentleikum í einum avmarkaðum øki, og vinnudepil, ið er ein savnan av einari ávísari vinnu við tilhoyrandi hentleikum í einum avmarkaðum øki.

**Kommunan er skipað á hendan hátt:**

> **Miðdepilin:** Miðbýurin/Eysturbýurin
>
> **Bústaðardeplarnir:** Vesturbýurin, Argir og Hoyvík/Ternuryggur

Fyri at skapa áhugaverdar deplar verður skotið upp at hava fleiri sløg av virksemi í deplunum. Umframt skúlar skulu handlar við gerandisvørum fáa fleiri fólk til økið. Samstundis skulu skipað útiøki skapa møguleikar hjá fólki at savnast í deplunum. Umráðandi er, at bústaðir verða staðsettir tætt við skúlar, so skúlabørnini sjálv hava møguleika at fara í og úr skúla.

Nýggjar íbúðir verða staðsettar annaðhvørt í deplunum, t.d. sum meirbygging í Miðbýnum, ella í útjaðaranum av býnum. Stuttir gonguteinar gera tað lagaligt hjá eldri og illa gongdum fólkum, sum í framtíðini fara at hava áhuga í at búgva í íbúðum í bústaðardeplunum. Útbygdar gøtuskipanir og áhaldandi menning av bussleiðini binda deplarnar saman.

### Miðdepilin

Miðdepilin í høvuðsstaðnum fevnir um **Miðbýin, Eysturbýin, Háls, Gundadal og Frælsið** og er týdningarmesti miðstaður í Føroyum. Her eru Løgtingið, Landsstýrið, Handilsmiðstøði SMS, Tórshavnar havn, flestu handlarnir, Landssjúkrahúsið, ítróttarøki, tænastu- og mentanartilboð umframt bústaðir.

Skotið verður upp, at arbeitt verður miðvíst við at miðsavna servøruhandlar, tænastuvinnuna og annað virksemi her, soleiðis at hetta verður ein depil, ið umboðar og vendir sær til allar Føroyar. Harumframt er týdningarmikið, at framhaldandi verður arbeitt við at menna økið við bústøðum í miðdeplinum, í høvuðsheitum við býartætting, sum er, at bygningar, øki og byggilendi verða endurnýtt og umskapað til bústaðir.




## Bústaðardeplarnir

Bústaðardeplarnir í høvuðsstaðnum eru **Vesturbýurin, Argir** og **Hoyvík/Ternuryggur** og eru í høvuðsheitum øki til búseting. Bústaðardeplarnir venda sær til borgaran við gerandistænastum so sum barnaansing, skúlum, frítíðartilboðum, handlum við gerandisvørum umframt smærri tænastu-, smásølu- og mentanartilboðum. Samstundis skulu skipað útiøki skapa møguleikar hjá fólki at savnast í deplunum.

Harumframt skulu útiøki og tænastur vera lætt atkomulig hjá fólkunum, ið búgva har, eitt nú við samanhangandi gøtuskipanum, so t.d. børnini sjálvi trygt og lætt kunnu fara í og úr skúla.

Ynskiligt er at at styrkja og leggja dent á tey ymsu eyðkennini, ið hvør einstakur depil hevur, knýta deplarnar saman við gøtuskipanum og útbygdari bussleið, umframt við at menna deplarnar gjøgnum eitt nú Kommunuætlanina, Bygdaætlanir, Miðbýarætlan, Vakstrarætlan og Bústaðarpolitikkin.



# Bygnaður í kommununi

Bústaðardepil

Bygd

Miðdepil

## Bygdirnar

Í Tórshavnar kommunu er íalt fjúrtan bygdir og harav eru tríggjar oyggjabygdir. Av hesum fjúrtan bygdunum eru seks bygdir ið kunnu bólkast, sum størri bygdir (fleiri enn 80 íbúgvar) og átta bygdir, ið kunnu bólkast sum smærri bygdir (færri enn 80 íbúgvar). **Fylgjandi yvirlit vísir fólkatalið í bygdunum pr. 1. august 2020.**

| Størri bygdir | Fólkatal | Smærri bygdir | Fólkatal |
|---|---|---|---|
| Kollafjørður | 817 | Oyrareingir | 43 |
| Velbastaður | 244 | Hestur | 18 |
| Kaldbak | 243 | Syðradalur | 10 |
| Nólsoy | 233 | Norðradalur | 9 |
| Signabøur | 143 | Kaldbaksbotnur | 9 |
| Hvítanes | 111 | Sund | 1 |
| Kirkjubøur | 89 | Koltur | 0 |

Almenna byggisamtyktin er galdandi fyri Sund, Norðradal, Syðradal, Kaldbaksbotn, Kollafjørð, Signabøur og Oyrareingir. Serstakar byggisamtyktir eru galdandi fyri Kaldbak, Hvítanes, Velbastað, Kirkjubø, Nólsoy og Hestur. Eingin byggisamtykt er fyri Koltur.

## Kollafjørður

Kollafjørður er norðasti fjørðurin í kommununi og har liggja tríggjar bygdir. Bygdin Kollafjørður liggur fram við norðursíðuni á fjørðinum og er við sínum átta kilometrum, Føroya longsta bygd. Sunnaru megin fjørðin liggur bygdin Signabøur og innast í fjørðinum liggur bygdin Oyrareingir.

Bygdin Kollafjørður er gomul bóndabygd og eru íalt nýggju festir umframt nakað av ognarjørð; Kjalneshagi er 4 merkur og ber 160 áseyðir, Miðgerahagi á Hjøllum er 4 merkur og ber 50 áseyðir, Hamrahagi á Hjøllum er 4 merkur og ber 100 áseyðir, Todneshagi er 5 merkur og ber 160 áseyðir, Sjóarhagi Niðaripartur er 6 merkur og ber 260 áseyðir, Sjóarhagi Fremripartur er 4 merkur og ber 250 áseyðir, Hamrahagi Frammi við Gjógv er 4 merkur og ber 130 áseyðir, Miðgerðahagi Frammi við Gjógv er 4 merkur og ber 120 áseyðir, Heygshagi er 4 merkur og ber 155 áseyðir.

Annað vinnuligt virksemi er eisini í bygdini. Umframt tvær smábátahavnir eru eisini tvey størri Havnarløg gjørt báðumegin fjørðin, havnin á Oyrareingjum og havnin á Langasandi. Á Oyrareingjum er ein umleið 50.000 fermetra stór góðshavn, og hendan havnin kann víðkast upp til 50.000 fermetrar afturat suðureftir. Nógv virksemi er á firðinum í sambandi við aling, og alifiskur hevur verið tikin og góðskaður á landi. Í Bygdini eru stór fiska- og frystivirki á havnarlagnum á Langasandi eins og privatir hava eisini hava gjørt stórar vinnuligar íløgur á havnarlagnum.

Bygdin Kollafjørður er m.a kend fyri, at Jens Christian Djurhuus (21. August 1773 – 21. November 1853) giftist við Jóhanne Maria Jensdóttir úr Kollafirði, sum arvaði Tinggarðin við Sjógv, har hann yrkti fleiri kvæðir og vísir har millum Ormurin langi nokk verða kendastur millum fólk. Garðurin stendur enn í dag, sum eitt prýðið fyri bygdina.

**Kollafjørður fór upp í Tórshavnar kommunu 1. Januar 2001.**

## Signabøur

Bygdin Signabøur verður vanliga roknað, sum ein partur av Kollafirði, men í kommunuætlanini verður hon roknað sum ein sjálvstøðug bygd við egnum postnummar. Bygdin verður við sínum 143 íbúgvum mett at hoyra til tær størru bygdirnar í kommununi. Í bygdini er eitt festi, Signabøshagi, sum er seks merkur og ber 240 áseyðir. Ein smábátahavn er í bygdini umframt nakað av lættari framleiðslu ídnaði. Størsta broyting á Signabø, seinast árini, var tá ið útstykkingin bleiv gjørd fyrst í nullunum. Signabøur er, í nýggjari tíð, kanska mest kend fyri hvalastøðina Sperm, sum virkaði fyrst í nítjan hundrað talinum og síðani eitt skifti aftur.

**Bygdin bleiv partur av Tórshavnar kommunu í 2001.**

## Oyrareingir

Bygdin Oyrareingir verður eisini vanliga roknað, sum ein partur av Kollafirði, men í kommunuætlanini verður hon roknað sum ein sjálvstøðug bygd við egnum postnummar. Bygdin verður við sínum 43 íbúgvum mett, at hoyra til tær smærru bygdirnar í kommununi. Í bygdini er eitt festi, Oyrareingjahagi, sum er fýra merkur og inntil 2019 vóru mjólkneyt eisini knýtt til garðin. Størsta broytin í bygdini, seinastu árini, var tá ið nýggj stór góðshavn bleiv bygd fyri nøkrum árum síðani. Marki millum Oyrareingir og Kollafjørð er áin Dalá.

**Bygdin bleiv partur av Tórshavnar kommunu í 2001.**

## Kaldbaksfjørður

Í Kaldbaksfirði liggja tríggjar bygdir. Á norðaru síðu liggur fólkaríkasta bygdin Kaldbak og innast í botninum liggur bóndabygdin Kaldbaksbotnur. Á sunnaru síðu liggur bóndabygdin Sund.

> AV FJÚRTAN BYGDUNUM Í KOMMNUNI ERU SEKS BYGDIR IÐ KUNNU BÓLKAST, SUM STØRRI BYGDIR (FLEIRI ENN 80 ÍBÚGVAR) OG ÁTTA BYGDIR, IÐ KUNNU BÓLKAST SUM SMÆRRI BYGDIR (FÆRRI ENN 80 ÍBÚGVAR)

## Kaldbak

Kaldbak er gomul markatalsbygd og telur hon 40 merkur býtt út á seks festir; Áarhagi er 5 merkur og ber 15 áseyðir, Áarhagi Norðasti er 5 merkur og ber 125 áseyðir, Bíggjarhagi Eystastipartur er 6 merkur og ber 152 áseyðir, Bíggjarhagi Yngstugimbrar er 6 merkur og ber 152 áseyðir, Bíggjarhagi Líarseyður er 6 merkur og ber 152 áseyðir, Bíggjarhagi Vestastipartur er 6 merkur og ber 152 áseyðir. Kaldbak er ein bóndabygd og umframt landbúnað er eisini annað smærri virksemi. Annað virksemi í bygdini er tengt at havinum og niðri við sjógvin er virkið ið tekst við taraframleiðslu og við síðuna av er ein vinnubygningur ið hýsir gransking inna djór og plantur í havinum, rondarstøðin Biofar.

Landbúnaður er sum sagt høvuðsvinna í bygdini og umframt at hava seyð so eru tvey festir í eisini hava mjólkineyt. Inn til 1980 kundi ein bert koma til bygdina til gongu ella við bát, tí tá bleiv vegur gjørdur úr Tórshavn til Kaldbaks. Kaldbak er millum annað sermerkt við gomlu kirkjuni á staðnum. Kirkjan er frá 1835 og er seinni umvæld í 1847, men greitt er, at kirkja hevur staði á grundini í fýrahundrað ár. Í 2016 bleiv nýggi kirkjugarðurin tikin í nýtslu og blíva fólk ikki longur grivin í garðinum uttan um kirkjuna. Eitt annað sum sermerkir bygdina er, at hon er týðiliga býtt upp í býlingar og tá ið nýggja útstykkingin skuldi gerast, ynskti bygdarfólki, at útstykkingin skuldi liggja í einum býlingi fyri seg sjálva.

**Kaldbak bleiv limur í Tórshavnar kommunu í 1977.**

## Sund

Markatalsbygdin Sund liggur á sunnara arminum av Kaldbaksfirði og umfatar hon einans ein bóndagarð har eitt fólk er skrásett í dag (2020). Sum áður nevnt, so hoyra tveir hagar til Sund, Sundshagi innari (6 merkut - 180 áseyðir) og Sundshagi uttari (6 merkur - 220 áseyðir). Tað sum sermerkir Sund er, at bygdin er bóndabygd við einum garði ið hevur ligið fyri seg sjálvan líka inn til vegurin kom úr havn. Eftir hetta bleiv elverkið hjá SEV bygt og seinni stór havn. Í dag er øki á Sundi umskapa til Ídnaðarøki og síðani tunnilin til Eysturoy er grivin, er ídnaðarøki voksið við meiri enn 45.000 m2.

**Sund kom upp í Tórshavnar kommunu í 1977.**

> BYGDIRNAR Í KOMMUNUNI ERU YMISKAR Í STØDD OG VIRKSEMI OG HAVA HVØR SÍNI SEREYÐKENNI. TÓRSHAVNAR KOMMUNA ARBEIÐIR FYRI AT SKIPA VØKSTURIN OG VARÐVEITA TEY SEREYÐKENNI, IÐ BYGDIRNAR HVØR SÆR HAVA.

## Hvítanes

Hvítanes liggur millum Kaldbaksfjørðin og Hoyvík. Fyrstu fólkini settu seg niður í 1837 og er bygdin sostatt niðursetubygd. Øll jørðin ið hoyrir til bygdina er privat ogn. Seinast árini er bygdin voksin nakað, við tað at ein útstykking bleiv gjørd ovast í bygdini. Ætlanir eru nú eisini frammi um, at byggja sunnanfyri bygdina og tá kann talan blíva um eina ferðfaldan av bygdini við tað at eini 40-50 íbúðir ætlandi skulu byggjast har.

Eitt sum sermerkti bygdina var, tann stóri trafikkurin av fólkum sum skuldu frá Eysturoy og til havnar. Gamalt var, at bátar ið komu norðan frá settu upp á Hvítanesi. Lendingarmøguleikarnir eru góðir har av tí, at lendast kann bæði norðan frá, í Akkersvík og sunnan frá, við lendingina í Gjønni. Hvítanes hevur havt egnan skúla, men er hann niðurlagdur fyri nøkrum árum síðani og ganga børnini nú í skúla aðrastaðni í kommununi.

**Hvítanes kom upp í Tórshavnar kommunu í 1977.**

## Nólsoy

Nólsoyggin liggur eystan fyri Tórshavn og er hon uml. 9 km long og 2,5 km har hon er breiðast. Hon er uml. 10 km2 til víddar og hægsta punkti er Eyggjarklettur í liggur 371 m. yvir havinum. Nólsoy er gomul markatalsbygd og telur hon tilsamans 48 merkur býtt út á tríggjar hagar; Junkarshagi ið er 14 merkur og 224 áseyðir, Borðan ið er 12 merkur og 192 áseyðir og síðani heimarahelvt ið er 22 merkur og 352 áseyðir.

Nólsoy er serliga kendi fyri sínar dugnaligu sjómenn. Mest kendu í gamlari og nýggjari tíð eru nokk Poul Poulsen (1766-1809), kendur sum Nólsoyar Páll og Ove Joensen (1948-1987). Nólsoyar Páll bygdi Royndina Fríðu, sum hann sigldi við millum lond og tók hann upp eitt stríð fyri, at bróta monopoli hjá konguliga einahandlinum. Somuleiðis er hann kendur fyri at flyta vaksinuna inn til Føroyar. Ove Joensen sigldi eisini úti alt sítt lív, men í 1986 gjøgnumførdi hann eitt bragd við at rógva frá Tórshavn til keypmannahavnar í einum føroysk bygdum báti.

**Nólsoy kom upp í Tórshavnar kommunu 1. Januar 2005.**

## Velbastaður

Velbastaður liggur vestanfyri Tórshavn á vestursíðuni av Streymoynni. Bygdin er gomul markatalsbygd í telur 32 merkur tilsamans býtt á sjey festir; Syðri spakiseyður ið er 4 merkur og 100 áseyðir, Norðari spakiseyður ið er 6 merkur og 150 áseyðir, Lambhagi ið er 6 merkur og 150 áseyðir, Líðarhagi ið er 4 merkur og 120 áseyðir, Fungagimbrar ið er 6 merkur og 120 áseyðir,

Heiðaseður ið er 3 merkur og 90 áseyðir og Gimbranar ið er 3 merkur og 100 áseyðir.

Velbastaður er nokk mest kend fyri, at vera eina størstu landbúnaðarbygd í Føroyum, við seyðahaldi og mjólkneytum. Inn til felagsfjósi í Havnardali bleiv bygt vóru tað seks-sjey festi við mjólkneytum, men í dag er tvey eftir í enn framleiða mjólk. Upprunaliga lá bygdin við lendingina niðri á Bakka og fyrstu húsini í fluttu niðan í brattan var garðurin Á Steinum, sum liggur í gamla partinum av bygdini nevndur Miðheimurin. Eitt av elstu ungmannafeløgum er í bygdini og bleiv Sólarmagn stovna í 1895.

Bygdin er vaksin nógv seinastu árini við tað útstykkingar eru gjørda í fleiri umførum. Fólkatali er sostatt vaksi nógv við tað, at avbygdafólk hava valt at seta búgv í bygdini og harvið seta sín erliga dám á gomlu bóndabygdina.

**Velbastaður kom upp í Tórshavnar kommunu 1. Januar 2005.**

## Kirkjubøur

Kirkjubøur er sunnasta bygdin á Streymoynni og liggur hon sunnanfyri Velbastað og vestanfyri Tórshavn.  Kirkjubøur er gomul markatalsbygd á tilsamans 39 merkur og eru fýra garðar í bygdini umframt Trøllhøvda; Kirkjubøhagi fyri heiman er Føroya stórsti garður og er hann 20 merkur og ber 343 áseyðir, Glyvurshagi ið er 9 merkur og ber 160 áseyðir, Trøllhøvdi ið ber 39 áseyðir, Inni í Dølum ið er 2 merkur og ber 40 áseyðir og Kirkjubøhagi fyri Handan ið er 8 merkur og ber 120 áseyðir.

Kirkjubøur er mest søguliga staði í Føroyum. Olavskirkjan bleiv bygd í 1200 talinum og er sostatt elsta kirkjan í Føroyum og blívur hon enn brúkt. Frá ár 1111 og fram til reformatiónina hevði Føroyar sítt egna bispadømi við Kirkjubø sum høvuðssæti. Sverri kongur vaks upp í Kirkjubø áðrenn hann fór aftur til Noregs fyri at verða kongur. Erlendur biskupur (1269-1308) sigst hava skrivað Seyðabrævið og eisini forsprákari fyri at byggja Magnus-Katidralin ella vanliga nevndur kirkjubø múrurin. Á gamla bóndagarðinum í Kirkjubø situr núverandi festarin sum 17'anda ættarlig á garðinum.

**Kirkjubøur kom upp í Tórshavnar kommunu 1. januar 2005.**

## Syðradalur

Bygdin Syðradalur liggur á vestursíðuni av Streymoy, nakað norðanfyri Velbastað. Syðradalur er gomul markatalsbygd á tilsamans 16 merkur og 310 áseyðir. Fyrr vóru trý festir, Syðradalshagi, Norðari partur og Syðri partur, men eru øll nú løgd saman við Syðradalshaga í eitt festi við saman festara. Í Syðradali er bæði seyðahald og mjólkineyt.

Syðradalur hevur síðani trúbótina verði festigarður hjá ymsum prestum í Suðurstreymoy og var tað líka til 1936, tá ið henda skipan bleiv broytt. Seinasti, sum festi prestajørð í Syðradali, var Jákup Dahl, próstur.

Eitt sum sermerkir Syðradal í dag er, at seinasti festarin hevur gjørt eitt stórt arbeiðið við at velta upp úr nýggjum. Tað er eitt fragd fyri eyga, at koyra oman í bygdina og síggja stóru fløtuna, ið er nývelt.

**Syðradalur kom upp í Tórshavnar kommunu í 1997.**

## Norðradalur

Bygdin Norðradalur liggur á vestursíðuni av Streymoy, norðanfyri Syðradal. Norðradalur er gomul markatalsbygd á tilsamans 21 merkur og 525 áseyðum. Í bygdini eru tvey festir; Presthagin Heima í Haga ið er 9 merkur og ber 265 áseyðir og Kongshagin Úti í Haga ið er 11 merkur og ber 260 áseyðir. Umframt seyðahald er eisini neytahald og nakað av flogfenaðhaldi í bygdini.

Bygdin er umgird av høgum fjøllum við góðum útsýni vestur í hav. Inn til 1977, tá ið vegur kom, hevur allur flutningur til og frá verið á rossabaki.

Nógv minnast serstaka persónin Andras í Norðradali, ið vildi jarðast á Norðadalsskarið, men fekk ikki loyvi tí hann skuldi jarðast í kristnari jørð. Hann liggur í dag grivin í Kaldbak.

Eitt sum sermerkir bygdina er, at búsetingin liggur ógvuliga spreitt. Tvey hús og skúlin liggja sunnanfyri Dalagjógv, meðan tvey hús liggja norðanfyri; á Fløtum og á Ytru Fløtum.

**Norðradalur kom upp í Tórshavnar kommunu í 1997.**

## Hestur

Hestoyggin, er ein av trimum oyggjunum ið hoyrir til Tórshavnar kommunu, hon liggur sunnanfyri Koltur og vestanfyri Streymoy. Bygdin í Hesti er gomul markatalsbygd á tilsamans 18 merkur og ber 600 áseyðir. Í bygdini eru trý festir; Hesthagi, Innarahelvt norðari ið er 5,12 merkur og ber 192 áseyðir, Miðjan Innarahelvt, syðri ið er 3,4 merkur og ber 108 áseyðir og Hesthagi Uttarahelvt ið er 9 merkur og ber 290 áseyðir.

Hestur er í nýggjari tíð nokk mest kendar fyri útróðurin og serliga turra- og ræstafiskin ið hekk til turka á gelendaranum, niðan frá havnini. Nógv fiskaarbeiði var í bygdini, men datt tað niðurfyri í nítiárunum. Eisini er tað eitt bragd, at ein so lítil bygd hevur egna svimjihøll. Nógv ferðafólk vitjar oynna, men flestu teirra koma ikki í land, men fara við smábáti inn í hellurnar vestanfyri – serliga Klæmintsgjógv.

**Hestur gjørdist partur av Tórshavnar kommunu 1. Januar 2005.**

## Koltur

Koltur er gomul markatalsbygd á tilsaman 17 merkur og 160 áseyðum. Í koltri var upprunaliga bert ein garður, men seinni býtt sundur í fýra, tá búðu um hálvthundrað fólk í oynni. Síðst í 1980-unum flutti seinasta fastbúgvandi fólkini úr bygdini og bleiv oyggin aftur løgd saman í eitt festi.

Í Koltri eru tveir býlingar, heima í Húsi og Norðri í Gerð og til hvønn býling hoyrdu tvey festir. Nú er øll fýra  festini løgd saman í eitt útisavn við einum fyristøðufólki ið umsitur Koltur og býr í sethúsinum Norðuri í Gerði.

Í dag er Koltur nokk mest kendar fyri útisavnið, har býlingurin Heima í Húsi er endurbygdur við stuðli frá grunnum o.ø, soleiðis at býlingurin Heima í Húsi er eitt sermerkt dømi uppá,  hvussu føroyingar búleikaðust fyrr í tíðini.

Koltursgrunnurin bleiv í 1993 settur á stovn av festarinum tá saman við Jarðarráðnum, til tess at varðveita serligu mentanarvirðini í Koltri.

**Koltur gjørdist partur av Tórshavnar kommunu 1. januar 2005.**

Bygdirnar í kommununi eru ymiskar í støðd og virksemi og hava hvør síni sereyðkenni. Tær eru eisini ymiskar við bústaðarøkjum, og flestu bygdirnar hava eisini smærri tænastu-, smásølu- og mentanartilboð. Tórshavnar kommuna arbeiðir fyri at skipa vøksturin og varðveita tey sereyðkenni, ið bygdirnar hvør sær hava. Bygdirnar eru ymiskar og hava ymiskan tørv á menning.

Hesin ymiskleiki er karmur um lívið í kommununi. Tórshavnar kommuna sær ymisleika sum eina styrki og arbeiðir framsøkin við at skapa eina samanhangandi og fjølbroytta høvuðs-staðarkommunu.



## 1.2.2 FRAMTÍÐAR BYGGING

Tórshavnar kommuna stendur í støðugum vøkstri. Tí er tað ein áhaldandi uppgáva hjá kommununi at nøkta framtíðar tørv á bústøðum, barnaansing, skúlum, eldrabústøðum og arbeiðsplássum. Hetta arbeiðið verður framt so hvørt og út frá hesum býarskipanarligum leiðreglum, umframt almennu byggisamtyktini og serstøkum byggisamtyktum (lýst niðanfyri).

**Fortreytirnar fyri framtíðar bygging í Tórshavnar kommunu eru hesar:**

- Bústaðir verða bygdir nær bústaðar-deplunum, og ynski er um fleiri íbúðir
- Skúlar eru nær bústaðardeplunum
- Deplarnir eru skipaðir soleiðis, at tað eggjar fólki at koma til økið
- Bústaðardeplarnir skulu við sínum virksemi stuðla undir og skapa samleika í nærøkjunum

Bústaðardeplarnir skulu vera lætt atkomuligir hjá fólkinum, ið bý har, m.a. við samanhangandi gøtukervi. Stuttir gonguteinar gera tað lagaligt hjá eldri og illa gongdum fólki, sum í framtíðini fer at hava áhuga at búgva í íbúðunum í miðdeplunum. Bústaðardeplarnir kunnu verða styrktir við at bjóða fólkum, ið búgva har, við í byggingartil-gongdina, so tey harvið fáa møguleika at seta sín egna dám á økið.

### Býarvakstrarøki og krøv til staðseting

Arbeitt verður í tveimum tættum við at útvega fleiri bústaðir, gjøgnum býartætting og meir-bygging. Býartætting er, at bygningar, øki og byggilendi í býnum verða endurnýtt og umskapað til bústaðir. Hin er við meirbygging í nýggjum býarvakstrarøkjum, sum verða mett at vera egnað til bústaðir, vinnulív og ítróttarvirksemi.

Øll økini kring høvuðsstaðin eru kannað og greinað. Greiningin vísir øll øki, sum út frá tekniskum ásetingum eru egnað til bygging.

**Greiningin er gjørd við støði í niðanfyristandandi ásetingum:**

**Krøv til byggilendi:**

- Vatnveitingarmøguleikarnir í dag eru avmarkandi, tí hægsti vatnbrunnurin í Tórshavn, liggur í 250 metra hædd. Tí er tað týdningarmikið, serliga í Tórshavn, at øki, skal vera undir 210 metrar hædd. Tó er veðurlagið í hæddini, sum heild, eisini ein forðing, tá tað snýr seg um bústaðar- og vinnuøki, og tað stuðlar undir hesa áseting.
- Bústaðarøki skulu í minstan mun vera á norðurvendum skráa, hetta við atliti til sólargang og hitalag um veturin. Har bygt longu er á norðurvendum skráa, eitt nú á Argjum, er tó møguligt at halda áfram við býarmenning.
- Økið skal hava minni enn 30 prosent hall. Bygt verður ikki í ov brøttum lendi, bæði tí tað er trupult at byggja, og tí tað er torført at gera atkomuligt við bili.
- Byggjast kann í økjum á Glyvursnesi, har ljóðið ikki verður harðari enn 55 desibel, um ein altjóða floghavn verður bygd.
- Sambært Løgtingslóg um náttúrufriðing eru verndarmørk fyri stórar áir 300 metrar hvørjumegin og frá sjónum 100 metrar niðan á land. Tá nýggj øki verða sett av til býarvøkstur, verður ikki bygt á hesum økjum uttan við serligum loyvi frá frið-ingarmyndugleikunum sambært Løgtings-lóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.
- Bygt verður ikki í friðaðum grønum geirum fram við stóru áunum Sandá og Hoydalsá, uttan við serligum loyvi frá friðingar-myndugleikunum sambært Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

## TAÐ ER EIN ÁHALDANDI UPPGÁVA HJÁ KOMMUNUNI AT NØKTA FRAMTÍÐAR TØRV Á BÚSTØÐUM, BARNAANSING, SKÚLUM, ELDRABÚSTØÐUM OG ARBEIÐSPLÁSSUM.

- Býarvakstrarøkini skulu vera atkomulig við atkomuvegum, ið ikki eru ov brattir.
- Vatnveitingar og kloakkleiðingar til býarvakstrarøki skulu kunna gerast uttan órímiliga stórar íløgur. Tískil er týdningarmikið í fyrstu atløgu at kanna møguleikarnar fyri býartætting.
- Býarvakstrarøkini skulu hanga saman við býarøkjum, ið longu eru bygd.

Út frá hesum krøvum ber til at vísa á øki kring høvuðsstaðin, ið sum útgangsstøði eru egnaði sum býarvakstrarøki og byggilendi. Tó eru fleiri atlit, ið skulu takast, áðrenn avgerð verður tikin um at fara undir útvegan av møguligum lendi. **Les meira um hetta undir "Býarvøkstur fram til 2032".**

**Nakrar leiðreglur eru eisini at hugsa um, tá ræður um bygging og staðseting av bygging og býarvakstrarøkjum:**

- Ymisk krøv verða sett til bygging, alt eftir hvat slag av bygging talan er um og eftir staðsetingini í býarøkinum.
- Deplavirksemi, handlar við gerandisvørum, skúlar, stovnar og trivnaðarvirksemi verða eftir førimuni staðsett í bústaðardeplunum.
- Handlar við úrvalsvørum verða í høvuðsheitum staðsettir í miðdeplinum, tó er økið á Hálsi áhugavert til stórar eindir.
- Nýggj bústaðarøki verða staðsett so nær bústaðardeplunum, sum til ber, t.e. innan fyri 1.000 m radius og, um til ber, innan fyri 500 m radius.
- Nýggir bústaðir verða staðsettir annaðhvørt í deplunum, t.d. sum meirbygging í Miðbýnum, ella í útjaðaranum av býnum. Ymisku støðini verða áhugaverd hvørt á sín hátt.
- Skrivstovur og onnur léttari vinna kann verða staðsett saman við bústøðum fyri at fáa fjølbroytni í býarøkini innan fyri 1000 m radius frá miðdeplinum í býarøkinum. Hesi økini hava ikki so strong ljóðkrøv sum bústaðarøki.
- Ídnaðarvinna verður vegna umhvørvisárin og ljóðdálking staðsett burtur frá bústaðarøkjunum í teimum ídnaðarøkjum, ið eru í dag, og í havnarøkjum, har atkomumøguleikarnir eru góðir. Tung ferðsla verður, í mestan mun leidd uttan um bústaðarøkini. **Les meira um hetta undir evninum 'Vinna'.**

# 1.3 KARMAR

## 1.3.1 LÓGIR Á ØKINUM

- **Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
- **Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m.**
- **Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum**
- **Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a.**
- **Løgtingslóg um landsvegir**
- **Løgtingslóg um umhvørvisvernd**
- **Løgtingslóg um verju av havumhvørvinum**
- **Løgtingslóg um náttúrufriðing**
- **Løgtingslóg um viðarlundir**
- **Løgtingslóg um landsjørð**

## 1.3.2 BYGGISAMTYKTIR

Við heimild í lóggávuni um býarskipanir og byggisamtyktir nýtir Tórshavnar kommuna byggisamtyktir til at stýra hvussu alt øki í kommununi skal skipast og gagnnýtast. Byggisamtyktirnar lýsa galdandi ásetingar fyri øki í mun nýtslu, bygging vm., og eru ein fortreyt fyri at ein ætlan kann fremjast á einum øki, t.d. um útstykking ella bygging kann loyvast. Tórshavnar kommuna deilir byggisamtyktirnar í tveir partar

- **Almenna byggisamtyktin, sum fevnir um alt í øki í kommununi**
- **Serstakar byggisamtyktir, sum fevna um ávís avmarkað øki.**

Byggisamtyktirnar eiga at samsvara við kommunuætlanina umframt aðrar ætlanir og politikkir í kommununi, og skulu tryggja at neyðug atlit verða tikin í mun til býarskipan.

**Allar byggisamtyktir eru tøkar á heimasíðuni www.torshavn.fo.**

## 1.3.3 POLITIKKIR OG ÆTLANIR

### Bústaðarpolitikkur

Í 2017 tók Tórshavnar kommuna stig til at evna ein bústaðarpolitikk fyri kommununa. Ásannandi, at fráflytingin, ið vit sóu fyrst í 2010'unum, var vend til fólkavøkstur, var neyðugt at evna ein nýggjan bústaðarpolitikk. Bústaðarpolitikkurin skal tryggja, at rúm verður fyri fleiri og at Tórshavnar kommuna gerst ein kommuna við fjølbroyttum bústaðarsløgum, bústaðarstøddum og kostnaðarstigi.

Niðurstøðan í bústaðarpolitikkinum er, at tørvur er á smærri bústøðum í ymsum kostnaðarstigi, og at tað er bráðneyðugur tørvur á fyribils loysnum til tilflytarar. Sum fólkatalið veksur, veksur bústaðartørvurin eisini, og roknast má við, at tørvur er á støðugt at økja um bústaðirnar.

Bústaðarpolitikkurin og Kommunuætlanin eru tengd at hvørjum øðrum. Kommunuætlanin er grundarlagið fyri framtíðar bústaðarbygging, og

bústaðarpolitikkurin verður tikin við í býarskipanarliga planlegging og staðseting av býarvakstrarøkjum.

## Parkeringspolitikkur

Á heysti 2015 samtykti býráðið parkeringspolitikk fyri Tórshavnar kommunu. Kommunan fremur átøk úr parkeringspolitikkinum í verki. Endamálið er stigvíst at áseta og tryggja, at parkeringsmøguleikarnir í kommununi verða nøktaðir og framtíðartryggjaðir, og at karmar verða gjørdir fyri framtíðar parkering í Tórshavnar kommunu. Parkeringspolitikkurin fevnir um alla kommununa, men ásetingarnar snúgva seg í høvuðsheitum um Tórshavnar miðbý. Parkeringspolitikkurin er stýrandi amboðið fyri skipan og viðurskiftir innan parkering í kommununi.

## Miðbýarætlan

Í 2016 tók Tórshavnar kommuna stig til at evna eina miðbýarætlan. Í ætlanini verður sett orð á ynski hjá Tórshavnar kommunu um at víðka og betra um miðbýin, og samstundis varðveita upprunalig snið við atliti at bygging og landslagi, herímillum Tinganes og virksemið á havnarlagnum, so leingi tí er lív lagað. Somuleiðis verður sett orð á møguleikar at byggja hægri og tættari og á tann hátt geva rúmd fyri spennandi arkitekturi í miðbýnum. Miðbýarætlanin er stýrandi amboðið fyri menningini í miðbýnum.

## Gulaætlan

Í 2016 tók Tórshavnar kommuna stig til at evna eina gulaætlan. Gula ætlanin fevnir um alla kommunala ljósseting í Tórshavnar kommunu. Endamálið við gulu ætlanini er at seta karmar um og geva ítøkiligar ávísingar til ljósið í Tórshavnar kommunu. Grundarlagið er sprotið úr einari norðurlenskari fatan av ljósi og estetikki saman við eini klárari hugsan um orku- og rakstrardygd. Gulaætlan er stýrandi amboð fyri ljósseting og snið av hesum í Tórshavnar kommunu.

## Grønaætlan

Arbeitt verður við einari grønari ætlan, ið skal blíva arbeiðsamboð soleiðis, at grøn øki í kommununi verða løgd miðvíst til rættis og tryggjaði í mun til varðveitlsu og nýtslu.

# 1.4 GRUNDAR-LAG

### 1.4.1 BROYTINGAR Í FÓLKATALINUM

Metingin um framtíðar tørv á bústøðum, barna-ansing, skúlum, eldrabústøðum og arbeiðsplássum verður gjørd við støði í einari forsøgn um, hvussu fólkatalið fer at laga seg tey komandi árini. Henda forsøgn hevur stóran týdning fyri allar aðrar liðir í kommunuætlanini.

Broytingarnar í fólkatalinum í Tórshavnar kommunu hava síðan ár 2000 verið sera skiftandi. Í høvuðs-heitum er antin stígur komin í fólkatalið ella hevur talan verið um vøkstur.

Tórshavnar kommuna er landsins størsta kommuna. Eins og vit síggja í grannalondum okkara, stendur fólkatalið í høvuðsstaðarøkinum í størri vøkstri enn í landinum annars. Frá túsundáraskiftinum er parturin av fólkinum í Føroyum, sum býr í Tórshavnar komm-unu, vaksin úr 39,5 prosentum upp í 42 prosent av fólkinum. Væntast kann, at hendan miðsavnandi gongdin heldur áfram, og at kommunan veksur lutfalsliga meira enn aðrar kommunur.

Tórshavnar kommuna hevur frá 2009 til 2019 havt fólkavøkstur, sum í miðal liggur um 1,0 prosent. Árini frá 2014-2018 hevur vøksturin ligið um 1,6 % í miðal.

Frá 2009 til 2012 stóð fólkatalið í stað. Í 2013 byrjaði fólkatalið at vaksa, tá við 0,8 prosentum, og helt áfram at vaksa fram til 2016, tá fólkavøksturin var 1,8 prosent. Í 2017 minkaði vøksturin aftur til 1,1 prosent, meðan fólkatalið í 2018 veruliga tók dik á seg aftur; tá vaks fólkatalið við 2,3 prosentum.

**Fólkatal í Tórshavnar kommunu**

| Ár | Fólkatal pr. 31.des | Fólkatalsbroyting (%) |
|---|---|---|
| 2009 | 19.799 | - |
| 2010 | 19.866 | 0,34 |
| 2011 | 19.762 | -0,52 |
| 2012 | 19.771 | 0,05 |
| 2013 | 19.935 | 0,83 |
| 2014 | 20.206 | 1,36 |
| 2015 | 20.499 | 1,45 |
| 2016 | 20.869 | 1,80 |
| 2017 | 21.113 | 1,17 |
| 2018 | 21.604 | 2,33 |

Kelda: Hagstova Føroya

Fólkatal í Tórshavnar kommunu pr. 31. des




Fólkatalsbroyting í Tórshavnar kommunu



Saman við ráðgevarafyritøkuni Rambøll hevur Tórshavnar kommuna mett um fólkavøksturin komandi árini. Tá fólkavøksturin hevur verið vaksandi seinastu árini, og heili 2,3 prosent í 2018, verður roknað við einum framtíðar árligum fólkavøkstri upp á 2,0 prosent fram til 2024. Tá tað kortini ikki tykist sannlíkt, at stóri fólkavøksturin fer at halda fram alt tíðarskeiðið, hendan kommunuætlanin er galdandi, verður roknað við, at fólkavøksturin verður 1,5 prosent árliga frá 2024 til 2032.

Henda meting er sannlíkt í ovara lagi, men tá ið metast skal um tørvin á nýggjum bústøðum, skúlum, dagstovnum og líknandi tey komandi árini, og ikki minst teirri tíðini, tað tekur at seta nýggjar verkætlanir í gongd, er betri at vera á tryggu síðuni og risikera yvirmeta fólkavøksturin enn at renna aftan á stórum fólkavøkstri. Tað er bæði lættari og bíligari at bíða við eini stórari verkætlan enn at noyðast at seta eina stóra bygging í verk undir trýsti.

Við hesum framskrivingum, sum byggja á ein árligan fólkavøkstur, sum er 2,0 prosent fram til 2024 og 1,5 prosent víðari fram til 2032, fer fólkatalið væntandi at síggja út sum víst niðanfyri. Hesi tølini skulu endurskoðast, tá kommunuætlanin verður dagførd aftur.

**Framrokning av fólkatali í Tórshavnar kommunu**

| Ár | Fólkatal |
|---|---|
| 2018 | 21.600 |
| 2024 | 24.300 |
| 2032 | 27.400 |

Allir aldursbólkarnir í Tórshavnar Kommunu vaksa tó ikki lutfalsliga eins. Elstu aldursbólkarnir vaksa væntandi lutfalsliga meiri enn yngstu aldursbólkarnir. Aldursbólkurin við fólki, sum eru 80 ár og eldri, er tvífaldaður síðan ár 2000 og heldur væntandi fram at vaksa.

Minsti aldursbólkurin er tey í 20-unum til mitt í 30-unum. Hetta kemst av, at ein stórur partur av føroyska ungdóminum fer uttanlands at nema sær hægri útbúgving.

Nýggjastu tølini frá Studna vísa, at í dag tekur umleið helvtin av føroyingum undir hægri útbúgving sína útbúgving uttanlands. Í 2018/2019 vóru 975 lesandi skrásett í Føroyum, meðan 991 vóru skrásett at vera lesandi uttanlands. Hetta tal er grundað á, hvussu nógv hava søkt ferðastuðul, og kann veruliga talið á lesandi uttanlands tí væntast at vera størri enn hetta.

Greiða gongdin er tó, at lutfalsliga fleiri velja at taka hægri útbúgving í Føroyum. Tøl frá Studna vísa eisini, at umleið 60 prosent av teimum, sum hava tikið hægri útbúgving uttanlands, flyta heim til Føroya aftur, og at hetta tal sum heild er vaksandi.

Hagstova Føroya metti í 2015, at størsti fólkavøksturin í reinum tølum fer at vera í aldursbólkinum 40+, meðan tað verður 67+ aldursbólkurin, sum fer at vaksa lutfalsliga mest í mun til býtið millum aldursbólkarnar í dag. Tórshavnar kommuna er ein kommuna við nógvum eldri borgarum, og framskrivingar benda á, at hesin bólkurin fer at vaksa lutfalsliga meira enn bólkurin av fólki í arbeiðsførum aldri.

Sostatt verður eisini tørvur á fleiri starvsfólkum í eldrarøktini í framtíðini. Hetta kann eisini fara at vísa seg at vera trupult, eftirsum samlaða arbeiðsmegin minkar lutfalsliga. Harafturat verða lutfalsliga færri skattgjaldarar, sum skulu gjalda fyri lutfalsliga størri tørv á eldrarøkt.

Núverandi og framtíðar fólkasamansetingin í Føroyum seta ávís krøv til planlegging og bústaðarútboð. Tað er týdningarmikið, at tað verður arbeitt miðvíst við bæði at skapa nøktandi eldrabústaðir, samstundis sum at arbeitt verður fyri at fáa fleiri ung at velja at taka útbúgving í Føroyum og soleiðis varðveita tilknýtið til samfelagið, og at tað verður arbeitt við at fáa tey ungu, sum fara av landinum at nema sær útbúgving, at flyta heim aftur aftan á loknan lesnað. Hetta kann alt gera, at javnvágin í fólkasamansetingini verður betri í framtíðini, enn higartil er spátt.

> TÁ IÐ METAST SKAL UM TØRVIN Á NÝGGJUM BÚSTØÐUM, SKÚLUM, DAGSTOVNUM OG LÍKNANDI TEY KOMANDI ÁRINI, OG IKKI MINST TEIRRI TÍÐINI, TAÐ TEKUR AT SETA NÝGGJAR VERKÆTLANIR Í GONGD, ER BETRI AT VERA Á TRYGGU SÍÐUNI OG RISIKERA YVIRMETA FÓLKAVØKSTURIN ENN AT RENNA AFTAN Á STÓRUM FÓLKAVØKSTRI

## 1.4.2 TØRVUR Á BÚSTØÐUM

Um fólkatalið veksur, veksur bústaðartørvurin eisini. Samstundis minkar støddin á húskjunum spakuliga. Í teimum seks árunum frá 2013 – 2018 minkaði støddin á húskjunum í Tórshavnar kommunu við umleið 7,5 prosentum til at vera 3,0 fólk í hvørjum húski. Roknast kann tí við, at húskini kunnu gerast uppaftur minni. Til samanberingar kann nevnast, at húskini í Danmark eru munandi minni í miðal; har búðu í 2018 í miðal 2,15 fólk í hvørjum húski.

Tí verður roknað við, at húskini minka við uppaftur 10 prosentum frá 2018 fram til 2032. Sostatt verður roknað við, at húskini fara frá at vera í miðal 3,0 fólk fyri hvørt húski í 2018 til at vera 2,70 fólk í hvørjum húski í 2032.

Tørvurin á nýggjum bústøðum í kommununi stavar sostatt bæði frá fólkavøkstri og at húskini gerast smærri.

Við støði í teimum bústøðum, sum vóru við árslok 2018, íroknað teir bústaðir, sum byggiloyvi er givið til, verður tørvur á umleið 1.200 nýggjum bústøðum í Tórshavnar kommunu fram til ár 2024. Fram til ár 2032 verður tørvur á uppaftur 1.800 nýggjum bústøðum.

Hetta svarar til, at tørvur verður á umleið 200 nýggjum bústøðum um árið fram til 2024 og 225 nýggjum bústøðum um árið frá 2025 til ár 2032.

Framtíðar bústaðarbygginging verður sum útgangsstøði gjørd í teimum býarøkjum/deplum, sum longu eru. Roknað verður við, at bústaðir verða staðsettir í blandaðum miðstaðar- og bústaðarøkjum, í tættari bygdum økjum og í bygningum í fleiri hæddum.

**Framrokning av bústaðartørvi í Tórshavnar kommunu**

| Ár | Íbúgvar | Húskisstødd | Bústaðir | Bústaðartørvur |
|---|---|---|---|---|
| 2018 | 21.600 | 3,00 | 7.200 | - |
| 2024 | 24.300 | 2,89 | 8.400 | 1.200 |
| 2032 | 27.400 | 2,70 | 10.200 | 3.000 |

## Bústaðarsløg í Tórshavnar kommunu

Í 2018 hevur Tórshavnar kommuna gjørt ein bústaðarpolitikk fyri kommununa. Bústaðarpolitikkurin leggur dent á, at arbeitt verður fyri at skapa ein fjølbroyttan bústaðarmarknað við blandaðum bústaðarsløgum. Eisini verður lagt upp til, at byggjast skal tættari í miðbýnum og í verandi bústaðarøkjum.

Av teimum 7212 bústøðunum, sum vóru í Tórshavnar kommunu í 2018, vóru heili 72 prosent sethús. Sethús eru størsti parturin av bústaðarmongdini í Tórshavnar kommunu. Umleið 720 bústaðir eru í bygdunum; í høvuðsheitum er talan um sethús.

Í 2018 vóru 11 prosent av øllum bústøðum í kommununi íbúðir og 17 prosent tví- og raðhús. Roknað verður við, at hesin parturin fer at vaksa munandi, av tí at stórur eftirspurningur er eftir serliga smærri bústøðum í Tórshavn, Hoyvík og á Argjum.

<table>
<tr><th>Bústaðarslag</th><th>2003</th><th>2013</th><th>2016</th><th>2018</th><th>Ynskiligt framtíðarbýti</th><th>%</th></tr>
<tr><td>Sethús</td><td rowspan="2">5.300</td><td>5.000</td><td>5.000</td><td>5.200</td><td>60%</td><td>72,2</td></tr>
<tr><td>Tvíhús/raðhús</td><td>800</td><td>900</td><td>1.200</td><td>20%</td><td>16,7</td></tr>
<tr><td>Íbúðir</td><td>300</td><td>400</td><td>500</td><td>800</td><td>20%</td><td>11,1</td></tr>
<tr><td>Í alt</td><td>5.600</td><td>6.200</td><td>6.400</td><td>7.200</td><td>100</td><td>100</td></tr>
</table>

> TÓRSHAVNAR KOMMUNA YNSKIR, AT BÝTIÐ AV SAMLAÐU BÚSTØÐUNUM Í KOMMUNUNI Í FRAMTÍÐINI VERÐUR SOLEIÐIS:
> - 60 PROSENT SETHÚS
> - 20 PROSENT TVÍHÚS OG RAÐHÚS
> - 20 PROSENT ÍBÚÐIR

Í Føroyum er framvegis eitt greitt ynski um at seta føtur undir egið borð, og tað vil hjá nógvum siga at byggja egin sethús. Tórshavnar kommuna fer tí framhaldandi at gera útstykkingar til sethús. Í mun til fólkasamanseting og burðardygga planlegging er hetta bústaðarslagið tó ein avbjóðing. Tískil ynskir Tórshavnar kommuna at stuðla undir, at tað í størri mun eisini verða bygdar íbúðir og tví- og raðhús við ymsum ognarviðurskiftum.

Tórshavnar kommuna ynskir, at býtið millum bústaðarsløgini í framtíðini verður soleiðis, at sethús verða 60 prosent av samlaðu bústøðunum, tvíhús og raðhús verða 20 prosent av samlaðu bústøðunum í kommununi og íbúðir verða 20 prosent av samlaðu bústøðunum í kommununi. Út frá galdandi tølum og teimum bústaðarbyggingum, sum eru farnar í gongd, verður skotið upp, at framtíðar bygging verður framd út frá hesum karmi.

Við tí væntaða fólkavøkstrinum verður tørvur á umleið 1200 bústøðum afturat í 2024 og so uppaftur 1800 bústøðum áðrenn 2032.

Fólkavøkstur og bústaðartørvur eru torfør at meta um, tá hugt verður langt inn í framtíðina. Tí er áhaldandi neyðugt at dagføra tølini, framskrivingarnar og tær ætlanir, ið eru tengdar at framskrivingunum.

| Bústaðarslag | Bústaðir í 2018 | 2024 | | | 2032 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Uppskot vøkstur | Bústaðir í alt | Bústaðir í % | Uppskot vøkstur | Bústaðir í alt | Bústaðir í % |
| Sethús | 5.200 | 400 | 5.600 | 67 | 1.000 | 6.200 | 61 |
| Tvíhús/raðhús | 1.200 | 300 | 1.500 | 18 | 700 | 1.900 | 19 |
| Íbúðir | 800 | 500 | 1.300 | 15 | 1.300 | 2.100 | 20 |
| **Í alt** | 7.200 | 1.200 | 8.400 | 100 | 3.000 | 10.200 | 100 |

## Tørvur á øki til bústaðarbygging

Øktur bústaðartørvur merkir eisini øktur tørvur á byggilendi. Verður fólkavøksturin, sum her er roknað við, og vit fáa tørv á í alt 3.000 nýggjum bústøðum fram til 2032, vísir greining frá Rambøll, at tørvur verður á umleið 116 hektarum, ella 1.160.000 m2 av nýggjum lendi til bústaðir tey komandi 12 árini.

Hetta er grundað á tøl, sum vísa miðal økisnýtsluna fyri nýggjar bústaðir. Tølini fevna bæði um grundøki, fríøki og øki til undirstøðukervið. Lyklatølini eru frá kommunuætlan fyri Tórshavnar kommunu frá 2014.

Sammett við nýttu virðini í Danmark, er økistørvurin fyri hvønn nýggjan bústað settur heldur lágt. Sambært donskum royndum eru tølini ávikavist 10, 20 og 30 bústaðir pr. ha. Sostatt hongur samlaði økistørvurin óloysiliga saman við støddini á grundstykkjum og økjum til hvørja bústaðareind.

Umframt tørvin á 116 hektarum til bústaðarbygging fram til 2032, verður eisini ein øktur tørvur á øki til vinnubygging. Mett verður, at fram til 2032 verður tørvur á umleið 40 hektarum til nýggj vinnuøki. **Nærri frágreiðing, sí 'Framtíðar tørvur á vinnuøkjum' undir evninum Vinna.**

Til tess at taka sum minst burtur av haganum til nýtt byggilendi verður mælt til at troyta møguleikarnar fyri býartætting sum mest. Tórshavnar kommuna eigur umleið 24 hektarar av lendi í verandi býi, sum kunnu nýtast til býartætting.

Tó slepst ikki undan, at tørvur verður eisini á at útvega meira lendi til býarvøkstur, til tess at kunna nøkta bústaðartørvin fram til 2032.

| Bústaðarslag | Bústaðir pr. ha | 2020-24 | | 2020-32 | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Nýggir bústaðir | Økisnýtsla (ha) | Nýggir bústaðir | Økisnýtsla (ha) |
| Sethús | 14 | 400 | 28,6 | 1.000 | 71,4 |
| Tvíhús/raðhús | 33 | 300 | 9,1 | 700 | 21,2 |
| Íbúðir | 55 | 500 | 9,1 | 1.300 | 23,6 |
| **Í alt** | - | 1.200 | 46,8 | 3.000 | 116,2 |

Roknaður tørvur á øki til bústaðarbygging í 2024 og 2032 (1 ha =10.000m2)

## 1.4.3 BÝARVØKSTUR FRAM TIL 2032

Stórur eftirspurningur er eftir bústøðum og grundøki í Tórshavnar kommunu. Við væntaða fólkavøkstrinum fram til 2032 verður tørvur á útivið 1200 bústøðum afturat fram til 2024 og uppaftur 1800 bústøðum fleiri fram til 2032. Hetta svarar til 3000 nýggjar bústaðir í 12 ár, í miðal einar 250 nýggjar bústaðir um árið.

Skal Tórshavnar kommuna veita møguleika fyri at byggja so nógvar bústaðir, verður neyðugt at vaksa um verandi bý, bæði við at byggja tættari í verandi býarøkjum og við at útvega meira lendi til býarvøkstur. Skulu nýggj øki leggjast út til býarvøkstur og útstykkingar gerast longur niðan í hagarnar, skal atlit takast til, hvørja ávirkan hetta hevur á náttúru og djóralív í haganum. Harumframt skal neyðuga undirstøðukervið bindast uppí og leiðingar til vatn, kloakk og spillivatn leggjast til nýggju økini.

Øki kring bygdirnar eru enn ikki greinaði nóg nógv til at øki kunnu peikast út sum egnaði til býarvøkstur. Hetta kemur við í kommunuætlanina í næstum.

Við at tætta í verandi býi ber til at fáa fleiri bústaðir uttan at víðka um verandi bý. Fyrimunur við tætting er, at í stóran mun er undirstøðukervið til bústaðarbygging, so sum vegir og tekniskar leiðingar, longu lagt út til økini. Tó er neyðugt at tryggja, at undirstøðukervið megnar økta trýstið av tættari bygging. Eisini er neyðugt at taka atlit til tørvin á at varðveita grøn fríøki inni í býnum. Millum býlingar eru ofta lagdir grønir geirar av til fríøki, og eigur ikki at verða bygt á hesum økjum. Møguleikarnir við býartætting eru í stóran mun at gagnnýta traðir og aðra jørð, ið ikki er løgd út til fríøki, umframt at taka niður og byggja nýtt ella at broyta verandi bygningar til bústaðar- ella miðstaðarendamál.

Tórshavnar kommuna hevur nógvan landbúnað, og er umleið helvtin av allari mjólkarframleiðslu í landinum í Tórshavnar kommunu. Týdningarmikið er tí eisini at taka atlit til hetta og royna at varðveita góð dyrkilendi til tess at stuðla undir landbúnað og framleiðslu av landbúnaðarvørum í Føroyum. Tí verður, í mest møguligan mun, ikki lagt upp til at leggja velta landbúnaðarjørð út til býarvøkstur, hóast góð landbúnaðarjørð oftast eisini er væl egnað til býarvøkstur.

### Egnað øki til býarvøkstur

Út frá teimum leiðreglum, ið eisini eru ávístar undir evninum “Býarvakstrarøki og krøv til staðseting”, hevur Tórshavnar kommuna, í samstarvi við Rambøll A/S í Danmark, gjørt eina greining av øllum økinum kring høvuðsstaðin, við tí endamáli at kunna vísa á egnað øki til byggilendi. Til tess at finna tey lendi kring høvuðsstaðin, ið eru egnað til býarvøkstur, eru øll økini kring høvuðsstaðin kannað og greinað við støði í hesum krøvum:

**Krøv til byggilendi:**

- Vatnveitingarmøguleikarnir í dag eru avmarkandi, tí hægsti vatnbrunnurin í Tórshavn, liggur í 250 metra hædd. Tí er tað týdningarmikið, serliga í Tórshavn, at øki, skal vera undir 210 metrar hædd. Tó Eisini er veðurlagið í hæddini, sum heild, eisini ein forðing, tá tað snýr seg um bústaðar- og vinnuøki, og tað stuðlar undir hesa áseting.
- Bústaðarøki skulu í minstan mun vera á norðurvendum skráa, hetta við atliti til sólargang og hitalag um veturin. Har bygt longu er á norðurvendum skráa, eitt nú á Argjum, er tó møguligt at halda áfram við býarmenning.
- Økið skal hava minni enn 30 prosent hall. Bygt verður ikki í ov brøttum lendi, bæði tí tað er trupult at byggja, og tí tað er torført at gera atkomuligt við bili.
- Byggjast kann í økjum á Glyvursnesi, har ljóðið ikki verður harðari enn 55 desibel, um ein altjóða floghavn verður bygd.
- Sambært Løgtingslóg um náttúrufriðing eru verndarmørk fyri stórar áir 300 metrar hvørjumegin og frá sjónum 100 metrar niðan á land. Tá nýggj øki verða sett av til býarvøkstur, verður ikki bygt á hesum

økjum uttan við serligum loyvi frá friðingarmyndugleikunum sambært Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

- Bygt verður ikki í friðaðum grønum geirum fram við stóru áunum Sandá og Hoydalsá, uttan við serligum loyvi frá friðingar-myndugleikunum sambært Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

- Býarvakstrarøkini skulu vera atkomulig við atkomuvegum, ið ikki eru ov brattir. Hallið á atkomuvegum kann í mesta lagi vera upp til 80 ‰.

- Vatnveitingar og kloakkleiðingar til býarvakstrarøki skulu kunna gerast uttan órímiliga stórar íløgur. Tískil er týdningar-mikið í fyrstu atløgu at kanna møgu-leikarnar fyri býartætting.

- Býarvakstrarøkini skulu hanga saman við býarøkjum, ið longu eru bygd.

Harumframt eru atlit tikin til varðveitslu av landbúnaðinum í Tórshavnar kommunu. Nógvur landbúnaður er í Tórshavnar kommunu, og tí eisini nógv velt lendi. Velt lendi liggur oftast soleiðis fyri, at tað eisini er væl egnað til býarvøkstur og bústaðarbygging.

Ynskiligt er at varðveita og stuðla undir landbúnað í kommununi, og tí er velt lendi, sum tekniskt sæð er egnað til landbúnað, raðfest fyri seg. Endamálið er ikki at leggja hesi øki út til býarvøkstur í nærmastu framtíð, men einans at vísa á, at hesi lendini eru egnaði til býarvøkstur í framtíðini, til dømis um festini verða niðurløgd ella onnur viðurskifti gera, at økini ikki longur verða nýtt til landbúnað.

Eisini eru atlit tikin til aðra ætlaða nýtslu av økjum, eitt nú í Havnardali og lutvíst í Flatnahaga, har ætlanir eru um at varðveita nøkur fríøki, at skógfriða og annars at hava møguleika fyri ymisk-um frítíðarvirksemi. Hesi øki eru sambært greiningini egnaði til býarvøkstur, men grunda á at landsbúnaður er á økinum umframt ynski eru um at varveita nøkur fríøki, verður væntandi ikki bygt á økjunum.

Á kortinum verður tí víst á fimm ymiskar rað-festingar av økjum, sum eru egnaði til býarvøkstur ella býartætting.

**Talan er her um**

1. Øki, ið eru egnað til býarvøkstur, men sum bert verður víst á sum ein framtíðar møguleiki
2. Øki, ið eru egnað til býarvøkstur, men sum eru velt lendi
3. Øki, ið eru egnað til býarvøkstur
4. Øki, ið farið er undir at skipa (eru í gerð)
5. Kommunal øki, ið eru egnað til býartætting

Í økisgreiningini er talan um bruttoøki, sum í roynd og veru mugu metast at minka nakað orsakað av staðbundnum viðurskiftum, so sum klettar, áir, grøn øki, mentanarminni og fagurfrøðilig virði. Í vavi er ymiskt frá øki til øki, hvussu stór minkingin er av hesum orsøkum, og skal hetta metast um ítøkiliga fyri hvørt øki sær, tá eitt øki verður skipað. Tað verður mett, at ávístu økini í miðal kunnu roknast við at minka við umleið 20 prosentum.

Atlit eru ikki tikin til ognarviðurskifti, tá greiningin av egnaðum økjum til býarvøkstur er gjørd. Til býar tætting verður tó einans víst á øki, ið Tórshavnar kommuna sjálv eigur.

| Raðfesting av økjum | Bruttoøki (ha) | Nettoøki (ha) |
|---|---|---|
| Framtíðarmøguleikar | 89 ha | 71 ha |
| Øki til býarvøkstur, velt lendi | 179 ha | 143 ha |
| Øki til býarvøkstur | 323 ha | 258 ha |
| Í gerð | 64 ha | 51 ha |
| Kommunal øki til býartætting | 24 ha | 19 ha |
| **Í alt** | **679 ha** | **542 ha** |




## Býarvakstrarøki og tætting

## Raðfest øki til býarvøkstur

Tey økini, ið eru ávíst sum egnaði øki til býarvøkstur, liggja ymiskt fyri og hava hvørt sær fyrimunir og avbjóðingar í mun til býarvøkstur. Tí verður mett um økini út frá ymsum fortreytum og hvussu væl tey lúka hesar fortreytir. Hetta er gjørt til tess at kunna gera eina raðfesting millum tey egnaðu økini.

Fortreytirnar, ið økini eru mett út frá, eru:

- **Atkoma**
- **Veðurlag**
- **Umhvørvisárin**
- **Trivnaðarviðurskifti**
- **Lendisútvegan**
- **Fíggjarligar avleiðingar**

**Atkoma** fatar partvíst um atkomu til høvuðsveg og partvíst um frástøðu frá býnum. Øki við stuttari frástøðu til høvuðsveg og nær býnum eru væl egnað til býarvøkstur.

**Veðurlag** er ein samanrenning av hitaviðurskiftum, tá atlit eru tikin til hæddina í lendinum, vind o.a. Hagtøl vísa, at vesturættirnar eru vanligast í Havn, jbr. Vindrósuna. Í síni heild er minni vindur í Havn enn flestu onnur støð í Føroyum. Flestu støð í Havn lívir á vesturættini. Øki lágt yvir sjónum, har tað ikki er ábært fyri nógvum vindi, eru væl egnað til býarvøkstur.

**Umhvørvisárin** lýsir, hvussu økini eru ávirkað av óljóði frá vegum, havnum, vindmyllum og floghavnum og av útláti annars. Øki væl burtur frá møguligum keldum til umhvørvisárin eru væl egnað til býarvøkstur.

**Trivnaðarviðurskiftini** snúgva seg um, at sosialar umstøður og trivnaður verða vigað eftir fráleika og fjarstøðu til miðbýin og bústaðardeplarnar. Tað hevur týdning fyri trivnaðin at hava dygdargóð býarарúm. Øki, sum eru nær núverandi bústaðardeplunum, eru tí væl egnað til býarvøkstur.

**Lendisútvegan** snýr seg um møguleikarnar fyri at útvega lendi til býarvøkstur. Hetta er ofta torført og kostnaðarmikið, tí tað er grundað á ognarviðurskifti og galdandi jarðarprísir. Øki, ið kommunan longu eigur, ella sum verða mett at vera lutfalsliga løtt at útvega, eru væl egnað til býarvøkstur.

**Fíggjarligar avleiðingar** fata um íløgur í byggibúning, undirstøðukervi, leiðingar o.a. Øki, sum krevja lutfalsliga fáar íløgur í hesi, eru væl egnað til býarvøkstur.

Býarvakstrarøkini eru mett eftir, hvussu væl tey lúka hesar fortreytirnar. Fyri hvørja fortreyt er ásett, um økið er væl egnað (+1), miðal (0) ella ikki væl egnað (-1) til býarvøkstur. Henda samanteljing sæst í talvuni, sum vísir úrslitið av raðfestingunum.

Eitt øki er sjáldan væl egnað innan allar fortreytir. Tí eru eisini onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi, eitt nú at ymisk sløg av bygging fáa fyrimun av ymiskum fortreytum. T.d. er umráðandi fyri bústaðarbygging, at trivnaðarviðurskiftini eru góð. Hinvegin er hetta ikki líka umráðandi, tá vinnuvirki verða bygd.

Vit nýta metingina niðanfyri sum vegleiðandi fyri raðfesting av økjum men tað kunnu vera onnur viðurskifti, sum eisini gera seg galdandi fyri raðfestingina. Til dømis kunnu fíggjarligu avleiðingarnar vera so mikið stórar, at hetta ber av øllum hinum fortreytunum, eitt nú um nýggjar høvuðsleiðingar til kloakk skulu leggjast gjøgnum bygd øki, soleiðis sum støðan t.d. er við økinum í Húsahaga (2). Kortini eru tølini løgd saman, til tess at geva eitt betri yvirlit.

| ØKI | NAVN | ATKOMA | VEÐURLAG | UMHVØRVIS-ÁRIN | TRIVNAÐAR-VIÐUR-SKIFTI | LENDIS-ÚTVEGAN | FÍGGJARLIGAR AVLEIÐINGAR | SAMANTALT |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | Stóratjørn | +1 | +1 | 0 | +1 | 0 | +1 | +4 |
| **2** | Húsahagi | +1 | 0 | 0 | -1 | 0 | -1 | -1 |
| **3** | Undir Vesturvarða | +1 | +1 | 0 | +1 | +1 | -1 | +3 |
| **4** | Flatnahagi | +1 | 0 | 0 | 0 | +1 | -1 | +1 |
| **5** | Klingurstjørn | +1 | -1 | +1 | 0 | 0 | +1 | +2 |
| **6** | Glyvursnes | -1 | -1 | -1 | -1 | 0 | -1 | -5 |

Niðanfyri eru raðfestu býarvakstrarøkini býtt í fýra bólkar eftir, hvussu góð staðsetingin av einum býarvakstrarøki er, mett út frá fortreytunum omanfyri.

| Staðseting | Býarvakstrarøki | Bruttoøki (ha) | Nettoøki (ha) |
|---|---|---|---|
| Besta staðseting | Stóratjørn (1) | 79 ha | 63 ha |
| Næstbesta staðseting | Undir Vesturvarða (3), Klingurstjørn (5) | 111 ha | 89 ha |
| Góð staðseting | Flatnahagi (4), | 29 ha | 23 ha |
| Minni góð staðseting | Húsahagi (2), Glyvursnes (6) | 152 ha | 122 ha |
| **Í alt** | | **371 ha** | **297 ha** |

# GRUNDARLAG

Best egnaða økið til býarvøkstur er heilt vist økið við Stórutjørn í Hoyvík. Víst verður her bæði á økið, ið farið longu er undir at skipa, og økið norðanfyri, ið er egnað til býarvøkstur, men ikki er velt. Veðurlagið er hampuligt, hóast økið liggur ovarlaga í Hoyvíkshaganum. Atkomuviðurskiftini eru sera góð, serliga tá nýggi innkomuvegurin til Havnar er gjørdur. Økið liggur eisini tætt upp at bústaðardepilinum í Hoyvík, har skúli, ítróttar-virksemi, handlar og almennir stovnar eru. Viðvíkjandi kloakkviðurskiftum liggur økið væl fyri, tá tað ber til at føra nýggja høvuðskloakk-leiðing út á sjógv, uttan at fara gjøgnum bygt øki. Tí er økið best egnað til býarvøkstur.

Næstbestu staðsetingarnar av økjum eru væl egnaðar til býarvøkstur, men verða ikki raðfestar eins høgt og Stóratjørn.

- **Undir Vesturvarða (3)** liggur sera væl tá hugsað verður um veðurlag, vegakervi og trivnaðarviðurskifti. Tó verður mett, at ein neyðug íløga í kloakkviðurskifti kann gerast dýr, um neyðugt verður at leggja nýggja høvuðsleiðing gjøgnum verandi bý.

- **Klingurstjørn (5)** liggur minni væl tá tað snýr seg um veðurlagið. Hinvegin eru atkomuviðurskifti og umhvørvisárin í hesum øki sera góð. Eisini verður mett, at fíggjarligu avleiðingarnar av at menna hetta økið til býarvøkstur eru lutfalsliga smáar, tá vegakervið er tætt við og tað ber til at leiða kloakkirnar út á sjógv uttan at fara gjøgnum verandi bý.

Ein góð staðseting av býarvakstrarøki hevur ávísar fyrimunir og vansar, ið neyðugt er at taka støðu til, um farið verður undir býarvøkstur í hesum øki.

- Atkomuviðurskiftini eru góð í **Flatnahaga (4)**, serliga tá innkomuvegurin til Havnar er gjørdur. Økið liggur lutfalsliga høgt uppi og ábært í mun til veðurlag. Hinvegin er tá møguleiki fyri góðum útsýni. Tórshavnar kommuna eigur lendið, og er tí ongar forðingar fyri at nýta lendið til býarvøkstur Tó er ein stórur vansi við økinum, at mett verður, at neyðuga íløgan í at leggja kloakk í økinum er sera dýr.

Tær minni væl egnaðu staðsetingarnar av økjum hava ávísar fyrimunir og lutfalsliga størri vansar, og verða tí raðfestar lægst av teimum ávístu og raðfestu býarvakstrarøkjunum.

- Atkomuviðurskiftini í **Húsahaga (2)** eru sera góð, tá til ber at koma inn á økið frá Oyggjarvegnum. Økið liggur lutfalsliga avbyrgt og langt burtur frá øðrum. Tí eru trivnaðarviðurskiftini ikki so góð her. Mett verður, at neyðuga íløgan í kloakk, um økið skal nýtast sum bústaðarøki, er órímiliga dýr. Tí kann hugsast, um økið her kann nýtast til vinnuøki, tá tað ikki krevur eins nógv av kloakering.




**Mynd:** Vindrósa fyri Havnina gjørd við støði í mátingum í tíðarskeiðinum 1963-2000




# Raðfest býarvakstrarøki

Raðfest býarvakstrarøki

Í gerð

Tølini á kortinum vísa hvussu býarvakstrarøkini verða raðfest:

**1** Stóratjørn
**2** Klingurtjørn
**3** Undir Vesturvarða
**4** Flatnahagi
**5** Húsahagi
**6** Glyvursnes

## Broytt nýtsla av kommunalum bygningum

Umframt at byggja nýtt og at byggja tættari finnast eisini møguleikar í at gagnnýta verandi tilfeingi betur. Tað kann eitt nú vera við at umskipa verandi bygningar til aðra nýtslu.

Tórshavnar kommuna eigur nógvar bygningar í Havn, ið verða nýttir til ymiskt virksemi. Summir av bygningunum verða einans nýttir fáar tímar um vikuna. Tískil kann umskipan av hesum virksemi útvega fleiri tómar bygningar, sum so kunnu umvælast og umskipast til t.d. bústaðir.

Ein annar møguleiki er, at kommunan kann selja onkrar av bygningunum, á sama hátt sum tá Kommunuskúlin varð seldur við tí fyri eyga at útvega fleiri bústaðir.

## 1.4.4 FLOGVØLLUR Á GLYVURSNESI

Hugskotið at gera nýggja føroyska floghavn á Glyvursnesi er frá miðskeiðis í 80-árunum. Floghavnin skuldi kunnað tikið móti størri flogførum. Veðurkanningar vísa á møguleikar fyri betri reglusemi í flogferðsluni. Býarvakstrarøkini á Hamrinum og undir Kirkjubøreyni verða sambært árinskanning frá ráðgevarafyritøkuni Rambøll A/S ikki órógvað av óljóði frá floghavnini.

Ein kanning av óljóðinum frá floghavnini varð upprunaliga gjørd í 2008, og eru býarvakstrarøki út eftir Glyvursnesi ávíst út frá tí, at tey ikki koma at liggja nærri flogvøllinum, enn at ljóðið frá flogvøllinum verður harðari enn 55 dB. Tá varð útgangsstøði tikið í einum altjóða flogvølli, sum var 2700m til longdar, og teimum mest aktuellu sløgunum av flogførum, nevniliga Airbus 319, 320 og 321, umframt flogfør av slagnum Boeing B737 og B757.

Í 2019 hevur Rambøll endurskoðað kanningina frá 2008, til tess at vita, um nakað gevur høvi til at broyta upprunaligu staðsetingarnar. Niðurstøðan er, at hóast loftferðslan til og úr Føroyum er vaksin nógv, skal munandi meira og størri ferðsla til, fyri at neyðugt verður at broyta frástøðuna. Samstundis gongur tøkniliga menningin tann vegin, at flogførini yvirhøvur geva minni ljóð frá sær.

Samsvarandi niðurstøðuni hjá Rambøll A/S verður tí hildið fast við upprunaliga ávístu býarvakstrar-økini út eftir Glyvursnesi, tá hesi ikki verða órógvað óneyðuga nógv av ljóði frá einum møgu-ligum altjóða flogvølli á Glyvursnesi.




## Ljóðdálking frá flogvølli á Glyvursnesi



# **NÁTTÚRA,** VARÐVEITING OG **UMHVØRVI**

# 2.0

# NÁTTÚRA, VARÐVEITING OG UMHVØRVI


| | | |
|---|---|---|
| **2.1** | **LÝSING** | 57 |
| **2.2** | **LEIÐREGLUR** | 60 |
| 2.2.1 | Náttúran | 61 |
| 2.2.2 | Varðveiting og friðing | 61 |
| 2.2.3 | Orku- og umhvørvismál | 62 |
| 2.2.4 | Samstarv við áhugabólkar | 62 |
| **2.3** | **KARMAR** | 64 |
| 2.3.1 | Lógir á økinum | 64 |
| 2.3.2 | Byggisamtyktir | 64 |
| 2.3.3 | Politikkir og ætlanir | 65 |
| | Umhvørvispolitikkur | 65 |
| | Orkupolitikkur | 65 |
| | Grøna ætlan | 65 |
| 2.3.4 | Frílendisætlanir | 65 |
| | Boðanes – Hoydalar | 65 |
| | Havnardalur | 65 |
| | Gøtan kring havnina | 66 |
| 2.3.5 | Varðveitingarvirði | 66 |
| **2.4** | **GRUNDARLAG** | 68 |
| 2.4.1 | Náttúran | 69 |
| | Hagin | 69 |
| | Jarðfrøðisvirði, plantu- og djóralív | 70 |
| | Áir og vøtn, strendur og viðarlundir | 70 |
| | Gróðurseting | 74 |
| | Fríøki | 74 |
| | Frílendisætlan fyri Havnardal | 76 |


FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU >

# NÁTTÚRA, VARÐVEITING OG UMHVØRVI FRAMHALD

**( 2.4 GRUNDARLAG )**


Frílendisætlan fyri Boðanes – Hoydalar . . . . . . . . . 76

Gøtuskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 78

Bygda- og varðagøtur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79

2.4.2 Varðveiting og friðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79

Søguligi mentanararvurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79

Skráseting av varðveitingarverdum

bygningum og mentanarumhvørvi . . . . . . . . . . . . . 80

Fornminni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81

Mentanarlig umhvørvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81

2.4.3 Orku- og umhvørvismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82

Umhvørvispolitikkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82

Umhvørvisátøk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 83

Orkupolitikkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 83

Tey 17 heimsmálini fyri

burðardyggari menning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 84

# 2.1 LÝSING >

JØRÐIN ER OKKARA TIL LÁNS FRÁ KOMANDI ÆTTARLIÐUM. Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU VILJA VIT GANGA Á ODDA FYRI AT VERJA VØKRU NÁTTÚRUNA OG GERA OKKARA TIL AT MINKA UM TEY ÁRIN, VIT HAVA Á OKKARA UMHVØRVI. VIT VILJA VIRÐA OG VARÐVEITA TEIR VARÐAR OG TEY MERKI, IÐ ERU SETT AV TEIMUM, SUM VÓRU UNDAN OKKUM HER.

**Evnið Náttúra, varðveiting og umhvørvi** snýr seg um tey virði, ið knýta seg til okkara umhvørvi og náttúru. Greitt verður frá, hvussu Tórshavnar kommuna arbeiðir, tá tað snýr seg um varðveiting av mentanarumhvørvi og eyðkendari byggifrøði. Tað snýr seg eisini um, hvussu kommunan arbeiðir við at verja okkara umhvørvi, at endurnýta og gagnnýta tilfeingið og alla orku sum best.

## Vit virka fyri

**Náttúra**

- at náttúran skal vera ein týðandi partur av samleikanum í kommununi, sum bæði borgari og vitjandi kunnu fáa gagn av
- at styrkja lívfrøðiligt margfeldni og náttúrudygd gjøgnum varðveiting og rakstur
- at verja og styrkja øki við hóttum plantu- og djórasløgum í kommununi
- at grøn øki og frílendi í kommununi verða varðveitt og røkt, soleiðis at tey hava eina ávísa dygd
- at tryggja skipaða atgongd til samanhangandi náttúruøki við høgligum gøtum og hagan
- at tryggja, at nýtt byggivirksemi og lendisbroytingar hava fyrilit fyri virðunum í landslagnum, og at sereyðkenni í kommununi og í landslagnum verða varðveitt
- at stuðla gróðurseting, luta út plantur og kunna um tann týdning, ið plantuvøkstur hevur fyri veðurlag og trivnað

**Varðveiting**

- at tey mentanarligu umhvørvini og siðsøguligiarvurin gerast eitt týðandi amboð fyri býarskipanina í kommununi, fyri málsviðgerðir og fyri frágreiðing um ta serligu søguna og fysisku virðini á staðnum
- at nýggjar verkætlanir og umvælingar taka støði í nærumhvørvinum og verða gjørdar eftir landslag og umhvørvi, sum tær skulu gerast ein partur av
- at varðveita tað fysiska mentanarliga umhvørvið við at skráseta allar bygningar í kommununi.

FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU >

## 2.1 LÝSING FRAMHALD

**Orka og umhvørvi**

- at stuðla undir, at Heimsmálini um burðardygga menning verða framd í verki
- at minka um dálking og ovurnýtslu í øllum virksemi
- at stimbra grønar orkuloysnir
- at allir nýbygningar og umvælingar av almennum bygningum í Tórshavnar kommunu skulu vera orkusparandi og byggja á grønu hugsjónina um varandi orkukeldur
- at fjarhitaskipanin verður knýtt upp í skipanirnar við varandi orkukeldum
- at hava neyva stýring við innkeypi, soleiðis at hugsað verður um grønar loysnir í øllum viðurskiftum
- at stuðla undir at fremja meira endurnýtslu og at varðveita munandi meira av verandi tilfeingi í ringrás





# 2.2 LEIÐ-REGLUR

NÁTTÚRA, VARÐVEITING OG UMHVØRVI FEVNIR Í STÓRAN MUN UM, HVUSSU TÓRSHAVNAR KOMMUNA SÆR OG ARBEIÐIR VIÐ AT STYRKJA, VERJA OG VARÐVEITA NÁTTÚRUNA, BYGNINGAR OG BÚSTAÐARUMHVØRVI OG EITT REINT OG GOTT UMHVØRVI. TÓRSHAVNAR KOMMUNA ARBEIÐIR VIÐ HESUM LEIÐREGLUM, TÁ UM NÁTTÚRU, VARÐVEITING OG UMHVØRVI RÆÐUR.



### 2.2.1 NÁTTÚRAN

Náttúran er eitt einastandandi tilfeingi fyri íbúgvar og ferðafólk í Tórshavnar kommunu. Tórshavnar kommuna fevnir um nógv sløg av náttúru. Fyri borgarar í høvuðsstaðnum eru tey grønu økini sera dragandi í sambandi við frítíðarvirksemi og heilsubót.

Tað er av stórum týdningi fyri Tórshavnar kommunu, at náttúran framhaldandi verður ein týðandi partur av samleikanum. Tí skal nýtt byggivirksemi taka atlit til virðini í landslagnum, og sereyðkenni í kommununi og í landslagnum verða varðveitt. Ráðleggingin í Tórshavn og bygdunum skal hava fyrilit og vera við til at varðveita náttúruna.

Harafturat skulu skapast grønir geirar millum bygdu økini í høvuðsstaðnum, ið eins og geislar ota seg oman ímóti Miðbýnum og niðan frá sjóvarmálanum.

Harumframt hevur tað týdning fyri kommununa at tryggja góða atgongd til náttúruupplivingar og samanhangandi náttúruøki við høgligum gøtum

### 2.2.2 VARÐVEITING OG FRIÐING

Hin føroyski mentanararvurin fevnir um eina frágreiðing um samfelagsmenning frá landnámstíðini til í dag. Hetta merkir stórt sæð alt, sum menniskjað hevur latið eftir seg gjøgnum tíðina. Kommunuætlanin fevnir einans um tann jarðfasta mentanararvin; tað vil siga alt tað, ið ikki kann flytast, so sum bygningar, fornminni og mentanarlig umhvørvi.

Eitt mentanarligt umhvørvi er eitt geografiskt avmarkað øki, sum lýsir týðandi partar av tí samfelagsligu menning, ið hevur verið, har menniskjað gjøgnum tíðina hevur sett sín dám á býin gjøgnum bygging og lendisnýtslu. Tað mentanarliga umhvørvið ber tískil við sær samleikan á økinum. Í Tórshavnar Býaratlasi eru størri heildir í býnum, minni øki og býarpartar skrásett, umframt at varðveitingarvirðið á øllum bygningum fram til 1958 er mett.

Í Tórshavnar kommunu eru nógv byggilistarlig og siðsøgulig virði, ið ynskiligt er at verja og varðveita.

Mentanarligu umhvørvini og tann samlaði siðsøguligiarvurin skulu vera eitt týðandi amboð fyri býarskipanina í kommununi, fyri málsviðgerðir og fyri frágreiðing um ta serligu søguna og fysisku virðini á staðnum.

### 2.2.3 ORKU- OG UMHVØRVISMÁL

Sum høvuðsstaðarkommuna liggur ein ábyrgd á Tórshavnar kommunu at ganga undan við at seta eina grøna og burðardygga dagsskrá, at stimbra og seta í verk nýggjar og burðardyggar loysnir og at taka umhvørvið við í øllum virksemi.

Í sambandi við altjóða veðurlagsráðstevnuna COP21, sum varð hildin í Paris í desember 2015, undirskrivaðu borgarstjórar í norðurlendskum høvuðsstøðum eina yvirlýsing um veðurlags-broytingar – 'Nordic Capitals' Declaration on Climate Change'. Norðurlendsku høvuðsstaðirnir eru sinnaðir at ganga á odda móti veðurlags-broytingum og taka tøk til tess at venda gongdini og tálma alheimsupphitingini.

Tórshavnar kommuna leggur tí dent á nýhugsandi býarplanlegging, at hava fyrilit fyri lívfrøðiligum margfeldi í býunum, at nýta nýhugsandi loysnir til at skerja útlátið av vakstrarhúsgassum við alsamt at minka um orkunýtsluna og leggja um til orku frá varandi orkukeldum.

'Úti í heimi virka onnur eisini fyri grønum broytingum. Eins og vit taka royndir frá øðrum til okkara, hava royndir okkara eisini týdning fyri fólk aðrastaðni og kunnu tí somuleiðis geva býum og bygdum úti í heimi íblástur.

### 2.2.4 SAMSTARV VIÐ ÁHUGABÓLKAR

Tórshavnar kommuna ynskir og eggjar til samstarv við áhugabólkar í øllum arbeiði við náttúru, varðveiting og friðing, eins væl og innan orku- og umhvørvismál. Tað kunnu til dømis verða áhugabólkar innan eitt ávíst ella fleiri av hesum økjum. Vit bjóða samstarvi við áhugabólkar og einstaklingar vælkomnum og vilja gjarna vera við til at skapa karmarnar rundanum.

Nógvar avbjóðingar eru og kunnu stinga seg upp, sum best verða loystar í samstarvi millum almennar myndugleikar og sivilsamfelagið, harundir sjálvboðin fólk og áhugabólkar.

Eitt dømi um samstarv millum Tórshavnar kommunu og sivilsamfelagið á hesum økjum kann vera, at ein áhugabólkur vendir sær til Tórshavnar kommunu við hugskoti um eitt átak, og at Tórshavnar kommuna síðani kann vera við til at skipa karmarnar fyri átakinum. Eitt annað dømi kann vera, at felags átøk verða sett í verk í samstarvi millum áhugabólkar og Tórshavnar kommunu t.d. náttúruni og umhvørvinum at frama.


Berg Hestar

# 2.3 KARMAR

### 2.3.1 LÓGIR Á ØKINUM

- **Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
- **Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum**
- **Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a.**
- **Løgtingslóg um landsvegir**
- **Løgtingslóg um umhvørvisvernd**
- **Løgtingslóg um verju av havumhvørvinum**
- **Løgtingslóg um náttúrufriðing**
- **Løgtingslóg um landsjørð**
- **Løgtingslóg um viðarlundir**

### 2.3.2 BYGGISAMTYKTIR

Við heimild í lóggávuni um býarskipanir og byggisamtyktir nýtir Tórshavnar kommuna byggisamtyktir til at stýra hvussu alt øki í kommununi skal skipast og gagnnýtast. Byggisamtyktirnar lýsa galdandi ásetingar fyri øki í mun nýtslu, bygging vm., og eru ein fortreyt fyri at ein ætlan kann fremjast á einum øki, t.d. um útstykking ella bygging kann loyvast. Tórshavnar kommuna deilir byggisamtyktirnar í tveir partar

- **Almenna byggisamtyktin, sum fevnir um alt í øki í kommununi**
- **Serstakar byggisamtyktir, sum fevna um ávís avmarkað øki.**

Byggisamtyktirnar eiga at samsvara við kommunuætlanina umframt aðrar ætlanir og politikkir í kommununi, og skulu tryggja at neyðug atlit verða tikin í mun til býarskipan.

Um ynskið er at varðveita eitt øki óbygt sum fríøki, er møguligt at leggja øki sum D1 øki í almennu byggisamtyktini.

**Allar byggisamtyktir eru tøkar á heimasíðuni www.torshavn.fo**

## 2.3.3 POLITIKKIR OG ÆTLANIR

### Umhvørvispolitikkur

Í 2016 samtykti býráðið í Tórshavnar kommuna ein umhvørvispolitikk, Grøna Leiðin.

Umhvørvispolitikkurin er eitt stýriamboð til at minka um útlát, burturkast og dálking. Eftir teimum ætlanum og politikki, sum mynda virksemið í Tórshavnar kommunu, skulu ásetingarnar í umhvørvispolitikkinum takast stigið víðari, har alt virksemið hjá kommununi skal taka støði í umhvørvinum.

Umhvørvispolitikkurin er skipaður í fýra øki.

- **Varandi orka snýr seg um útlát av vakstrarhúsgassi,**
- **Minni burturkast, meiri endurnýtsla um tilfeingisnýtslu,**
- **Okkara náttúra um dálking og grønt virksemi**
- **Kommunan tekur ábyrgd um, hvussu umhvørvisatlit gerast partur av virkseminum hjá kommununi og hennara stovnum.**

Til hvørt øki hoyra tvey ítøkilig mál, ið skulu røkkast.

### Orkupolitikkur

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at orða ein orkupolitikk, sum skal varpa ljós á orkunýtsluna í kommununi. Stórur dentur verður lagdur á at hyggja eftir, hvar møguleiki er at minka mest um orkunýtsluna og samstundis at tryggja, at nýggir bygningar, veitingar og nýggj tøkni eisini eru orkusparandi.

Somuleiðis arbeiðir kommunan við at menna eina hitaætlan, sum leggur dent á, hvussu bygningar hjá kommununi verða hitaðir, við fjarhita ella varandi orkukeldum.

### Grøn ætlan

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at gera eina grøna ætlan, sum er ein tema ætlan undir kommunuætlanini. Grøna ætlanin er ein samla ætlan fyri hvussu kommunan ynskir at varðveita og menna fríøki og onnur grøn øki í kommununi. Ætlanin skal fevna breitt og bæði snúgva um tey stóru landsløgini í kommununi og tey smærri landsløgini inn í býnum og bygdunum í kommununi.

## 2.3.4 FRÍLENDISÆTLANIR

### Boðanes – Hoydalar

Umhvørvisstovan, Tórshavnar kommuna og Søvn Landsins hava í felag gjørt eina frílendisætlan fyri økið Boðanes – Hoydalar, ið varð samtykt í 2017.
Ætlanin fevnir um økið frá Hvítasandi á Boðanesi, um niðastu Hoydalar til Santoriuvegin og gomlu sanatoriubygningarnar.
Økið er ætlað til almenna frítíðarnýtslu og náttúruupplivingar, uppihald og gongutúrar.
Frílendisætlanin greinar ikki smálutirnar, men vísir á meginlutirnar, Hoydalsánna, gøtuskipanina og ymsku lendini, hvør við sínum eyðkennum, margfeldni, náttúru og tilfeingi, og hvussu tey hvør sær kunna skipast og mennast við ítøkiligum menningar- og røktarætlanum.
Harafturat er ynski at lendisætlanir verða gjørdar fyri alt økið fram við Hoydalsá niðan til Villingadalsfoss.

### Havnardalur

Tórshavnar kommuna hevur í 2018 gjørt eina yvirskipaða frílendisætlan fyri ovara partin av Havnadali.

Frílendisætlanin er stýrandi fyri hvussu øki í Havnardali verða skipað, og at nýggj tiltøk verða

sett í verk, sum eitt nú styðja upp undir verandi viðarlund, víðka um gøtukervið og skapa atgongd til størri part av økinum.

Ynskiligt er at ætlanir verða gjørdar leypandi fyri allan dalin

### Gøtan kring havnina

Tórshavnar kommuna hevur í 2017 gjørt eina ætlan fyri eina samanhangandi gøtu kring Havnina. Gøtan verður tilsamans 35km long. 25km av ætlaðu gøtuni eru verandi gøtur, meðan 10km skulu gerast afturat áðrenn gøtan verður liðug. Kommunan ynskir áhaldandi at arbeiða við at gera strekkir av gøtuni kring Havnina.

## 2.3.5 VARÐVEITINGARVIRÐI

Í Tórshavnar kommunu eru nógvir bygningar og serstøk umhvørvi, ið hava stórt varðveitingarvirði.

### Tórshavnar Býaratlast

Tórshavnar býaratlas frá 2007 er ein skráseting av varðveitingarverdum bygningum, ið vera hildnir at vera bygdir fyri 1958, og býarumhvørvum í Havn.

Skrásetingin er gjørd sambært SAVE (Survey of Architectural Values in the Environment) mátanum – ein arbeiðsháttur, sum danska umhvørvismálaráðið hevur ment, og sum Tórshavnar kommuna hevur tillagað til føroysk viðurskiftir og føroyskan byggisið.

Atlasið er eitt amboð at skapa yvirlit og geva okkum eina fatan av teimum býarvirðum, sum býarmenningin eigur at taka hædd fyri. Tó at býaratlasið ikki hevur nakra sjálvstøðuga heimild, eru skrásetingarnar og frágreiðingarnar av økjunum eitt amboð, ið kommunan nýtir í býarskipanini í og rundan um økini, ið eru mett við serligum varðveitingarvirði fyri býin.

Varðveitingarstigini síggja soleiðis út:

- **Friðaður bygningur**
- **2 – 3 Høgt varðveitingarvirði**
- **4 – 6 Miðalhøgt varðveitingarvirði**
- **7 Lágt varðveitingarvirði**
- **8 og 9 Varð ikki brúkt í skrásetingini**

Bygningar við varðveitingarvirðunum 1-3 eru bygningar, sum í sínum byggilistarliga, mentanarsøguliga og handverksligu tilvirking eru framúrskarandi dømi av sínum slagi. Hetta kunnu eisini vera bygningar, sum við sínari staðseting eru ómissandi fyri heildina. Bygningar við varðveitingarvirði 1 eru friðaðir sambært Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum, og er tað

> TÓRSHAVNAR KOMMUNA HEVUR GJØRT EINA ÆTLAN FYRI EINA SAMANHANGANDI GØTU KRING HAVNINA. GØTAN VERÐUR TILSAMANS 35KM LONG. 25KM AV ÆTLAÐU GØTUNI ERU VERANDI GØTUR, MEÐAN 10KM SKULU GERAST AFTURAT.

Søvn Landsins, sum varða av hesi friðing. Bygningar við varðveitingarvirði 4 hava ofta somu eyðkenni sum bygningar við varðveitingarvirði 1-3. Tó kunnu umbyggingar og framhaldandi útskiftingar hava lækkað um samlaðu metingina. Bygningarnir við varðveitingarvirðunum 2-4, roynir kommunan at tryggja eftirtíðini við at eggja eigarum til at hugsa um varðveitingarvirðið í bygninginum í mun til umbygging og uppíbygging.

**Les nærri um skrásetingina í Tórshavnar býaratlasi á www.torshavn.fo.**

## Serstøku byggisamtyktirnar

Serstøku byggisamtyktirnar áseta í ein ávísan mun atlit, ið hædd skal takast fyri, tá bygt ella umvælt verður í økjum, sum serstøku byggisamtyktirnar fevna um.  Í sambandi við ger av serstøkum byggisamtyktum greinar kommunan altíð býarumhvøvið og tilhoyrandi bygningar, soleiðis at atlit verða tikin til varðveitingar verd býarumhvørvið og bygningar. Tó skal gerast vart við, at tað er ikki varðveitingarvirið sambært býaratlasinum, sum er avgerandi fyri endaligu skipanina av økinum.

Í serstøku byggisamtyktini fyri Reyn eru ásetingar, sum hava til endamáls at varðveita dámin í økinum. Møguleiki er somuleiðis at lýsa serstakar byggisamtyktir við sama endamálið fyri aðrar partar av býnum og kommununi.

## Krígsminni

Tórshavnar kommuna skrásetti í 2011 øll krígsminni í Tórshavnar býi og Nólsoy, eftir at Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum varð broytt í 2009 til somuleiðis at fevna um krígsminni frá seinna heimsbardaga. Enn mangla krígsminni í bygdunum at verða skrásett.

**Les nærri um skrásetingina á www.torshavn.fo.**

# 2.4 GRUNDARLAG

NÁTTÚRA, VARÐVEITING OG UMHVØRVI SNÝR SEG Í STÓRAN MUN UM VARÐVEITSLU OG VERND. Í NÁTTÚRUNI ERU NÓGV OG YMISK ØKI, SUM Á HVØR SÍN HÁTT HAVA TÝDNING FYRI OG ERU VIÐ TIL AT MYNDA NÁTTÚRUNA Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU, OG SUM ATLIT SKULU TAKAST TIL Í BÝARSKIPANINI.

Tað sama ger seg galdandi við varðveiting av bygningum og mentanarligum umhvørvi. Í býarskipanini skal atlit takast til býarøki og bygningar, ið eru friðaðir og hava eitt varðveitingarvirði.

Við umhvørvispolitikkinum hjá kommununi verða atlit serliga tikin til, hvussu kommunan á bestan hátt kann vera við til minka um útlátið av vakstrarhúsgassum, verja umhvørvið og vaksa um grønt virksemi.

Her greina og lýsa vit grundarlagið undir evninum Náttúra, varðveiting og umhvørvi.



## 2.4.1 NÁTTÚRAN

Landslagið uttan um Havnina er javnt og rundað. Havnardalur, Hoydalar, eiðið í Nólsoy, Kaldbaksfjørður og onnur sund og firðir eru skapað av ístungunum úr jøklunum. Høg berg, máað av brimi, finnast at kalla ikki nærindis Havnini. Reynini vestanfyri og sunnanfyri koma upp í 350 metra hædd. Tvær stórar áir, Sandá og Hoydalsá, og tvær minni, Rættará og Havnará, mynda lendið. Havnará rennur gjøgnum miðbýin, tó mest undir loki. Móti strondini og haganum er øki við veltum lendi. Sumt er privat ogn, men stórur partur er tøkur, opin og atkomuligur hjá borgarunum við góðum gøtum. Næst býnum liggur hagin, sum er eitt møguligt øki til býarmenning. Eftirspurningur er eisini eftir lendi til frítíðarendamál, vinnu og helst eisini øki til framtíðar orkuútvinning.

Náttúruøkini fevna um ein stóran part av kommununi. Her kunnu nevnast áir, strendur, vøtn og viðarlundir, ið eru vard av grein 2 í Náttúrufriðingarlógini. Tey skógfriðaðu økini í Havn eru serlig náttúruøki, sum seta sín dám á býarmyndina.

Umleið 90 prosent av øllum skógfriðaðum øki í Føroyum eru í Havn. Afturat hesum kunnu nevnast hagi og landbúnaður, sum eru fevnd av tí, sum í býarskipanarligum høpi verður nevnt ‘4. Grundumráði’ og verður nýtt til landbúnað, alment frílendi og tílíkt.

Í allari kommununi er serstøk og vøkur náttúra. Neyvar lýsingar av náttúruni í bygdnum verða gjørdar í serstøkum bygdaætlanum og grønuætlan fyri Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna hevur sett í verk tvær ætlanir, Bláa ætlanin og Grøna ætlanin, fyri at styrkja og varðveita tey yvirskipaðu eyðkennini í landslagnum og sambondini millum tey. Tey vøkru landsløgini í Tórshavnar kommunu skapa eitt fjølbroytt umhvørvi, har tey ábygdu økini eru lagaði í samanspæli millum hagalendi, viðarlundir, vøtn, strendur og áir.

### Hagin

Ein stórur partur av náttúruni í Tórshavnar kommunu er hagi. Hagin er óbygt øki uttan fyri býar- og bygdaøkini og verður í býarskipanarligum høpi og í byggisamtyktunum nevndur ‘4. Grundumráði’. Í høvuðsheitum er bert loyvt at byggja til landbúnaðarvirksemi í haganum. Onnur bygging krevur serstaka byggisamtyktarviðgerð.

Økisvíddin í Tórshavnar kommunu er 195 km2, har umleið 90 prosent eru óbygd øki. Talan er í stóran mun um landsjørð, sum einamest verður nýtt til seyðahald og á teimum veltu økjunum mjólkarframleiðslu. Harumframt verða økini í haganum nýtt til savnan av drekkivatn og velting, tyrving, orkuframleiðslu og frítíðaráhugamál.

> MEIRI FRÍTÍÐARVIRKSEMI ER Í HAGANUM Í DAG, ENN TAÐ HEVUR VERIÐ FYRR. TÍ HEVUR KOMMUNAN EINA SERLIGA ÁBYRGD AT VERJA OG SKIPA HESI ØKI, SOLEIÐIS AT TEY MONGU VIRÐINI Í NÁTTÚRUNI VERÐA VARÐVEITT, OG AT HILDIÐ VERÐUR FAST Í TÍ TÝÐULIGA MARKINUM MILLUM BÝ OG HAGA.

Fyri at fáa samanhang í býarvøksturin er ofta neyðugt at fáa til vega landsjørð. Ávísar forðingar kunnu verða, serliga har lendi er velt. Tí vil Tórshavnar kommuna fyrst og fremst nýta tað lendið til býarmenning, ið hon sjálv eigur. Samstundis vil kommunan byggja tættari í verandi býarøkjum, soleiðis at hagin verður varðveittur til landbúnað og náttúruøki.

Kommunan hevur ein serliga ábyrgd at verja og skipa hesi øki, soleiðis at tey mongu viðrini í náttúruni vera varðveitt. Hetta grundað á at frítíðarvirksemi í haganum og náttúruni økist.

Landslagið í haganum avmyndar okkara siðsøgu við einum týðuligum samanspæli gjøgnum nógv ár millum náttúrugrundarlagið og lendisnýtsluna. Farvegurin eftir torvskurð til orkuveiting hevur myndað landslagið við afturløgdum torveygum og kráum. Hagin ber merkir av seyðahaldi og seyðabiti gjøgnum øldir, og í lendinum síggjast nútímans seyðahús og leivdir av bólum. Varðarnir, ið hava hjálpt fólki fram á leið í øldir, verða varðveittir, og teir vísa á gamlar farleiðir millum bygdir. Áðrenn landsvegalógina vóru tað einans bygdagøturnar, sum smb. hagalógini frá 1937 og Gøtulógini frá 1850 vóru at meta sum lógligar farleiðir millum bygdir.

## Jarðfrøðisvirði, plantu- og djóralív

Tórshavnar kommuna er merkt av landsløgum, ið eru hamralendi. Tey heldur lágu reynini og fellini eru sermerkt sum mild landsløg. Í hamralendinum er gott grót til vinnuligt endamál. Serstakt í økinum kring Havnina, og týðiligast at síggjast í Hoydølum, eru teir nógvu stóru steinarnir, sum ísurin legði eftir seg. Samstundis eru Hoydalsá og Sandá millum størstu áirnar í landinum. Hesi eru jarðfrøðisvirði av stórum týdningi, sum týdningarmikið er at verja og fara væl um.

Umleið tríggir fjórðingar av øllum plantusløgum í landinum eru at finna í Tórshavnar kommunu, og her finnast eisini nógv plantusløg, ið eru sjáldsom. Í Havn sæst gróðurseting í gørðum aftur í farnari øld, m.a. síggjast nógv av størstu leyvtrøunum í landinum og tær størstu viðarlundirnar. Nógv sløg av útlendskum trøum, runnum og øðrum innfluttum urtagarðsvøkstri eru at síggja.

Plantuvøksturin er fjølbroyttur og sostatt væl egnaður til útferðir fyri áhugaði. Tórshavnar kommuna má tó hava eftirlit við hesum, soleiðis at vøksturin ikki misferst.

Ríkt djóralív er í Tórshavnar kommunu, og serliga eru tær tríggjar oyggjarnar í kommununi týdningarmiklar fyri lívmargfeldi. Urðin í Nólsoy hevur, umframt væl av lunda, helst heimsins størsta bøli av drunnhvíta. Bládúgvustovnurin í Nólsoy er áhugaverdur, tí lítið er blandað uppí av tomum dúgvum, tí at forboð er sett ímóti dúvuhaldi í Nólsoy.

Dagliga ferðingin hjá starum tvørtur um Nólsoyarfjørð er bæði eitt hugtakandi og forkunnugt náttúrufyribrygdi at fylgja við.

Í bø og haga er væl av heiðafugli, og í fjøruni og við áir og vøtn er væl av vaðfugli. Tann lutfalsliga nógvi trævøksturin í økinum nørir um talið av skógarfugli. Helgolandsrúsan í Nólsoy sum var virkin inntil 2015 vísti at fleiri sjáldsamir fuglar eru gestir í Nólsoy í flytitíðini.

Nevnast kann eisini, at í miðlandinum er væl til av haru. Sandagerðisvík er hvalvág, og Kaldbaksbotnur, Fjarðará, og Sandagerðisvík eru góð sjósílastøð. Um oyggjarnar eru eisini ávís støð við nógvum kópi. Hartil er Nólsoyarfjørður tiltikið fiskivatn, samstundis sum stutt er á góð skelja- og fiskimið.

Í Tórshavnar kommunu er sera ríkt djóralív, sum neyðugt er at ansa eftir, tá nýggj øki verða sett av til bygging ella vinnu, og tá vegir og leiðingar skulu leggjast. Eisini er neyðugt at tryggja áirnar móti dálking, til tess at verja og varðveita sjósílastøðini.

## Áir og vøtn, strendur og viðarlundir

Flestu vøtnini, áirnar, strendurnar og viðarlundirnar, eisini kallað §2-økini, eru vard av náttúrufriðingarlógini §2 stk. 2. Hetta merkir, at økini hava eina verndarlinju, sum er:

- **100m frá strond**
- **300m frá skógarfriðaðum viðarlundum**
- **300m frá vøtnum, ið eru størri enn 1 ha.**
- **300m frá áum, ið eru meiri enn 4m breiðar í botninum**

Hendan verndarlinjan frámerkir eitt ráðleggingarøki, sum merkir, at ráðlegging innan fyri økið skal vera við atliti at náttúru og landslagi, umframt at tað krevst góðkenning frá friðingarmyndugleikanum.

Nógv av uppruna búsetingini í Tórshavn og í nógvum av bygdunum í Tórshavnar kommunu liggur innan fyri 100 m frá strondini. Fólkið hevur á fyrsta sinni valt sær hesa staðseting orsakað av láglendinum niðri við sjógvin, atkomumøguleikunum við báti, lívd frá vindi, vernd fyri omanlopi úr fjøllunum og tilfeingi frá tí nógva rekaviði, ið kom inn á strondina og varð nýtt til brenni og bygging. Tískil hevur hendan staðsetingin verið natúrlig.

Í 1970 kom náttúrufriðingarlógin, ið m.a. skal tryggja, at plantulív, djóralív og jarðfrøðin við strondina verða vard, og tískil kann ikki byggjast her, uttan at friðingarmyndugleikin verður hoyrdur.

Fram við teimum báðum stóru áunum, ið renna gjøgnum býin, Sandá og Hoydalsá, eru tveir vakrir grønir geirar. Økini fram við hesum báðum áunum eru vard av reglunum í byggisamtyktunum og av áarverndarásetingum í náttúrufriðingarlógini.

Hoydalsá rennur oman gjøgnum Hoydalar, og skilur Hoyvík frá restini av býarøkinum. Frílendisætlanin fyri Hoydalar er stýrandi fyri hetta økið.

Sandá rennur oman gjøgnum Havnardal, sum skilur Argir frá restini av býarøkinum. Frílendisætlanin fyri Havnadal, er stýrandi fyri hetta økið.

Tvær smærri áir, Rættará og Havnará, renna eisini oman gjøgnum Havnina og eru við til at mynda býin. Havnará varð innilokað frá Viðarlundini og oman til Kongabrúnna í 1956. Ynskiligt er at áirnar vera opnaðar soleiðis at tær í framtíðini koma mynda og fríðka býin.


Friðingar
Strandarlinja 100 m
Skógfriðing
Friðaðir bygningar
Verndarlinja rundan um áir

## Gróðurseting

Í Føroyum eru trø eitt mentanar- heldur enn eitt náttúrufyribrigdi. Fyrsta royndin at gróðurseta viðarlund í Føroyum var í 1895 í Gundadali, og síðani hava fleiri viðarlundir verið gróðursettar ymsastaðni í býnum.

Miðbýurin í Havn hevur ein grønan gróðrarríkan dám við sínum gomlu ahorn- og roynitrøum. Grøni dámurin hevur breitt seg víða um býin, og sæst tað aftur í fríøkjum í býlingunum og vøkru urtagørðunum millum hús.

Veðurlagið um okkara leiðir ger, at tað er umráðandi at skapa lívd við gróðurseting kring bygningar og tilhaldsstøð. Hetta ger umstøðurnar betri til útilív og spæl, og er somuleiðis góð lívd fyri urtagarðsrøkt og vøkstir.

Tórshavnar kommuna ynskir framvegis at fremja gróðurseting, og at samstarva við eigarafeløg og áhugabólkar um at gróðurseta trø og runnar í fríøkjunum hjá kommununi. Umframt at eggja fólki at gróðurseta í teirra privatu havum, soleiðis at kommunan framhaldandi fer at hava eitt dygdargott sterkt grønt eyðkenni.

## Fríøki

Fríøkini í kommununi fevna um:

- **Øki, ið eru løgd av til fríøki sambært almennu byggisamtyktini**
- **Øki, ið eru løgd av til fríøki sambært serstøkum byggisamtyktum**
- **Øki, ið eru løgd av til fríøki sambært útstykkingarætlanum**
- **Óbygt lendi**

Í miðbýnum eru urtagarðar, grasagarðar, smá øki við trøum og runnum. Kirkjugarðar, skúla- og stovnsøki, trø og torg. Á henda hátt fær miðbýurin ein fjøltáttaðan og serligan dám. At varðveita hesi eyðkenni krevur serlig átøk, sum verða skipað saman við øðrum ætlanum í miðbýnum.

Ásetingarnar um fríøkini í almennu byggisamtyktini eru eisini galdandi fyri grasagarðar og kirkjugarðar í býnum. Av hesum er vert at nevna Viðarlundina, sum varð gjørd í 1880-árunum og er eitt væl vitjað friðsælt stað í býnum, og 200 ára gamla kirkjugarðin á Svínaryggi, ið verður nýttur sum býarpark, tí hann ikki longur verður brúktur til jarðarferðir.

Fleiri øki eru í kommununi, ið verða nýtt sum fríøki, men sum eru útløgd til byggilendi í almennu byggisamtyktini, ella sum framtíðar byggilendi. Tískil skal væntast, at hesi sum frálíður verða færri í tali.

Eitt ávíst arbeiði er gjørt við at skráseta fríøki í kommununi. Endamálið er at gera eina ætlan við fullfíggjaðum yvirliti yvir fríøkini í kommununi. Bygdirnar hava sín egna dám og sjálvstøðugar búsetingar við egnari lokalari mentan. Bygdirnar eru ikki greinaðar nóg neyvt men verður hetta gjørt til dagførdu kommunuætlan.

Í sambandi við arbeiðið at skráseta fríøkini í kommununi, verður ein greining gjørd við eyðkenni og lýsing av rakstur og viðlíkahaldi.


Viðarlundir, kirkjugarðar og fríøki
Viðarlundir
Kirkjugarðar
Fríøki

## Frílendisætlan fyri Havnardal

Tórshavnar kommuna gjørdi í 2018 uppskot til eina yvirskipaða ætlan fyri, hvussu økini í Havnardali í framtíðini kunnu mennast og skipast. Her verður greitt frá høvuðsmálunum við frílendisætlanini fyri Havnardal.

Serligur dentur verður í fyrstu atløgu lagdur á eitt avmarka øki. Ein partur av økinum, umleið 283.000 fermetrar, er skógfriðað øki við viðarlund, mosa- og mýrulendi, og ber hesin parturin av økinum brá av at vera náttúrulund. Lendið er serstakt við bleytum morenu-heyggjum, opnum vátlendisfløtum, mosa og mýrulendi. Sandá rennur mitt gjøgnum dalin og góðar gøtur eru í hesum økinum. Økið verður mett at hava nógvar dygdir og góðar menningarmøguleikar sum frílendisøki til heilsubót.

Nógvar dygdir eru í økinum í dag, og mælt verður tí til, at hóvliga verður farið fram, tá tiltøk verða framd. Økið kring verandi viðarlund, leigutraðirnar og rossagøturnar verður nógv nýtt í dag til ymisk endamál, serliga av traðar- og rossafólki, men eisini av dagstovnum og skúlum, ið nýta økini fram við ánni til spæl, ítriv og uppihald. Seinnu árini eru fólk farin at tjalda í økinum, og súkklukappingar verða hildnar á eyrgøtunum.

Frílendisætlanaruppskotið leggur upp til, at økini í Havnardali verða skipaði, og at nýggj tiltøk verða sett í verk, sum eitt nú styðja upp undir verandi viðarlund, sum víðka um gøtukervið og skapa atgongd til størri part av økinum. Samstundis verður skotið upp at gera fleiri benkur fram við gøtunum og at lætta um atgongd tvørtur um ánna á ávísum støðum við at gera smáar timburbrýr. Eisini verður skotið upp at gera útsýnisstøð frá hægstu heyggjunum, og at smá skýli verða gjørd, ið kunnu nýtast til uppihald, lívd og til at gista í. Eisini verður mælt til at gera skipaði vesi- og vatnviðurskifti í økinum.

Eisini verða leigutraðirnar mettar at hava eitt ávíst virði og møguleikar fyri at vísa børnum og øðrum áhugaðum vanligt djórahald. Umhugsast kann, um partar av traðunum kunnu leggjast undir skipaði viðurskifti, har dagstovnar og skúlar kunnu koma at vitja í sambandi við lembing, fletting, gásaroyting og annað.

Endamálið er, at tað í størri mun verður stuðlað undir ymisku nýtsluna av økinum, so sum tjalding, útferðir av ymsum slag, gongutúrar, sílaveiðu og annað, við at gera hesi smáu tiltøk, ið gera økið meira atkomuligt og nýtiligt.

Øll tiltøkini skulu tó fremjast soleiðis, at atlit verður tikið til lendið og tær dygdir, sum eru har í dag.

## Frílendisætlan fyri Boðanes – Hoydalar

Á vári í 2017 varð frílendisætlanin fyri økið Boðanes – Hoydalar liðug og almannakunngjørd. Ætlanin hevur verið leingi ávegis. Upprunaliga varð arbeiðið sett í gongd í juni 2006, tá Føroya Landsstýri gjørdi av at leggja hetta stóra økið í niðastu Hoydølum, sum Føroya Landsstýri eigur, til frílendi til gagns fyri almenningin.

Eftir at Umhvørvisstovan varð skipað, varð tað litið stovninum upp í hendi at varða av lendinum, og á heysti í 2009 varð ein arbeiðsbólkur settur at gera uppskot til eina dispositiónsætlan fyri økið. Í 2017 var ætlanin liðug. Her verður greitt frá høvuðsmálunum í frílendisætlanini fyri Boðanes - Hoydalar.

Við grundarlagi í útgreiningum av teimum ymsu viðurskiftunum í økinum við atliti at lendinum, náttúru, siðsøgu og tekniskum virðum og bindingum v.m. er gjørd ein brúksætlan, har dentur verður lagdur á møguleikarnar fyri náttúru- og frílendisupplivingum í økinum.


Gøtuskipan
Gøtuskipanir
Gøtan kring havnina
Verandi gøtur
Ætlaðar gøtur
• Viðmerkjast skal at allar gøtur eru ikki á hesum kortinum, víst verður til heimasíðuna www.torshavn.fo.

Frílendisætlanin leggur upp til, at gøtuskipanin í Hoydølum og yvir á Boðanes verður bygd út við fleiri samanhangandi gøtum. Samstundis verður lagt upp til, at økið verður skipað við ymiskum virknisplássum fram við gøtunum, umframt at økið undir Óðinshædd verður sett av til fríøki at lufta húsdjórum í.

Eisini mælir ætlanin til, at farið verður undir gróðurseting í Hoydølum fyri at skapa betri lívd og skjól eins og verju móti høvuðsvegunum.

Somuleiðis er eitt av málunum at skapa framsýningarmøguleikar fyri ymiskum gróðri, eisini føroyskum upprunavøkstri. Mælt verður til, at skipað verður eitt sonevnt “in situ” savn, at verja og vísa uppruna føroyskan viðarvøkstur, umframt at skipa ein villblómugarð at sýna fram ymiskan villan føroyskan gróður.

Frílendisætlanin vísir á eina brúksskipan, har tey yvirskipaðu atlitini eru umrødd og lýst, soleiðis at hesi kunnu verða tikin við sum partur av teimum ítøkiligu menningar- og røktarætlanunum fyri økið.

Í 2018 fóru Tórshavnar kommuna og Umhvørvisstovan undir at gera tær fyrstu gøturnar sambært ætlanini. Aðrir partar av verkætlanini bíða eftir, at formligu viðurskiftini kring verkætlanina falla endaliga upp á pláss.

## Gøtuskipan

Gøturnar eru týðandi partur av uttandura frítíðarvirkseminum í kommununi. Verandi gøtur eru gjørdar yvir eini 20 ár, og arbeitt verður við at víðka munandi um hesar. Kommunan arbeiðir við at gera eina samanhangandi og lætt atkomuliga gøtuskipan í og kring Havnina, soleiðis at tað skal gerast dámligt og áhugavert at ferðast hjá fólki til gongu og á súkklu.

Nógvar gøtur eru í Havn, soleiðis at borgarar kunnu ferðast trygt millum býlingar og út í lendið kring býin. Hetta er serliga galdandi í nýggju býarpørtunum, har rúm hevur verið fyri at leggja gøturnar til rættis. Í eldri býarpørtum eru gøturnar ikki eins samanhangandi. Tó ber til at ferðast trygt í hesum økjum eftir gøtum og vegum við lítlari ferðslu.

Í Tórshavn verður arbeitt við verkætlanini 'Gøtan kring havnina', hvørs endamál er at binda gøturnar saman í ein ring kring Havnina. Gøturnar eru til fleirnýtisendamál, so sum gongutúrar, renning, rossagøta, súkkling og so framvegis, tó ikki til motordrivnar súkklur og akfør.

Á kortinum síggjast útbygdar gøtuskipanir í Havn, umframt at stiplaða linjan vísir ætlaðu leiðina á verkætlanini 'Gøtan kring havnina'. Hetta er áhaldandi arbeiði. Nakrar av hesum gøtunum, sum tilsamans skulu verða 'Gøtan kring havnina' eru gjørdar, meðan aðrar gøtur eru eftir at fremja í verki.

Upplivingin av gøtunum verður støðugt víðkað við at gera eina røð av virknis- og vitjanarstøðum á rutuni. Hetta fyri at leggja dent á teir fjøltáttaðu møguleikarnar, sum eru í kommununi fyri fólk í øllum aldri, sum bæði geva møguleika fyri rørslu og frálíkari náttúruuppliving.

Teir grønu frílendiskílarnir eru óbygd øki, skipað við gøtum, og eru til uppihald og frítíðarítriv. Ansast skal væl eftir teimum virðum, sum har eru, tá nýggj býarbygging verður skipað. Tá gøtuskipanin verður útbygd, skal atlit takast til markviðurskifti, staðlýsing og planting.

Kommunan arbeiðir støðugt við at økja um útboðið av gøtum. Gøturnar skulu merkjast, og kommunan eigur at kunna borgarar, tilflytarar og ferðafólk um gøturnar við skelting og faldarum. Kommunan arbeiðir eisini við at flokka ymsu gøtunar eftir nýtslu.

## Bygda- og varðagøtur

Í Tórshavnar kommunu, kunnu fólk ganga eftir bygda- og varðagøtum, tó við ávísum treytum. Nógv fólk, bæði føroyingar og ferðafólk, nýta høvið at síggja náttúruna á henda hátt.

Tað er ábyrgdin hjá kommununum í landinum at taka sær av bygda- og varðagøtum, harundir at merkja gøturnar upp og tryggja, at trygdin er í hásæti.
Kommunan arbeiðir regluliga við at viðlíkahalda gøturnar, eisini í samstarvi við viðkomandi partar, so sum lendiseigararnar og arðar partar. Mælt verður til støðugt at taka atlit til øktu ferðsluna og stóra trýstið á ymsu gøturnar.

## 2.4.2 VARÐVEITING OG FRIÐING

Varðveiting og friðing snýr seg um, hvussu serligar dygdir og varðveitingarvirði knýta seg til náttúruna, landslagið, virðismiklar bygningar og til mentanarlig umhvørvi.

Tórshavnar kommuna ynskir, at byggimentanin førir við sær, at Tórshavn er eitt dragandi stað at búgva, arbeiða, vitja og hava fyritøku. Teir søguligu bygningar og býarumhvørvi skulu stuðla undir eitt dragandi mentanar- og handilslív, draga borgarar at sær og virka til frama fyri ferðavinnuna.

Gjøgnum býarskipan og fyrisiting hevur Tórshavnar kommuna serligt fyrilit fyri varðveiting av virðismiklum bygningum og býarumhvørvi, sum t.d. partar av eini bygd ella einum býarøki – sum virkar til at styrkja samleikan í hesum øki.

Tórshavnar kommuna ynskir somuleiðis at eggja privatum eigarum til at taka størri byggilistarlig atlit í samband við tillaging av nýggjari bygging, niðurtøku og umbygging.

## Søguligi mentanararvurin

Kommunuætlanin fevnir um jarðfasta søguliga mentanararvin; hetta vil siga alt tað, ið ikki kann flytast, so sum bygningar, fornminni og mentanarlig umhvørvi.

Eitt mentanarligt umhvørvi er eitt geografiskt avmarkað øki, sum lýsir týðandi partar av tí samfelagsligu menningini, ið hevur verið, har menniskjað gjøgnum tíðina hevur sett sín dám á býin gjøgnum bygging og lendisnýtslu. Tað mentanarliga umhvørvið ber tískil við sær samleikan á økinum. Í Tórshavnar Býaratlasi eru bæði størri heildir í býnum, minni øki og býarpartar skrásett, umframt at varðveitingarvirði á øllum bygningum, ið vera hildnir at vera bygdir fyri 1958 er mett.

Tórshavnar kommuna hevur nógv byggilistarlig og siðsøgulig virði, ið neyðugt er at verja og varðveita. Kommunan ynskir at varðveita og verja tey berandi virðini innan byggilist, mentanarlig umhvørvi og landsløg. Hesi virðini skulu somuleiðis mennast og endurnýggjast, soleiðis at tey framhaldandi styðja upp undir samleikan og lívið, ið er á staðnum.

Tórshavnar kommuna vil nýta tey mentanarligu umhvørvini og tann samlaða søguliga mentanararvin sum týðandi amboð fyri býarskipanina í kommununi, fyri málsviðgerð og frágreiðing um ta serligu søguna og fysisku virðini á staðnum.

## Skráseting av varðveitingar-verdum bygningum og mentanarumhvørvi

Tað er ein landsáhugi at eggja kommunum til at útnevna bygningar, ið hava eitt mett varðveitingarvirði, til tess at bera fram mentanarsøguna í býnum. Tað er landið, ið hevur ábyrgdina av teimum friðaðu bygningum, og tað er Tjóðsavnið, sum skrásetur og tekur endaligu avgerðina um friðing.

Løgtingslógin um býarskipanir og byggisamtyktir veitir tó kommunalum myndugleikum heimild til viðtøkur um nýtslu og vernd av økjum, t.d. við atliti at mentanarminnum. Kommunuætlanin kann tískil hava eitt yvirlit yvir bygningar og mentanarlig umhvørvi, ið eru verd at varðveita. Tórshavnar kommuna ynskir, at bygningar, ið eru serlig dømir um ymisk byggilistarlig tíðarskeið, og sum verða mettir at vera ein týðandi partur av býarmyndini, landslagnum ella av heildini, verða skrásettir.

Bygningar mettir við einum varðveitingarvirði eru bygningar, sum hava eina serliga byggilistarliga góðsku, eitt siðsøguligt virði og týdning fyri býarøkið.

Tórshavnar kommuna hevur nýtt skrásetingarnar frá Tórshavnar Býaratlasi av slíkum bygningum til tess at tryggja byggiarvin í kommununi. Skrásetingar frá Tórshavnar Býaratlasi verða eisini nýttar sum íblástur at lýsa bygningar og mentanarlig umhvørvi.

Hesar skrásetingar ynskir Tórshavnar kommuna at hava við sum ein týðandi part av framtíðar býarmenningini og bera teir bygningar, ið hava eitt mett varðveitingarvirði, fram á ein áhugaverdan og gjøgnumskygdan hátt.

Atlasið er eitt amboð at skapa yvirlit og geva okkum eina fatan av teimum býarvirðum, sum býarmenningin eigur at taka hædd fyri. Tó at býaratlasið ikki hevur nakra sjálvstøðuga heimild, eru skrásetingarnar og frágreiðingarnar av økjunum eitt amboð, ið kommunan nýtir í býarskipanini í og rundan um økini, ið eru mett við serligum varðveitingarvirði fyri býin.

Samlað eru skrásett 20 mentanarlig umhvørvi og umleið 1800 bygningar, ið eru bygdir áðrenn 1958. Av bygningum í Tórshavnar kommunu eru eitt sindur undir 50 bygningar friðaðir, umleið 200 mettir við høgum varðveitingarvirði, okkurt um 1100 við miðalhøgum varðveitingarvirði og eitt sindur undir 50 bygningar eru mettir við lágum varðveitingarvirði.

Bygningar, ið eru bygdir eftir 1958, eru ikki við í omanfyri nevndu uppgerð, og tí verður samanlagda talið minni enn 1800 bygningar.

Skrásetingin er gjørd sambært SAVE (Survey of Architectural Values in the Environment) mátanum – ein arbeiðsháttur, sum danska umhvørvismálaráðið hevur ment, og sum Tórshavnar kommuna hevur tillagað til føroysk viðurskiftir og føroyskan byggisið. Bygningar við varðveitingarvirðunum 1-3 eru bygningar, sum í sínum byggilistarliga, mentanarsøguliga og handverksligu tilvirking eru framúrskarandi dømi av sínum slagi. Hetta kunnu eisini vera bygningar, sum við sínari staðseting eru ómissandi fyri heildina.

Bygningar við varðveitingarvirði 1 eru friðaðir sambært Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum, og er tað Søvn Landsins, sum varða av hesi friðing. Bygningar við varðveitingarvirði 4 hava ofta somu eyðkenni sum bygningar við varðveitingarvirði 1-3. Tó kunnu umbyggingar og framhaldandi útskiftingar hava lækkað um samlaðu metingina. Bygningarnir við varðveitingarvirðunum 2-4, roynir kommunan at tryggja eftirtíðini við at eggja eigarum til at hugsa um varðveitingarvirðið í bygninginum í mun til umbygging og uppíbygging.

**Varðveitingarstigini síggja soleiðis út:**

- **Friðaður bygningur**
- **2 – 3 Høgt varðveitingarvirði**
- **4 – 6 Miðalhøgt varðveitingarvirði**
- **7 Lágt varðveitingarvirði**
- **8 og 9 Varð ikki brúkt í skrásetingini**

Í Tórshavnar kommunu eru 25 friðað hús. Tey friðaðu húsini umboða ta mest eyðkendu byggilistina fyri teirra tíðarskeið og hava týdning fyri okkara tjóðarsøgu.

> Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU 25 FRIÐAÐ HÚS. TEY FRIÐAÐU HÚSINI UMBOÐA TA MEST EYÐKENDU BYGGILISTINA FYRI TEIRRA TÍÐARSKEIÐ OG HAVA TÝDNING FYRI OKKARA TJÓÐARSØGU.

Friðaðu bygningarnir eru tryggjaðir gjøgnum eina tinglýsing, og eru tað friðingarnevndirnar, sum kunnu taka mál um friðing upp eftir ynski ella áheitan frá kommunum ella einstaklingum. Yvirfriðingarnevndin staðfestir ella broytir avgerðir tiknar av lokalu friðingarnevndunum og tekur støðu til umsóknir um undantøk frá lógini og mál um náttúrufriðing. Tjóðsavnið hevur ábyrgdina av at skráseta, kanna og lýsa jarðføst fornminni sum bústaðarleivdir, gravstaðir, húsatoftir og annað tílíkt, sum er friðað við løgtingslóg, harundir eisini bygningar og gripir.

Á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum er ein dátugrunnur við kunning um friðaðar bygningar í Føroyum. Undir hesum dátugrunni er kunning um hvønn einstakan bygning og um tey mál og kanningar, ið knýta seg til bygningin.

Tað eru umleið 100 friðaðir bygningar í Føroyum. Hesir bygningar hava eina serliga byggilist ella siðsøguligt virði fyri alla tjóðina. Tá ein bygningur er friðaður, merkir hetta m.a., at eigarin skal halda bygningin í virðiligum standi, og at bæði innan- og uttandura umvælingar, ið ikki metast at vera vanligt viðlíkahald, skulu góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

## Fornminni

Tórshavnar kommuna hevur tey flestu og nøkur av týdningarmestu fornminnunum í landinum. Av hesum eru fornminnini í Kirkjubø, í Tinganesi og Skansin tey mest kendu. Niðri á Bakka á Velbastað er eisini fornfrøðiliga sera áhugaverdur útgrevstur, sum vísir prógv um búseting í miðøldini. Serliga hevur 'Gátuføri ringurin' vakt stóran ans her og uttanlands. Í Nólsoy og Koltri sæst eisini farvegur eftir forna kornvelting. Havnin hevur nógv týðandi fornminni sum miðdepil fyri fyrisiting og handil í føroyska samfelagnum gjøgnum tíðina.

Tórshavnar kommuna ynskir at stuðla verju og varðveitslu av fornminnum, sum eru týðandi partar av føroyska mentanararvinum og Føroya søgu. Tjóðsavnið hevur ábyrgdina av at skráseta, kanna og lýsa jarðføst fornminni sum bústaðarleivdir, gravstaðir, húsatoftir og annað tílíkt, sum er friðað við løgtingslóg, harundir eisini bygningar og gripir.

## Mentanarlig umhvørvi

Í Tórshavnar Býaratlasi eru 20 mentanarlig umhvørvi við varðveitingarvirði skrásett. Hesi øki umboða hvørt sær menningarsøgu Føroya gjøgnum tíðina.

Innan býarskipan og málsviðgerð skal atlit takast til tey berandi varðveitingarvirðini og sereyðkennini í teimum mentanarligu umhvørvunum. Kommunan vil bera tey mentanarligu umhvørvini fram á ein áhugaverdan hátt gjøgnum býarskipanina.

Mentanarligu umhvørvini skulu framhaldandi vera sjónlig dømir um siðsøguligu menningina í kommununi. Somuleiðis skulu týðandi útsýnis- og miðingarlinjur tryggjast í sambandi við bygging rundanum.

Mentanarligu umhvørvini og søguligi mentanararvurin eru týðandi amboð fyri býarskipanina í kommununi, fyri málsviðgerð og sum frágreiðing um serligu søguna og fysisku virðini á staðnum.

## 2.4.3 ORKU- OG UMHVØRVISMÁL

Umhvørvið og orkunýtsla hava seinnu árini fingið størri týdning og áhuga hjá einstaka borgaranum og í samfelagnum sum heild. Yvirhøvur er semja um, at skulu núlivandi og komandi ættarlið hava somu møguleikar at skapa eitt trygt, gott og mennandi lív, skulu tøk takast fyri at verja umhvørvið og minka orkunýtsluna.

Tí samtykti Tórshavnar kommuna í 2016 ein umhvørvispolitikk – Grøna Leiðin. Umhvørvispolitikkurin er eitt stýriamboð til at fyribyrgja útláti, burturkasti og dálking, og setur út í kortið, hvussu vit í øllum virksemi taka atlit til umhvørvið.

Sum ein avleiðing av umhvørvispolitikkinum er kommunan somuleiðis í ferð við at orða ein ítøkiligan orkupolitikk, sum setur út í kortið, hvussu Tórshavnar kommuna skal skerja $CO_2$-útlátið við áhaldandi at seta átøk í verk til at minka orkunýtsluna, og somuleiðis hvussu orkunýtslan verður løgd um til varandi orkukeldur.

### Umhvørvispolitikkur

Grundleggjandi fyri umhvørvispolitikkin er visjónin um, at komandi ættarlið skulu hava somu møguleikar at gagnnýta náttúruna sum undanfarin ættarlið. Tórshavnar kommuna skal slóða fyri einum grønum og burðardyggum samfelagi.

Tórshavnar kommuna arbeiðir áhaldandi við verkætlanum, sum eru umhvørvinum at frama, og virkar fyri at ganga undan við at verja umhvørvið, minka orkunýtsluna, nýta meira varandi orku, minka um burturkast, endurnýta meira og í størri mun at varðveita tilfar og nýtiligar lutir í ringrás, heldur enn at tveita burtur.

Grøna Leiðin hjá Tórshavnar kommunu er eitt yvirskipað strategiskjal og hevur beinleiðis ávirkan á allar aðrar politikkir og ætlanir, sum mynda virksemið í Tórshavnar kommunu. Umhvørvispolitikkurin hevur sostatt týdning fyri kommunuætlanina, grønu ætlanina, ferðslutrygdarætlanina, parkeringspolitikkin, innkeypspolitikkin, orkupolitikkin og hitaætlanina, fyri bert at nevna nøkur. Politikkirnir hava eisini beinleiðis ávirkan á arbeiðið hjá býráðnum og fyrisitingini, har atlit skulu takast til umhvørvispolitikkin og galdandi ætlanir og ásetingar í málsviðgerðini. Ætlanin er, at grøna visjónin skal seyra út í alt samfelagið.

Umhvørvispolitikkurin er skipaður í fýra øki, og til hvørt øki hoyra tvey mál:

- Varandi orka snýr seg um útlát av vakstrarhúsgassi
  **Mál 1:** Allur hiti og streymur kemur frá varandi orku í 2030
  **Mál 2:** Tvífalt so nógv ganga ella súkkla í 2020 í mun til 2016

- Minni burturkast, meiri endurnýtsla snýr seg um tilfeingisnýtslu
  **Mál 3:** Burturkastið skal minka, og endurnýtslan av burturkasti skal vaksa við 30% í 2030 samanborið við 2016
  **Mál 4:** Varðveita tilfeingið í ringrás

- Okkara náttúra snýr seg um dálking og grønt virksemi
  **Mál 5:** Umhvørvið verður ikki dálkað
  **Mál 6:** Meiri grønt virksemi

- Kommunan tekur ábyrgd snýr seg um, hvussu umhvørvisatlit gerast partur av virkseminum hjá kommununi og hennara stovnum.
  **Mál 7:** Útlátið av vakstrarhúsgassi skal vera 50% minni í 2025 samanborið við 2016
  **Mál 8:** Hóvlig og burðardygg nýtsla

Býráðið, politisku nevndirnar og umsitingin í Tórshavnar kommunu hava ábyrgd av at útinna umhvørvispolitikkin. Uppgávan hjá kommununi er at skapa røttu karmarnar, so at fólk í Tórshavnar kommunu hava møguleika at liva og virka burðardygt.

> GRØNA LEIÐIN HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ER EITT YVIRSKIPAÐ STRATEGISKJAL OG HEVUR BEINLEIÐIS ÁVIRKAN Á ALLAR AÐRAR POLITIKKIR OG ÆTLANIR, SUM MYNDA VIRKSEMIÐ Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU

## Umhvørvisátøk

Tórshavnar kommuna arbeiðir áhaldandi við umhvørvisvinarligum átøkum og grønum loysnum. Dentur verður lagdur á at gera átøk á teimum økjum, har møguleikin fyri orkusparing er størstur. Millum hesi kunnu nevnast eitt nú:

- Gjaldfría bussleiðin, hvørs endamál er at fáa fleiri fólk at nýta bussarnar og soleiðis minka bilferðsluna
- At betra umstøðurnar hjá bleytu ferðsluni, t.e. at gera gøtur, gongubreytir og súkklubreytir, so tað er trygt og høgligt hjá fólki at flyta seg á annan hátt enn í bili
- At skifta gøtuljós út við orkusparandi LED-perur og harvið minka munandi um orkunýtsluna til upplýsing av býnum og bygdunum
- At kommunalir bygningar alsamt leggja um til varandi orkukeldur

Harumframt skipar Tórshavnar kommuna á hvørjum ári fyri ymiskum átøkum og tiltøkum við tí endamáli at upplýsa og broyta hugburð. Her kunnu nevnast Umhvørvisvikan, Earth Hour, Ruddingardagar o.fl. Eisini hevur Tórshavnar kommuna í mong ár veitt stuðul til umhvørvisvinarligar verkætlanir.

## Orkupolitikkur

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at orða ein orkupolitikk. Orkupolitikkurin er ein ítøkiligur politikkur og setur karmarnar fyri, hvussu kommunan skal fara fram á orkuøkinum, hvørji átøk og verkætlanir skulu fremjast fyri at røkka størstu orkusparingunum og harvið at røkka málunum viðvíkjandi orku og $CO_2$-útláti, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum.

Somuleiðis arbeiðir kommunan við at menna eina hitaætlan, sum leggur dent á, hvussu bygningar hjá kommununi verða hitaðir við fjarhita ella varandi orkukeldum.

## Tey 17 heimsmálini fyri burðardyggari menning

Tórshavnar kommuna hevur í 2019 viðgjørt og samtykt at styrkja arbeiðið hjá kommununi við heimsmálunum fyri burðardyggari menning.

Aðalfundarsamtykt Sameindu Tjóða "Transforming the world: the 2030 Agenda for Sustainable Development" frá 2015 heitir á heimsins tjóðir um at virka fyri at fremja 17 burðardygg menningarmál. Málini eru sett fyri tíðarskeiðið 2015 til 2030 og skulu seta eina greiða kós fram ímóti burðardyggari menning til gagns fyri bæði menniskju og náttúru.

Endamálið er, at hvørt landið tekur útgangsstøði í egnum veruleikum og við egnum raðfestingum virkar fyri at fremja málini.

Føroya Landsstýri hevur sett sær fyri at gera eina støðulýsing sum grundarlag undir eini komandi ætlan fyri at røkka heimsmálunum í landsins politikki.

Tórshavnar Býráð hevur í 2019 eisini samtykt at vera virkin í ætlanunum um at røkka heimsmálunum og fer tí at gera eina ætlan fyri, hvussu kommunan miðvíst arbeiðir við teimum heimsmálum, sum eru viðkomandi fyri Tórshavnar kommunu.

**Tey 17 heimsmálini fyri burðardyggari menning**

**1. Mál.** Gera enda á fátækadømi í øllum tess líki allastaðni

**2. Mál.** Gera enda á hungri, tryggja, at matur er tøkur, bøta um føðsludygd og virka fyri burðardyggum landbúnaði

**3. Mál.** Tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri

**4. Mál.** Tryggja øllum inkluderandi og rættvísa dygdargóða útbúgving og virka fyri lívlongum læringarmøguleikum fyri øll

**5. Mál.** Fáa í lag javnstøðu millum kynini og máttmenna allar kvinnur og gentur

**6. Mál.** Tryggja, at vatn og reinførisviðurskifti eru í lagi og umsitin á burðardyggan hátt

**7. Mál.** Tryggja, at øll fáa álítandi, burðardygga og tíðarhóskandi orku, sum øll hava ráð til

**8. Mál.** At virka fyri varandi, inkluderandi og burðardyggum búskaparvøkstri, fullum og úrtøkugóðum virksemi og sømiligum arbeiði til øll

**9. Mál.** Byggja sterk undirstøðukervi, virka fyri inkluderandi og burðardyggari ídnaðarmenning og eggja til nýhugsan

**10. Mál.** Minka ójavnað í londum og ímillum lond

**11. Mál.** Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

**12. Mál.** Tryggja burðardygg nýtslu- og framleiðslumynstur

**13. Mál.** Sum skjótast seta í verk bráðneyðug átøk at berjast ímóti veðurlagsbroytingum og avleiðingum av teimum.

**14. Mál.** Varðveita og á burðardyggan hátt nýta høvini, allan sjógv og sjófeingi til burðardygga menning.

**15. Mál.** Verja, endurbøta og virka fyri burðardyggari nýtslu av jarðvistskipanum, á burðardyggan hátt røkja skóg, berjast ímóti oyðimarkarmyndan, steðga og venda landtýningum og lívmargfeldismissi.

**16. Mál.** Virka fyri friðsomum og inkluderandi samfeløgum fyri burðardyggari menning. Útvega øllum atgongd til rættartrygd og byggja munagóðar, ábyrgar og inkluderandi stovnar á øllum stigum

**17. Mál.** Styrkja amboðini at verkseta og stimbra Heimsfevnandi partalagið fyri burðardyggari menning


2 Nordastahorn
HZ 386
STEINATÚN



# VINNA

# 3.0

# VINNA


| | | |
|---|---|---|
| **3.1** | **LÝSING** | 89 |
| **3.2** | **LEIÐREGLUR** | 92 |
| 3.2.1 | Krøv til vinnubygging | 93 |
| 3.2.2 | Bygnaður í kommununi | 93 |
| **3.3** | **KARMAR** | 94 |
| 3.3.1 | Lógir á økinum | 94 |
| 3.3.2 | Byggisamtyktir | 94 |
| | Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu | 94 |
| 3.3.4 | Politikkir og ætlanir | 94 |
| | Parkeringspolitikkur | 94 |
| | Tórshavn sum ferðavinnubýur | 95 |
| | Menningarætlan fyri ferðavinnuna í Kirkjubø | 95 |
| | Ferðavinna fyri Nólsoy | 95 |
| **3.4** | **GRUNDARLAG** | 96 |
| 3.4.1 | Vinnudeplar | 97 |
| 3.4.2 | Handilsvinna og veitingarstøð | 97 |
| 3.4.3 | Vinnuvirki, verkstaðir og tænastuvirksemi | 99 |
| 3.4.4 | Havnir og sjóvinna | 99 |
| | Tórshavnar havn | 99 |
| | Útbygging av Tórshavnar havn | 100 |
| | Bátapláss | 100 |
| | Kollafjarðar Havn | 101 |
| | Gamlarætt | 101 |
| | Argir | 101 |
| | Sund | 101 |
| | Nólsoy | 101 |
| | Hestur | 101 |
| | Koltur | 101 |
| 3.4.5 | Landbúnaður | 103 |
| | Vetrarhegn | 103 |
| 3.4.6 | Ferðavinna | 103 |
| 3.4.7 | Íverksetan og nýskapan | 104 |
| 3.4.8 | Framtíðar tørvur á vinnuøki | 105 |
| 3.4.9 | Staðseting av vinnuøkjum | 106 |



# 3.1 LÝSING

FORTREYTIN FYRI FJØLBROYTTUM VINNULÍVI ERU GÓÐIR KARMAR OG AT VINNUREKANDI KUNNU MENNA OG VAKSA UM SÍTT VIRKSEMI. TÓRSHAVNAR KOMMUNA VIL TRYGGJA HESAR KARMAR, GEVA RÚMD FYRI SKAPANDI VINNULÍVI OG STIMBRA UNDIR OG DRAGA FLEIRI SKAPANDI KREFTIR TIL LANDIÐ

**Evnið Vinna** snýr seg um planlegging av vinnuligum virksemi í Tórshavnar kommunu. Greitt verður frá, hvussu Tórshavnar kommuna arbeiðir við vinnu, hvussu kommunan stuðlar undir at hava livandi og fjølbroytta vinnu í kommununi og hvørjum leiðreglum virkað verður eftir. Harumframt verður víst á tørv og staðsetingar av vinnuøki í Tórshavnar kommunu.

## Vit virka fyri

- at kommunan skal vera ein vakstrarmiðdepil í Føroyum og í Norðuratlantshavi
- at ganga á odda at skapa vinnulívinum bestu karmarnar at menna verandi vinnu og byggja upp nýtt virksemi
- at kommunan altíð hevur tøk vinnuøki at bjóða áhugaðum
- at stuðla undir, at nýggjar, fjølbroyttar og skapandi vinnur kunnu mennast og fjølgast
- at vera viðspælari og stuðla undir nýtt vinnulív, eitt nú við skjótari og hollari málsviðgerð
- at skapa góð atkomuviðurskifti til handils- og vinnulív í allari kommununi


BAKKAFROST
MAERSK


samskip

# 3.2 LEIÐ-REGLUR

VINNULÍVIÐ ER DRÍVMEGIN Í OKKARA SAMFELAG. TÆTT SAMSTARV MILLUM VINNU OG KOMMUNU ER EIN FORTREYT FYRI VØKSTRI OG FRAMBURÐI. TÓRSHAVNAR KOMMUNA YNSKIR ÁHALDANDI AT BETRA VINNULIGU KARMARNAR, AT MENNA NÝGGJAR VINNUR OG GEVA VERANDI VINNUM GÓÐ VAKSTRARKOR. TÓRSHAVNAR KOMMUNA YNSKIR, AT HØVUÐSSTAÐURIN ER FREMSTUR Á HESUM ØKI.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA ARBEIÐIR VIÐ HESUM LEIÐREGLUM, TÁ VINNA Í KOMMUNUNI VERÐUR SKIPAÐ.



## 3.2.1 KRØV TIL VINNUBYGGING

Ymisk krøv verða sett til einstøku sløgini av bygging, alt eftir hvat slag av bygging talan er um og eftir staðsetingini í býarøkinum.

Deplavirksemi, handlar við gerandisvørum, skúlar, stovnar og trivnaðarvirksemi verða eftir førimuni staðsett í bústaðardeplunum.

Handlar við úrvalsvørum verða í høvuðsheitum staðsettir í miðdeplinum, tó er økið á Hálsi áhugavert til stórar eindir.

Skrivstovur og onnur léttari vinna kunnu verða staðsett saman við bústøðum fyri at fáa fjølbroytni í býarøkini, innan fyri 1000 m radius frá miðdeplinum í býarøkinum. Hesi økini hava ikki so strong ljóðkrøv sum bústaðarøki.

Ídnaðarvinna verður vegna umhvørvisárin staðsett burtur frá bústaðarøkjum, í teimum ídnaðarøkjum, ið eru í dag, og í havnarøkjum, har atkomumøguleikarnir eru góðir og tung ferðsla í høvuðsheitum verður leidd uttan um bústaðarøkini.

## 3.2.2 BYGNAÐUR Í KOMMUNUNI

Ein ávís miðsavnan er farin fram ymsastaðni í býnum. Tórshavnar Kommuna ynskir at varðveita og flokka hesa miðsavnan í deplar og arbeiða fyri víðari býarvøkstri í hesum økjum. Tað verður gjørt við útbygging av virksemi so sum handlum við gerandisvørum, stovnum og skúlum, mentanarligum virksemi umframt við býlingshúsum og fleiri bústøðum í økjunum.

**Deplarnir eru skipaðir á hendan hátt:**
**Miðdepilin:** Miðbýurin/Eysturbýurin
**Bústaðardeplarnir:** Vesturbýurin, Argir og Hoyvík/Ternuryggur

Fyri at skapa áhugaverdar deplar verður skotið upp at hava fleiri sløg av virksemi í deplunum. Umframt skúlar skulu handlar við gerandisvørum fáa fleiri fólk til økið. Samstundis skulu skipað útiøki skapa møguleikar hjá fólki at savnast í deplunum. Umráðandi er, at bústaðir verða staðsettir tætt við skúlar, so skúlabørnini sjálv hava møguleika at fara í og úr skúla.

Nýggjar íbúðir verða staðsettar annaðhvørt í deplunum, t.d. sum meirbygging í Miðbýnum, ella í útjaðaranum av býnum. Stuttir gonguteinar gera tað lagaligt hjá eldri og illa gongdum fólkum, sum í framtíðini fara at hava áhuga í at búgva í íbúðum í bústaðardeplunum. Útbygdar gøtuskipanir og áhaldandi menning av bussleiðini binda deplarnar saman.

# 3.3 KARMAR

## 3.3.1 LÓGIR Á ØKINUM

- **Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
- **Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum**
- **Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a.**
- **Løgtingslóg um landsvegir**
- **Løgtingslóg um umhvørvisvernd**
- **Løgtingslóg um verju av havumhvørvinum**
- **Løgtingslóg um náttúrufriðing**
- **Løgtingslóg um landsjørð**
- **Leiðbeining um umhvørvisflokking av vinnuvirkjum**
- **Lov for Færøerne om Hegn og Markfred**

## 3.3.2 BYGGISAMTYKTIR

Við heimild í lóggávuni um býarskipanir og byggisamtyktir nýtir Tórshavnar kommuna byggisamtyktir til at stýra hvussu alt øki í kommununi skal skipast og gagnnýtast. Byggisamtyktirnar lýsa galdandi ásetingar fyri øki í mun nýtslu, bygging vm., og eru ein fortreyt fyri at ein ætlan kann fremjast á einum øki, t.d. um útstykking ella bygging kann loyvast. Tórshavnar kommuna deilir byggisamtyktirnar í tveir partar

- **Almenna byggisamtyktin, sum fevnir um alt í øki í kommununi**
- **Serstakar byggisamtyktir, sum fevna um ávís avmarkað øki.**

Byggisamtyktirnar eiga at samsvara við kommunuætlanina umframt aðrar ætlanir og politikkir í kommununi, og skulu tryggja at neyðug atlit verða tikin í mun til býarskipan.

**Allar byggisamtyktir eru tøkar á heimasíðuni www.torshavn.fo.**

### Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu

Hvussu vinnuligt virksemi verður umhvørvisflokkað, hevur stóran týdning fyri staðsetingina av vinnuligum virksemi í Tórshavnar kommunu. Umhvørvisflokking av virkjum er ein meting av, hvussu stór fjarstøða er neyðug millum virkir og bústaðir, soleiðis at bústaðarøki ikki hevur ampa av virkjum og virksemi teirra.

Víst verður eisini til listan um "Serliga dálkandi virkir v.m." í Umhvørvisverndarlógini.

Tórshavnar kommuna samtykti í 2014 eina vegleiðing til umhvørvisflokking og staðseting í samband við stovnan av nýggjum virkjum. Flokkingin er býtt upp í 7 flokkar, alt eftir hvussu dálkandi virkið verður mett at vera. Flokkur 1 er virkir við lægst umhvørvisligum ampum, og flokkur 7 er virkir, ið hava stóra ávirkan á umhvørvið. Frástøðan fyri hvønn umhvørvisflokk er ikki krav um frástøðu, ið skal lúkast, men skal heldur nýtast sum ein leiðbeining um frástøðu millum virkir og bústaðir.

Flestu virki í umhvørvisflokkunum 4-7 skulu hava umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni. Í hesum sambandi verða krøv sett til øll útlát, sum íljóð, royk, lukt, spillvatn, goymslur o.a.

## 3.3.3 POLITIKKIR OG ÆTLANIR

### Parkeringspolitikkur

Í 2015 bleiv ein parkeringspolitikkur fyri Tórshavnar kommunu samtyktur. Parkering er ein týdningarmikil partur av bygging, bæði til bústaðir og til vinnuligt virksemi. Í politikkinum verður greinað, hvussu parkeringsviðurskiftini í

| Umhvørvisflokking av vinnuvirkjum | | |
|---|---|---|
| | Minsta frástøða (m) | Slag av virki/virksemi |
| **Flokkur 1** | 0 | Handlar, skrivstovur og annað líknandi virksemi |
| **Flokkur 2** | 20 | Bókbindarar, elektronikk verkstaðir, royndarstovur |
| **Flokkur 3** | 50 | Handverkaravirkir og onnur minni tænastuvirkir |
| **Flokkur 4** | 100 | Matvøruframleiðsla, bilverkstaðir við og uttan sproytikabinu |
| **Flokkur 5** | 150 | Maskinverkstaðir, betongvirkir, sláturvirkir |
| **Flokkur 6** | 300 | Størri maskinvirkir, betongvirkir, sláturvirkir, asfaltvirkir |
| **Flokkur 7** | 500 | Orkuverk, brennistøð, heilivágs- og pesticidframleiðsla |

Tórshavnar kommunu skulu skipast. Eisini er ásett, hvussu parkeringsviðurskifti í sambandi við vinnuvirksemi skulu skipast.

Í almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu eru hesar ásetingar fyri, hvussu nógv parkeringspláss skulu gerast í sambandi við umsóknir um ný- og umbygging.

Parkering og yvirskipaður parkeringspolitikkur í Tórshavnar kommunu verða eisini lýst undir evninum “Undirstøðukervið”.

## Tórshavn sum ferðavinnubýur

Í 2018 bleiv ferðavinnupolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu samtyktur. Endamálið við politikkinum er at skapa neyðugar fortreytir fyri, at ferðavinnan kann mennast burðardygt, soleiðis at størst møguligir ágóðar fáast av ferðavinnuni, uttan at hon er til ampa fyri borgarar og umhvørvi. Hesin politikkur loysir ikki allar trupulleikar, men skal síggjast sum fyrsta stigið til víðari menning av ferðavinnuni í kommununi. 23 tilmæli fyri 2017-2020 eru raðfest, sum fevna um átøk, sum kunnu føra til eina mennandi og burðadygga ferðavinnu fyri bæði ferðafólk, borgarar, kommunu og Føroyar sum heild.

Ferðavinnupolitikkurin verður dagførdur í næstum.

## Menningarætlan fyri ferðavinnuna í Kirkjubø

Í 2019 bleiv menningarætlan fyri ferðavinnuna í Kirkjubø samtykt. Kirkjubøur er eitt av mest vitjaðu støðum í landinum. Tað er viðhvørt er ein avbjóðing at avgreiða nógvu ferðsluna á smølu vegunum í Kirkjubø av nógvum ferðafólki, sum vitja bygdina samstundis. Menningarætlanin er eitt stig á leiðini at skipa og menna ferðavinnuna í Kirkjubø. Uppskotið fevnir um tilmælir og ítøkilig átøk, sum eru grundað á støðulýsingar og samskifti við myndugleikar, stovnar og onnur, ið varða av ella hava áhuga fyri ferðavinnuni í Kirkjubø, og á ymiskar ætlanir og frágreiðingar um ferðavinnu.

## Ferðavinna fyri Nólsoy

Ferðavinnuætlan fyri Nólsoy er í gerð. Ætlanin skal blíva eitt stýrandi amboð fyri ferðavinnuna í Nólsoy og hevur til endamáls at lýsa og gera tilmæli, sum avvarðandi partar og ábyrgdarar av ferðavinnuni kunnu arbeiða fram ímóti í ymsum fláum og ymsum tíðarfreistum. Ætlanin verður liðug í næstum.

# 3.4 GRUNDAR-LAG

VINNULÍVIÐ ER DRÍVMEGIN Í OKKARA SAMFELAG. GOTT OG TÆTT SAMSTARV MILLUM VINNU OG KOMMUNU ER EIN FORTREYT FYRI VØKSTRI OG FRAMBURÐI. TÓRSHAVNAR KOMMUNA YNSKIR ÁHALDANDI AT BETRA VINNULIGU KARMARNAR, AT NÝGGJAR VINNUR FÁA RÚMD AT MENNAST OG GEVA VERANDI VINNUM GÓÐ VAKSTRARLÍKINDI. KOMMUNAN YNSKIR, AT HØVUÐSSTAÐURIN ER FREMSTUR Á HESUM ØKI. TÍ ER EISINI UMRÁÐANDI, AT KOMMUNAN VEITIR VINNUNI SKJÓTA OG GÓÐA TÆNASTU.

Vinnan í Tórshavnar kommunu er sera fjøltáttað. Stóru havnirnar í kommununi eru portrið inn í landið og út í heim, og meginparturin av bæði inn- og útflutninginum fer um bryggjukant her.

Matstovuvinnan og veitingarstøð eru í stórum vøkstri, og hendan vinnan veksur bæði í vavi, góðsku og fjølbroyttum úrvali. Alt frá Michelin-matstovuni til familjuvinarligar matstovur og matvognar eru at finna.

Handilslívið stendur eisini í vøkstri, og útboðið av vørum og tænastum í Tórshavnar kommunu økist í stórum við fleiri handlum og breiðari vøruúrvali.

Ferðavinnan er eisini vaksin munandi seinastu árini, og økir hon um grundarlagið fyri fleiri gistingarhúsum, fleiri matstovum, fleiri upplivingum og fleiri størvum.

Harumframt er Tórshavn høvuðssæti hjá landsfyrisitingini og nógvum almennum stovnum. Eisini í privatu vinnuni er nógv umsiting og umboðan staðsett her. Almennar og privatar tænastur eru ein týðandi partur av vinnulívinum í Tórshavn.

Landbúnaður er eisini sera týðandi í kommununi, og ein stórur partur av mjólkarframleiðsluni í Føroyum er í Tórshavnar kommunu.

Ikki minst er nýskapanarhúsið Hugskotið við til at skapa karmarnar um eitt íverksetaraumhvørvi, haðani fleiri nýggj vinnuhugskot longu eru sprottin og nógv fleiri eru á veg.

Vinnulívið í Tórshavnar kommunu er fjøltáttað.

Tað setur stór krøv til kommununa um at veita bestu karmar til, at vinnulívið kann fjølgast og trívast.

## 3.4.1 VINNUDEPLAR

Vinnulívið í høvuðsstaðnum er savnað saman í vinnudeplar, hesir eru:

- **Deplar við handilsvinnu og veitingarstøðum**
- **Deplar við Vinnuvirkjum, verkstøðum og tænastuvirksemi**
- **Deplar við Havna og sjóvinnu**

## 3.4.2 HANDILSVINNA OG VEITINGARSTØÐ

Stór handilsvinna og nógv veitingarstøð eru í Tórshavnar kommunu, og fleiri leggjast afturat. Í miðbýnum finst stóra handilsvinnan við úrval av servøruhandlum, matstovuvinnan, tænastuvinnan og fyrisiting. Í bústaðardeplunum og bygdunum eru í høvuðusheitinum gerandisvøruhandlarnar og eitt sindur av tænastuvinnu, sum hóskar væl saman við bústøðum.
Til tess at tryggja handilsvinnu, matstovuvinnu og veitingarstøðum betri karmar arbeiðir Tórshavnar kommuna millum annað støðugt fyri at royna at betra atkomuviðurskifti og parkeringsviðurskifti, soleiðis at tað verður hægligari at sleppa til. Eisini vil kommunan tryggja matstovuvinnuni og veitingarstøðum betri karmar, tá tað snýr seg um upplatingartíðir, soleiðis at hesar verða meira tíðarhóskandi.


Vinnudeplar
Handilsvinna og veitingarstøð
Havna- og sjóvirksemi
Vinnuvirki, verkstaðir
og tænastuvirksemi

Í 2020 lata ikki minni enn tvey nýggj gistingarhús upp í Tórshavn, umframt at verandi gistingarhús verða munandi útbygd.

Tórshavnar kommuna vil tryggja fyritøkum lættari og betri atgongd til kommunalar arbeiðsuppgávur, millum annað við nýggja útbjóðingarportalinum. Tað er umráðandi, at handils- og vinnulív fáa greiðar og gjøgnumskygdar reglur í sambandi við útboð av verkætlanum.

Kommunan eigur ikki at reka vinnu og vera kappingaravlagandi, men eigur hinvegin at stimbra støðugan vøkstur og skapa neyðugar karmar, so at tað gerst møguligt hjá nýggjum vinnuspírum at fóta sær.

## 3.4.3 VINNUVIRKI, VERKSTAÐIR OG TÆNASTUVIRKSEMI

Fimm størri vinnudeplar eru í Tórshavnar kommunu, har vinnuvirkir, verkstaðir og annað tænastuvirksemi eru savnaði. Hesi eru:

- **Í Hoyvík**
- **Á Hálsi**
- **Í Vika**
- **Á Hjalla**
- **Á Sundi**

Í Hoyvík er eingin ætlan um víðkan av økinum. Hinvegin er nýggja ætlanin um bústaðarøki við Stórubrekku, sum liggur vestanfyri vinnuøki, ein greið avmarking av vinnuøkinum.

Ynskið er at endurskoða vinnuøkið á Hálsi, við tí fyri eyga at flyta stóru og dálkandi vinnuna útum býin og fáa meiri miðstaðarkendan dám inn í økið. Hetta skal gerast við eini heildarætlan fyri økið, ið skal lýsa, hvussu farast skal til verka.

Ein partur av vinnuøkinum í Vika liggur óbygdur – ein partur er privatur og ein partur er kommunalur. Á teimum kommunalu óbygdu ognum eru ætlanir um bygging í næstum. Talan er tískil um eina tætting av vinnuøkinum í Vika.

Størri og meira dálkandi vinna er staðsett á Hjalla og á Sundi. Á Hjalla er Ovari Skarðshjalli víðkaður til biogassanleggi  og á Sundi er økið til havnavirksemi víðka, men enn fyriliggur eingin avtala um nýtslu av økinum.

## 3.4.4 HAVNIR OG SJÓVINNA

Sjóvinna og vinnur knýttar at sjónum skulu framhaldandi vera við til at menna høvuðsstaðin. Tórshavnar kommuna skal vera við í arbeiðinum at skipa Føroyar sum tilfeingisdepil í Norðurhøvum. Tí eru sjóvinnan og bryggjukanturin tvær síður av somu søk, og hesum vinnumøguleikum sær Tórshavnar kommuna vakstrarmøguleikar í. Havnirnar í kommununi eiga áhaldandi at útbyggjast og betrast. Hetta skal gerast við varsemi og við fyriliti fyri náttúrugivnu fortreytunum.

Allar bygdirnar í Tórshavnar kommunu uttan Syðradalur og Norðadalur hava smáar lendingar til bátar (sí kort). Tórshavnar havn eigur og rekur allar havnirnar í kommununi uttan havnina á Gomlurætt, har leigar Tórshavnar havn partar av havnini frá landinum.

### Tórshavnar havn

Tórshavnar havn er størsta góðshavn í Føroyum. Harumframt tekur Tórshavnar havn á hvørjum ári móti okkurt um 60 ferðamannaskipum, har tey flestu leggja at bryggju í Havn, meðan nøkur leggja at í Kollafirði.

**Havnarøkið í Havn er skipað soleiðis:**

- Á eystara kaiøki er bingjuhavn
- Við Eystaru Bryggju og Bursatanga er ferjuhavn
- Við Kongabrúnna, Skálatrøð og í Vágsbotni er smábátahavn
- Á Vestaru Bryggju eru Tórshavnar Skipasmiðja, landingarmiðstøð, pakkhús, umframt gamli saltsølubygningurin, ið er nýumvældur.
- Á Viðarnesi er oljuhavn og trolverkstaður

Tórshavnar havn er væl skipað til farma- og ferðafólkaflutning, og virksemið har hevur stóran týdning fyri býin.

Inn- og útflutningur um Tórshavnar havn er so líðandi vaksin seinastu árini, og væntað verður, at vøksturin heldur fram. Úr Havn er ferðafólkaflutningur við ferju til Nólsoyar og Suðuroyar. Norrøna leggur at alt árið, og um summarið leggja ferðamannaskip at her. Havnin veitir tá tænastu til millumlanda skipaferðslu.

> TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER TANN KOMMUNAN Í LANDINUM, SUM TEKUR ÍMÓTI FLEST FERÐAFÓLKUM. TÍ ER TAÐ TÝDNINGARMIKIÐ AT VEITA RØTTU KARMARNAR, SOLEIÐIS AT FERÐAVINNAN STØÐUGT KANN MENNAST.

Talið á ferðamannaskipum, sum koma á Havnina, hevur í fleiri ár verið vaksandi. Tó minkaði talið aftur munandi í 2016, eftir at ein felagsskapur móti grindadrápi gjørdi eitt átak vent móti ferðamannaskipum. Talið er tó kvinkað spakuliga upp aftur, og í 2019 var boðað frá 58 vitjanum.

## Útbygging av Tórshavnar havn

Vaksandi inn- og útflutningur um Tórshavnar havn og fleiri vitjanir av ferðamannaskipum leggja størri trýst á havnina. Tí undirskrivaði Tórshavnar býráð í 2016 endaliga avtalu um útbygging av Tórshavnar havn á Eystaru bryggju.

Í januar 2017 varð fyrsta skotið latið av. Havnarlagið á Eystaru bryggju verður víðkað eystur- og norðureftir. Nýtt bingjuøki er partur av útbygginini, og ytra síðan av gamla molanum er gjørd um til kaiøki. Samlaða víddin á samtyktu útbygginini er 95.000m2.

Útbyggingin av Tórshavnar havn fer at minka um plásstrotið og samstundis víðka virksemið á havnarøkinum.

Farmaflutningurin, sum hevur ligið á molanum, verður fluttur út á nýggja bingjuøkið, og molin verður til ferðamannaskip og farmaflutning. Hugskotið er, at bleyta vinnan skal liggja tættast við býin, meðan tunga og mest larmandi vinnan verður staðsett longst burtur frá býnum á tí nýggju útbyggingini.

Eisini fer útbyggingin at geva Tórshavnar havn munandi betri møguleikar at vera ein tænastuveitari á altjóða stigi til vaksandi talið av bæði ferðamanna- og farmaskipum um okkara leiðir.

Roknað verður við, at alt økið verður avhendað í 2021.

## Bátapláss

Eftirspurningurin eftir bátaplássi í Tórshavnar kommunu er stórur, og bíðilistin er langur. Tórshavnar Havn umsitur bátaplássini í Tórshavnar kommunu. Við árslok 2018 stóðu umleið 200 fólk á bíðilista til bátapláss.

Umleið 710 bátapláss eru í kommununi. Flestu teirra eru í Havn og á Argjum, har tað eru tilsamans 550 pláss. Í Kollafirði og á Signabø eru 74 pláss, í Nólsoy 25, í Kaldbak og Kaldbaksbotni 13, á Gomlurætt 20 pláss og í Hesti eru 16 pláss.

Í 2019 setti Tórshavnar kommuna 2 milliónir krónur av til at fyrireika bygging av bátahyli í Álakeri, við brimgarði niðanvert kappróðrarneystið hjá Havnar Róðrarfelag. Í fíggjarætlanini fyri 2020 eru 10 milliónir krónur settar av til byggingina av smábátahavn í Álakeri. Pláss verður fyri umleið 230 bátum, allir við flótibrúgvar. Harumframt verður nýggjur dráttur til kappróðrarbátar gjørdur.

Mett verður at arbeiðið kann vera liðugt í 2022.

## Kollafjarðar Havn

Havnin í Kollafirði er næststørsta havn í Tórshavnar kommunu. Havnarlag er gjørt báðumegin, havnin á Oyrareingjum og havnin á Langasandi.

Á Oyrareingjum er ein umleið 50.000 fermetra góðshavn, og hendan havnin kann víðkast upp til 50.000 fermetrar afturat suðureftir. Haðani er eingin fastur ferðafólkaflutningur, men Norrøna leggur onkuntíð at á Oyrareingjum, tá veðrið er ov ringt til at koma at bryggju í Havn.
Á havnarlagnum á Langasandi er virkið hjá Faroe Pelagic, har uppsjóvarfiskur verður tilvirkaður og síðani avskipaður. Stór frystigoymsla er á økinum. Um summarið leggja ferðamannaskip eisini at bryggju á Langasandi.

Bátahyljar eru á Signabø og við Sjógv í Kollafirði.

## Gamlarætt

Gamlarætt er á vestaru síðu á Streymoynni við Kirkjubø. Umframt at havnin verður nýtt sum smábátahavn, er eisini ferjusamband til Sandoy og Hest. Landsverk hevur ábyrgdina av havnini og teknisku umsitingini. Landsverk hevur gjørt leigusáttmála við Tórshavnar havn um leigu av pørtum av havnini við flótibrúm til bátar og atløgubryggju til ferðamannasigling.

## Argir

Havnin á Argjum er gjørd til smábátar og frítíðarbátar. Harumframt eru dráttur og atløgubrúgv til kappróðrarbátarnar hjá Argja Róðrarfelag í bátahylinum.

## Sund

Sund er norðan fyri Havnina uttan fyri bygt øki og tætt við høvuðsvegin. Havnarlagið er partur av ídnaðarøkinum á Sundi. Økið verður brúkt til bulkvørur, sum er jarn, skervur, sandur v.m. Harumframt hevur Asftaltverkið havt virksemi har í nógv ár, eins og Articon hevur langtíðarleigað eitt øki fram við havnarlagnum til elementgoymslu og framleiðslu.

Í 2017 varð havnaøkið víðka við umleið 50.000 fermetrum. Avtala um nýtslu av nýggja havnarøkinum er ikki gjørd enn.

## Nólsoy

Havnin í Nólsoy verður nýtt av Strandfaraskipum Landsins í sambandi við ferjuleiðina til Havnar. Ein annar partur av havnini verður brúktur sum smábátahavn, og pláss er fyri 25 bátum.

## Hestur

Havnin í Hesti verður nýtt av Strandfaraskipum Landsins í sambandi við ferjuleiðina til ávikavist Sandoynna og Gomlurætt. Harumframt eru 16 bátapláss í Hesti.

## Koltur

Koltur verður nógv brúkt til ferðavinnu um summarið, og til ber at leggja at har í góðum líkindum.


Havnir
Bátahylur
Landshavn
Lendingar
Smærri havnir
Størri havnir

### 3.4.5 LANDBÚNAÐUR

Tórshavnar kommuna er størsta einstaka landbúnaðarkommuna. Umleið helvtin av allari mjólkarframleiðslu í Føroyum kemur úr Tórshavnar kommunu. Tí skulu neyðug atlit takast til landbúnað í allari menning og víðkan av byggiøkjum. Dentur verður lagdur á at royna at varðveita góð dyrkilendi, til tess at stuðla landbúnað og lokala framleiðslu av landbúnaðarvørum í Føroyum.

Hetta er í samljóði við Heimsmálini hjá ST fyri burðardyggari menning, har serstakliga heimsmál 12 og 15 snúgva seg um at tryggja burðardygg nýtslu- og framleiðslumynstur og um at verja, endurbøta og virka fyri burðardyggari nýtslu av jarðvistskipanum.

Eisini her skal kommunan vera viðspælari í sambandi við viðgerð av loyvum til virksemi og til útbyggingar. Harafturat ynskir kommunan at raðfesta, at vetrarhegn verður sett upp, har ynski er um tað.

#### Vetrarhegn

Vetrarfriðing er eitt heiti, sum er úr Hagalógini um at friða bøin um summarið fyri at kunna hava fóður til seyðin um veturin. Vetrarfriðing í dag snýr seg um at fáa seyðin út úr bygdum øki, so til ber at fríðka um og skapa betri trivna millum fólk. Ynskið er at seta upp eitt hegn, eitt sokallað 'vetrarhegn', sum forðar seyði at koma inn í bygdina og inn millum húsini.

Í hesum sambandi er Tórshavnar kommuna farin í holt við arbeiðið at seta hegn upp í øllum bygdunum í kommununi. Ein yvirskipað meting er gjørd av manglandi vetrarhegn í Tórshavnar kommunu.

Øki, sum partvís hava fingið vetrarhegn:
- Hvítanes
- Hoyvík
- Tórshavn
- Argir
- Kollafjørður
- Nólsoy

Bygdir, sum ikki hava fingið vetrarhegn enn:
- Kaldbak
- Velbastaður
- Kirkjubøur
- Hestur
- Koltur
- Syðradalur
- Norðradalur
- Kaldbaksbotnur
- Signabøur
- Oyrareingir
- Sund

Tórshavnar kommuna er farin í holt við at gera avtalur við avvarðandi eigarar og festarar av lendinum í omanfyri standandi bygdum um, hvussu og hvar hegnið skal setast upp.

### 3.4.6 FERÐAVINNA

Tórshavnar kommuna vil styrkja og menna ferðavinnuna og geva ferðafólki góðar upplivingar.

Tórshavnar kommuna er tann kommunan í landinum, sum tekur ímóti flest ferðafólkum. Tí er tað týdningarmikið at veita røttu karmarnar, soleiðis at ferðavinnan støðugt kann mennast á ein ábyrgdarfullan og burðardyggan hátt.

Í 2019 vóru í alt skrásettar 197.886 gistingar í Føroyum samanborið við 184.122 í 2018. Í 2013, sum er fyrsta árið, gistingartøl vórðu savnað inn, vórðu skrásettar 132.265 gistingar. Talið á gistingum er sostatt vaksið við 50 prosentum fyri alt tíðarskeiðið. Tá eru tøl frá eitt nú 'Airbnb' ikki tald við. Eisini í umsetningi er ferðavinnan í Føroyum vaksin nógv. Úr 384 mió. kr. í 2011 upp í 784 mió. kr. í 2019. Ferðavinnan stóð fyri 6,4 % av samlaða føroyska útflutningsvirðinum í 2017.

Tíverri eru ikki nýggjari tøl fyri útflutningin enn fyri 2017.

Tí er tað týdningarmikið sum høvuðsstaður at veita røttu karmarnar, soleiðis at ferðavinnan kann mennast ábyrgdarfult og burðardygt. Grundað á økta ferðavinnu og stóra búskaparliga

týdningin av ferðavinnu fyri land og kommunu hevur Tórshavnar kommuna orðað ein ferðavinnupolitikk og ítøkilig tilmæli um átøk, sum skulu fremjast fyri at menna ferðavinnuna innanlands.

Endamálið við politikkinum er at skapa neyðugar fortreytir fyri, at ferðavinnan kann mennast burðardygt, soleiðis at vit fáa størst møguligar ágóðar av ferðavinnuni við neyðuga fyrilitinum fyri bæði náttúru og fólki.

Ferðavinnumenning er á dagsskránni í kommununi. Í fyrstu atløgu eru ymisk grundleggjandi viðurskifti raðfest. Í høvuðsheitum snúgva átøkini seg um, at tað skal verða lætt at ferðast og finna veg, kort og faldarar skulu dagførast, talgilda kunningin uppraðfestast og skeltingarætlan gerast.

Eitt brand skal gerast fyri Tórshavn sum høvuðsstað og ferðavinnubý við støði í tí, sum longu er í kommununi. Visit Tórshavn er umskipað og styrkt, og økir sum menning, marknaðarføring og kunning til ferðafólk eru uppraðfest.

Vinnuferðavinnan, eisini kalla mice-ferðavinnan, sum er ráðstevnu- og fundarferðavinnan, er ein liður av ferðavinnuøkinum, sum er í stórari menning. Tað er eitt økið, sum hevur stóran týdning fyri ferðavinnuna í høvuðsstaðnum. Kanningar úr øðrum londum vísa, at hesi ferðafólkini leggja upp til tríggjar ferðir so nógv eftir sær, í mun til onnur ferðafólk. Vinnuferðavinnan er harumframt eisini stór uttanfyri háárstíð. Í samstarvi við Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands, stuðlar Tórshavnar kommuna undir menningina av hesum ferðavinnuøkinum.

Náttúran skal verjast og ymisku økini í kommununi hvørt sær mennast eftir møguleikum og ynskjum frá borgarum á staðnum.

Fleiri øki og oyggjar uttanfyri havnina hava góðar vakstrarmøguleikar innan ferðavinnu, meðan onnur hava brúk fyri at fáa karmarnar rundanum ferðavinnuna betri skipaðar. Tørvur, ynski og møguleikar eru ymiskir frá staði til stað, og tí er tað týdningarmikið, at karmarnir fyri ferðavinnuna verða ásettir í tøttum samstarvi við borgarar á staðnum.

Ferðavinnuætlan fyri Kirkjubø er gjørd, og saman við øðrum myndugleikum, er farið undir at seta partar av ætlanini í verk.

Eitt uppskot til eina ferðavinnuætlan fyri Nólsoy verður klárt í summar 2020. Ein ætlan skal gerast fyri cruise-vinnuna, við áherðslu á at fáa henda málbólk at leggja fleiri pengar eftir sær.

Í ferðavinnupolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru 23 tilmæli raðfest fyri 2017-2020, sum fevna um átøk, sum kunnu føra til eina mennandi og burðardygga ferðavinnu.

**Ferðavinnuætlan er at finna inni á www.torshavn.fo**

## 3.4.7 ÍVERKSETAN OG NÝSKAPAN

Tórshavnar kommuna vil stimbra eitt virkið og nýskapandi íverksetaraumhvørvi við góðum møguleikum at hýsa og ráðgeva íverksetarum. Rúmd verður givin fyri skapandi vinnum, sum kunnu verða grundarlag fyri nýggjum og spennandi átøkum. Hesi stimbra undir og draga fleiri skapandi kreftir til landið.

Í 2014 varð nýskapanarhúsið Hugskotið sett á stovn við tí endamálið at stimbra menningina av einum fjøltáttaðum vinnulívi í Tórshavnar kommunu við at skapa eitt umhvørvi, har íverksetarar kunnu virka, deila vitan og fáa ráðgeving. Hugskotið veitir íverksetarum góðar karmar, har rúm er fyri íblástri, nýhugsan í einum kveikjandi umhvørvi, har møguleiki er at fáa ókeypis vegleiðing og innivist, og har møguleiki er at skapa eitt netverk við aðrar íverksetarar.

Hugskotið er sera væl móttikið, og staðfestast kann, at stórur tørvur hevur verið á slíkum stovni í kommununi. Áhugin fyri bæði ráðgeving og innivist í Hugskotinum er stórur og støðugur. Íverksetanarmentanin blómar í Tórshavn, og nógvar verkætlanir, sum á ein ella annan hátt

hava verið knýttar at Hugskotinum, eru vorðnar til veruleika og trívast í føroyska vinnulívinum í dag.

Síðan Hugskotið lat upp í 2014 hava yvir 100 fyritøkur havt innivist í Hugskotinum.

Vinnan hevur ymiskan tørv og ymiskar avbjóðingar, og tí ynskir Hugskotið at veita eina tænastu frá byrjan til framhaldandi menning av fyritøkuni. Hetta merkir, at allar fyritøkur í Tórshavnar kommunu kunnu fáa hjálp og vegleiðing í Hugskotinum. At hava ein stovn sum Hugskotið gevur nógvar ágóðar til íverksetarar, til vinnurekandi og til kommununa.

Fyri at menna vinnuna og stimbra nýggja vinnu og íverksetaramentan skipar Hugskotið eisini fyri ymiskum tiltøkum sum til dømis íversetarcafe, íverksetaradíkjarar, á enskum nevnt "startup accelerator programmes" og saman við Tórshavnar kommuna Tórskvøld fyri útisetarar og Vinnuforum.

Umframt íverksetan og stimbran av nýggjari vinnu er eisini áhaldandi tørvur á nýskapan. Nýskapan er ein týdningarmikil partur av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu, eitt nú innan eldraøkið og heilsu- og umsorganartænastur. Í framtíðini verða vit fleiri fólk í pensjónsaldri í mun til fólk á arbeiðsmarknaðinum; tí er tørvur á nýskapan og nýhugsan innan eldraøkið og heilsutænastur í framtíðini. Hetta er virksemi, ið Tórshavnar kommuna vil stuðla, eitt nú við nýskapanarhúsinum Hugskotinum.

## 3.4.8 FRAMTÍÐAR TØRVUR Á VINNUØKI

So hvørt sum íbúgvarnir í Tórshavnar kommunu gerast fleiri, økist virksemið og tørvurin á nýggjum vinnuøkjum eisini. Tí er ein greining gjørd, har mett verður um framtíðar tørvin á nýggjum vinnuøkjum.

Dátugrundarlagið fyri greiningina av vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu er ein greining, sum varð gjørd í sambandi við heildarætlanina fyri Tórshavnar kommunu í 2006. Hendan greiningin vísti, at talið á størvum í Tórshavnar kommunu svaraði til umleið 80 prosent av arbeiðsfjøldini, sum er íbúgvarnir í aldursbólkinum 17-67 ár. Greiningin vísti eisini, at hvørt starv krevur umleið 150 m2 av øki, íroknað øki til vegir og uppihald.

Við støði í hesum hevur ráðgevingarfyritøkan Rambøll gjørt framskrivingar av tørvinum á vinnuøki í Tórshavnar kommunu í ávikavist 2024 (fýra ár fram) og 2032 (tólv ár fram).

Um talið á teimum í arbeiðsførum aldri er roknað við grundarlagi í fólkaframskrivingini frá Rambøll við tølum frá Hagstovuni, so verða 62,8 prosent av íbúgvunum í Tórshavnar kommunu í aldursbólkinum frá 16-66 ár, tá vit koma fram til ár 2024 og 61,9 prosent av fólkinum í 2032. Hesin bólkurin verður vanliga kallaður tann samlaða arbeiðsfjøldin.

Um vit enn ganga út frá, at talið á størvum svarar til 80 prosent av arbeiðsfjøldini, merkir hetta, at talið á størvum í Tórshavnar kommunu fer at vaksa.

**Framrokning av tørvi á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu**

| | Fólkatal | Lutfall av 16-66 ár (%) | Lutfall av størvum (%) | Tal av størvum | Økisnýtsla pr. starv (m2) | Økisnýtsla (ha) | Vøkstur (ha) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2018** | 21.600 | 63,3 | 80 | 10.900 | 150 | 164 | |
| **2024** | 24.300 | 62,8 | 80 | 12.200 | 150 | 183 | 19 |
| **2032** | 27.400 | 61,9 | 80 | 13.600 | 150 | 204 | 40 |

> UMHVØRVISFLOKKINGIN AV VINNUVIRKJUM ER AVGERANDI FYRI STAÐSETINGINA AV VINNILIGUM VIRKSEMI Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU.

Um vit framvegis ganga út frá, at lutfallið av størvum svarar til umleið 80 prosent av íbúgvunum í hesum aldursbólkinum í Tórshavnar kommunu, verður tørvur á plássi fyri umleið 1.300 nýggjum arbeiðsplássum í kommununi innan 2024 og 2.700 arbeiðsplássum innan 2034.

Um økistørvurin fyri hvørt arbeiðspláss er í miðal 150 m2, verður tískil tørvur á 19 ha av lendi til nýggj vinnuøki innan 2024 og 40 ha av lendi til nýggj vinnuøki innan 2032. Mett verður, at flestu av hesum arbeiðsplássunum verða innan privata og almenna tænastuveiting og nøkur innan ídnað.

### 3.4.9 STAÐSETING AV VINNUØKJUM

Stórur eftirspurningur er eftir vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu. Men ymiskt er, hvat slag av vinnuligum virksemi hóskar á hvørjum stað.

Lagt verður upp til, at í bústaðarøkjum verður blandað og ikki dálkandi vinnuligt virksemi. Samstundis verða tyngri ídnaður og dálkandi vinnuligt virksemi løgd burtur frá búsetingum. Í býarvakstrarøkjum, sum verður viðgjørt undir evninum 'Fólk og bústaðir", er hugsað, at ikki dálkandi vinnuvirksemi eisini kann rúmast. Verandi vinnuútstykkingar hjá Tórshavnar kommunu til meira dálkandi vinnuvirksemi, eitt nú á Hjalla, eru um at vera fullar. Tí eru tveir møguleikar hjá Tórshavnar kommunu at útvega nýggj vinnustykki. Tann fyrri er at troyta møguleikarnar fyri fleiri vinnustykkjum, har verandi vinnuøki eru, eitt nú á Hjalla, á Sundi og fram við Gamla Velbastaðvegnum. Har er møguleiki at knýta nýggj vinnuvirki upp í verandi undirstøðukervi við lutfalsliga smáum tekniskum útbyggingum.

Hin møguleikin er at gera nýggja útstykking av vinnuøkjum, har eitt størri øki verður sett av til vinnuligt virksemi, og undirstøðukervið við vegum og leiðingum til økið verður gjørt heilt av nýggjum. Hesir møguleikar krevja størri íløgur í at gera neyðuga undirstøðukervið klárt, men gevur hinvegin møguleika fyri størri vinnuútstykkingum.

Tá nýggj vinnuøki verða løgd út, verða viðurskifti so sum atkomuviðurskifti, tekniskar leiðingar, hvussu tung ferðsla í høvuðsheitum verður leidd uttan um bústaðarøki  og hvussu vinnuøki hóskar inn í umhvørvi annars, kannað. Økið kring havnina er greinað, og mett verður, at nøkur teirra eru hóskandi sum nýggj vinnuøki, umframt at nakrir av verandi vinnudeplum kunnu víðkast.


Uppskot uppá nýggj og víðkan av verandi vinnuøkjum
Vinnuøki



# UNDIRSTØÐU-**KERVIÐ**

# 4.0 >

# UNDIRSTØÐUKERVIÐ


| | | |
|---|---|---|
| **4.1.** | **LÝSING** | 111 |
| **4.2.** | **LEIÐREGLUR** | 114 |
| 4.2.1 | Ferðsla | 115 |
| 4.2.2 | Bussleiðin | 115 |
| 4.2.3 | Tekniskar veitingar | 115 |
| **4.3** | **KARMAR** | 116 |
| 4.3.1 | Lógir á økinum | 116 |
| 4.3.2 | Byggisamtyktir | 117 |
| 4.3.3 | Politikkir og ætlanir | 117 |
| | Umhvørvispolitikkur | 117 |
| | Parkeringspolitikkur | 117 |
| | Samferðsluætlanin 2018 - 2030 | 117 |
| | Ferðslutrygdarætlanin 2008 – 2015 | 117 |
| **4.4** | **GRUNDARLAG** | 118 |
| 4.4.1 | Ferðsla | 118 |
| | Ferðslutrygd | 118 |
| | Vegaflokkingar | 120 |
| | Parkering | 122 |
| 4.4.2 | Útbyggingar av vegakervinum | 123 |
| | Innkomuvegur til Havnar | 123 |
| | Vegasamband millum Marknagilsvegin og innkomuvegin | 124 |
| | Glyvursvegur | 124 |
| | Eysturoyartunnilin | 124 |
| | Sandoyartunnilin | 124 |
| | Suðuroyartunnil | 125 |
| 4.4.3 | Grøn ferðsla | 125 |
| | Gøtuskipan | 125 |
| | Gongu- og súkklubreytir | 127 |
| | Bussleiðin | 127 |
| 4.4.4 | Tekniskar veitingar | 130 |
| | Vatnveiting | 130 |
| | Kloakkir | 133 |
| | Fjarhitaskipanin | 137 |
| | Burturkast | 138 |
| | Kirkjugarðar | 139 |



# 4.1 LÝSING >

UNDIRSTØÐUKERVIÐ ER HJARTAÐ OG ÆÐRARNAR Í KOMMUNUNI. TÍ ER EITT VÆLVIRKANDI OG STØÐUGT UNDIRSTØÐUKERVI EINS TÝDNINGARMIKIÐ FYRI KOMMUNU SUM HJARTASLÁTTUR FYRI OKKUM MENNISKJU.

**Evnið Undirstøðukervið** snýr seg um planlegging av Tórshavnar kommunu í mun til útbúnað á tekniska økinum, sum er neyðugur í einum vælvirkandi samfelagi. Tað snýr seg um vegir, gøtur og ferðslu, bæði bleyta og harða ferðslu. Tað snýr seg eisini um planlegging av leiðingum av tekniskum slag til kloakk, vatnveiting, streymveiting og samskifti. Undirstøðukervið fevnir eisini um planlegging av burturkasti og tyrving, umframt um kirkjugarðar og veiting av nóg nógvum gravarplássi.

## Vit virka fyri

**Leiðingar**

- at allir borgarar í kommununi hava støðuga veiting av reinum vatni
- at bøta um og støðugt endurnýggja verandi kloakkleiðingar
- at útleiðingarnar verða savnaðar og spillvatnið reinsað og leitt út á streymasjógv
- at nýggjar vatnleiðingar eru úr umhvørvisvinarligum tilfari
- at spillivatn og regnvatn verða atskild, soleiðis at spillivatn verður leitt út á streymasjógv og regnvatn verður leitt út í áirnar
- at fjarhitanetið verður útbygt, soleiðis at fleiri almennir bygningar og privatir borgarar fáa møguleika at verða knýttir upp í fjarhitanetið
- at nøktandi gøtuljós eru fram við almennum vegi, og at alsamt fleiri gøtuljós hava orkusparandi LED-perur

**Ferðsla**

- at tað skal vera trygt at ferðast í ferðsluni
- at farandi skal vera eftir vegakervinum hjá øllum sløgum av ferðandi
- at fleiri velja súkklu ella gjaldfría bussin fram um bilin; hetta bæði fyri betri heilsu, minni trokan á vegunum og fyri at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi

FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU >

## 4.1 LÝSING FRAMHALD

- at skapa góð gøtusambond millum býar-partar, náttúru- og mentanar- møguleikar í kommununi og soleiðis stuðla undir bleytu ferðsluna og meira rørslu

**Burturkast og tyrving**

- at minka burturkastið í kommununi og økja endurnýtsluna
- at hitin frá brenningini av burturkasti verður nýttur at hita bygningar gjøgnum fjarhitaskipanina og soleiðis at varðveita orkuna í ringrás
- at betra um umstøðurnar og møguleikarnar fyri at skilja burturkast í sambandi við planlegging av nýggjum økjum.

**Kirkjugarðar**

- At gravpláss altíð eru tøk í kirkjugørðunum
- At kirkjugarðurin er væl røktur
- At talgildingin av grøvum framhaldandi er góð og virkin fyri borgararnar





# 4.2 LEIÐ-REGLUR

UNDIRSTØÐUKERVIÐ ER EIN TÝDNINGARMIKIL HORNASTEINUR Í SAMFELAGNUM. TAÐ ER EIN GRUNDLEGGJANDI TÆNASTA TIL BORGARAR OG VINNULÍV, SUM KREVUR LUTFALSLIGA NÓGVAN PENING TIL RAKSTUR OG VIÐLÍKAHALD. SAMSTUNDIS ERU ÍLØGURNAR Í UNDIRSTØÐUKERVIÐ OFTA STÓRAR.

UNDIRSTØÐUKERVIÐ HUGSA VIT ALOFTAST IKKI UM, TÁ ALT ER Í LAGI, MEN TAÐ KANN ELVA TIL STÓRT HØVUÐBRÝGGJ, TÁ EITTHVØRT Í UNDIRSTØÐUKERVINUM SVÍKIR. TÓRSHAVNAR KOMMUNA ARBEIÐIR VIÐ HESUM LEIÐREGLUM, TÁ UNDIRSTØÐUKERVIÐ VERÐUR SKIPAÐ.

## 4.2.1 FERÐSLA

Tá nýggj øki verða løgd út til bústaðarøki, skal samstundis tryggjast, at vegakervið er framtíðartryggjað og sostatt ført fyri at leiða ferðsluna í framtíðini, bæði tá talan er um mongd av ferðandi og slag av akførum. Samstundis skulu neyðug átøk gerast fyri at tryggja øll í ferðsluni.

Ferðslutrygd hevur sera høga raðfesting hjá kommunu og landi og skal verða tikin við, tá vegakervið til nýggj bústaðarøki verður gjørt.

Yvirskipað eru vegirnir, sum eru í Tórshavnar kommunu, soleiðis flokkaðir:

**Landavegir** eru til gjøgnumkoyrandi ferðslu og binda býir og bygdir saman. Fáar íbindingar eru til býarøki fram við landavegnum.

**Ringvegir** eru eisini til gjøgnumkoyrandi ferðslu, har dentur er lagdur á framkomuleika og at ferðslutrygdin er góð fyri bilar og bleyta ferðslu.

**Sambindingarvegir** knýta saman ringvegir og býlingsvegir; ferðslutrygdin er góð fyri allar ferðslubólkar.

**Býlingsvegir og bústaðarvegir**, sum binda saman einstøku eindirnar í býlingunum, eitt nú til skúlar, barnaansingarstovnar o.a., hava góða ferðslutrygd fyri allar ferðslubólkar.

**Aðrir vegir** binda saman einstøku eindirnar í býlingunum.

Framtíðar býarvøkstur krevur eisini nýggjar atkomuvegir, og fleiri teirra verða í brekkum. Gerð av býlings- og bústaðarvegum tekur atlit til vegareglur við støði í norskum reglum. Tað merkir, at hallið í mesta lagi skal vera 80 o/oo, undantak kann vera 100 o/oo fyri stuttar teinar. Vertikalkurvar við íbingingar skulu hava ein radius í minsta lagi 60 metrar.

Tórshavnar kommuna arbeiðir støðugt við at tryggja, at allir nýggir býlings- og bústaðarvegir frá høvuðsvegum til býarvakstrarøkini verða gjørdir við halli minni enn 80 o/oo. Hvar vegirnir liggja best, verður støða tikin til, tá farið verður undir at fremja býarvøkstur.

## 4.2.2 BUSSLEIÐIN

Bussleiðin verður javnan endurskoða og tá verða kanningar gjørdar, ið liggja til grund fyri víðari menning av bussleiðini.

## 4.2.3 TEKNISKAR VEITINGAR

Spillivatnsleiðingar verða lagdar sambært góðkendari spillivatnsætlan. Spillivatnsætlanin er sett í verk sambært §18 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd. Tað er sambært lógargrundarlagnum álagt kommununi at gera eina heildarætlan fyri, hvussu spillivatn í kommununi verður leitt burtur. Hetta fyri at tryggja at spillivatn verður leitt burtur á ein skipaðan hátt, og fyri at fyribyrgja umhvørvisdálking og heilsuvanda. Arbeitt verður í løtuni við at dagføra spillivatnsætlanina fyri Tórshavnar kommunu.

Vatnverkið eigur og hevur ábyrgdina av vatnleiðingum á kommunalum øki. Vatnleiðingar verða lagdar út til nýggjar útstykkingar. Borgarin eigur vatnleiðingina inni á egnum øki, og hann hevur eisini ábyrgdina av henni.

Í Tórshavn er gjørligt hjá borgarum og almennum stovnum í nøkrum býlingum at fáa fjarhita. Veitingarnetið við fjarhita verður støðugt útbygt í Tórshavn, soleiðis at uppaftur fleiri almennir stovnar og privatir kundar fáa møguleika fyri at verða knýttir upp í fjarhitanetið. Soleiðis kunnu vit gagnnýta avlopsorku frá Brennistøðini á Hjalla og EL-verkinum hjá SEV á Sundi til at hita bygningar og vatn. Tórshavnar Kommuna og SEV eiga Fjarhitafelagið.

Tórshavnar kommuna veitir eisini gøtuljós fram við almennum vegum. Kommunan hevur gjørt íløgu í stýriskipanir til gøtuljós, sum gera tað møguligt at stilla og fjarstýra gøtuljósini eftir árstíð og øðrum viðurskiftum og á tann hátt minka orkunýtsluna. Alsamt fleiri gøtuljós hava eisini orkusparandi LED-perur.

# 4.3 KARMAR

FYRI UNDIRSTØÐUKERVIÐ ERU SERLIGA HESAR LÓGIR, ÆTLANIR OG POLITIKKIR, IÐ ATLIT SKULU TAKAST TIL Í SAMBANDI VIÐ ARBEIÐIÐ VIÐ UNDIRSTØÐUKERVINUM Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU.

## 4.3.1 LÓGIR Á ØKINUM

- Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir
- Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m.
- Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum
- Løgtingslóg um landsvegir
- Løgtingslóg um umhvørvisvernd
- Løgtingslóg um verju av havumhvørvinum
- Løgtingslóg um náttúrufriðing
- Løgtingslóg um matvørur
- Reglugerð fyri vatnveiting í Tórshavnar kommunu
- Lov nr. 63 for Færøerne om vandledninger
- Lov nr. 48 om tilvejebringelse af vedtægt for benyttelse af vand fra Torshavns vandværk
- Lov nr. 60 om beskyttelse af vandforsyningsanlæg
- Kunngerð nr. 127 um veiting av drekkivatni
- Kunngerð nr. 114 um innaneftirlit
- Kunngerð nr. 53 um umhvørvisreglur
- Kunngerð nr. 27 um taðing
- Bekendtgørelse nr. 36 om en af justits-ministeriets stadfæstet vedtægt for benyttelsen af vand fra Torshavns vandværk
- Bekendtgørelse fra Torshavns kommune om vandforsyning

## 4.3.2 BYGGISAMTYKTIR

Við heimild í lóggávuni um býarskipanir og byggisamtyktir nýtir Tórshavnar kommuna byggisamtyktir til at stýra hvussu alt øki í kommununi skal skipast og gagnnýtast. Byggisamtyktirnar lýsa galdandi ásetingar fyri øki í mun nýtslu, bygging vm., og eru ein fortreyt fyri at ein ætlan kann fremjast á einum øki, t.d. um útstykking ella bygging kann loyvast. Tórshavnar kommuna deilir byggisamtyktirnar í tveir partar

- **Almenna byggisamtyktin, sum fevnir um alt í øki í kommununi**
- **Serstakar byggisamtyktir, sum fevna um ávís avmarkað øki.**

Byggisamtyktirnar eiga at samsvara við kommunuætlanina umframt aðrar ætlanir og politikkir í kommununi, og skulu tryggja at neyðug atlit verða tikin í mun til býarskipan.

**Allar byggisamtyktir eru tøkar á heimasíðuni www.torshavn.fo.**

## 4.3.3 POLITIKKIR OG ÆTLANIR

### Umhvørvispolitikkur

Í 2016 samtykti býráðið í Tórshavnar kommuna ein umhvørvispolitikk, Grøna Leiðin.

Umhvørvispolitikkurin er eitt stýriamboð til at minka um útlát, burturkast og dálking. Eftir teimum ætlanum og politikki, sum mynda virksemið í Tórshavnar kommunu, skulu ásetingarnar í umhvørvispolitikkinum takast stigið víðari, har alt virksemið hjá kommununi skal taka støði í umhvørvinum.

Umhvørvispolitikkurin er skipaður í fýra øki.

- **Varandi orka snýr seg um útlát av vakstrarhúsgassi,**
- **Minni burturkast, meiri endurnýtsla um tilfeingisnýtslu,**
- **Okkara náttúra um dálking og grønt virksemi**
- **Kommunan tekur ábyrgd um, hvussu umhvørvisatlit gerast partur av virkseminum hjá kommununi og hennara stovnum.**

Til hvørt øki hoyra tvey ítøkilig mál, ið skulu røkkast.

### Parkeringspolitikkur

í 2015 bleiv ein parkeringspolitikkur fyri Tórshavnar kommunu samtyktur. Parkering er ein týdningarmikil partur av bygging, bæði til bústaðir og til vinnuligt virksemi. Í politikkinum verður greinað, hvussu parkeringsviðurskiftini í Tórshavnar kommunu skulu skipast. Eisini er ásett, hvussu parkeringsviðurskifti í sambandi við vinnuvirksemi skulu skipast.

Í almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu eru hesar ásetingar fyri, hvussu nógv parkeringspláss skulu gerast í sambandi við umsóknir um ný- og umbygging.

### Samferðsluætlanin 2018 - 2030

Í Samferðsluætlanini hjá Lansverk frá 2018 eru stevnumið og karmar fyri ferðsluplanlegging lýst og hvussu arbeitt verður við at halda undirstøðukervið dagført samsvarandi nútíðini.

### Ferðslutrygdarætlanin 2008 – 2015

Í Ferðslutrygdarætlanini standa uppskot til tiltøk til at gera føroysku ferðsluna tryggari.

# 4.4 GRUNDAR-LAG >

UNDIRSTØÐUKERVIÐ ER EIN TÝDNINGARMIKIL HORNASTEINUR Í SAMFELAGNUM. TAÐ ER EIN GRUNDLEGGJANDI TÆNASTA TIL BORGARAR OG VINNULÍV, SUM KREVUR LUTFALSLIGA NÓGVAN PENING TIL RAKSTUR OG VIÐLÍKAHALD. SAMSTUNDIS ERU ÍLØGURNAR Í UNDIRSTØÐUKERVIÐ OFTA STÓRAR.

UNDIRSTØÐUKERVIÐ HUGSA VIT ALOFTAST IKKI UM, TÁ ALT ER Í LAGI, MEN TAÐ KANN ELVA TIL STÓRT HØVUÐBRÝGGJ, TÁ EITTHVØRT Í UNDIRSTØÐUKERVINUM SVÍKIR.

### 4.4.1 FERÐSLA

Evnið ‘Ferðsla’ snýr seg um vegir, gøtur og leiðir, ið binda kommununa saman. Hesar leiðir skulu mennast, soleiðis at ferðslan í kommununi er trygg og smidlig, samstundis sum atlit verður tikið til umhvørvið rundanum.

Ferðsla hevur stóran týdning fyri okkum øll. Tí er ein ferðsluskipan partur av kommunuætlanini. Ferðsluskipanin tekur støði í framtíðar býarvøkstri, ferðsluteljing, ætlaðum vegaverkætlanum og ferðslutrygdarloysnum, smbr. ferðslutrygdarætlanina hjá kommununi.

Vegir, gøtur og tann almenna samferðslan binda saman ferðsluna fyri tey súkklandi, ferðandi í bili og tey almennu flutningsførini. Kommunala vegakervið skal mennast, soleiðis at vit øll kunnu koma skjótt og trygt fram, samstundis sum vakra umhvørvið við vegirnar skal mennast og varðveitast.

Bilur er mest nýtta flutningsakfar í Havn, helst orsakað av veðurlagnum og nógvu brekkunum. Ferðslan hevur verið støðugt vaksandi seinastu árini, og roknast kann við at ferðslan økist, so hvørt vit verða fleiri og fleiri. Samsvar skal tí vera millum býarvøkstur og áhaldandi útbygging og menning av vegakervinum og samferðslumøguleikum í Tórshavnar kommunu.

Ferðsluteljingar verða gjørdar javnan fyri ferðslu í Tórshavn. Hesar verða nýttar sum hagtøl fyri útbygging og skipan av veganetinum í kommuni.

Í teimum nýggju býarpørtunum skal tryggjast, at vegakervið er útgjørt til ferðslunøgdina og ferðslumynstrið, ið eru væntandi í framtíðini.

Vegakervið hevur sera stóran týdning fyri býarvøksturin og skipanina av nýggjum býlingum. Vegakervið skal kunna handfara framtíðar ferðslu, og tryggjast skal, at neyðugar fyriskipanir eru til staðar, soleiðis at øll ferðandi kunnu nýta vegakervið á tryggan hátt.

#### Ferðslutrygd

Til tess at betra um ferðslutrygdina verður miðvíst arbeitt fyri at innrætta umhvørvið rundan um vegir, so at ferðslutrygdin verður betri hjá øllum í ferðsluni. Hetta kann til dømis gerast við at nýta skeltir og ferðvísara.

Eitt trygt vegakervi umfatar alt vegaumhvørvið, sum skal skipast so, at øll kunnu ferðast trygt. Hetta merkir, at sniðgevingin á vegnum og vegaumhvørvinum skal verða leiðandi og vísa teimum ferðandi, hvør atburður er hóskandi júst her. Tí verður dentur lagdur á, at vegakervið í Tórshavnar kommunu verður lagað til tað visuella ferðsluumhvørvið, har økið rundan um vegin eisini verður ein partur av býargóðskuni.

Arbeitt verður sambært Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar og út frá einari nullhugsjón í ferðsluni. Hugsjónin er, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein í vegaflutningsskipanini.

# GRUNDARLAG

## Vegaflokkingar

Skotið verður upp at brúka eina vegaflokkingarskipan við støði í ásetingum, ið galdandi eru fyri vegakervið í Danmark.

Flokkingin er skipað soleiðis, at vegastrekkini í kommununi eru býtt eftir slag av vegi og hámarksferð, ið er ásett eftir, hvat vegirnir verða nýttir til:

- **Landavegir** eru til gjøgnumkoyrandi landsferðslu; vegirnir hava góðan framkomuleika og ferðslutrygdin er góð. Bert fáar íbindingar eru til býarøki fram við landavegunum.
- **Ringvegir** eru eisini til gjøgumkoyrandi ferðslu; dentur er lagdur á framkomuleika og at ferðslutrygdin er góð, bæði fyri bilar og bleyta ferðslu.
- **Sambindingarvegir** knýta saman ringvegir og bústaðarvegir; ferðslutrygdin er góð fyri allar ferðslubólkar.
- **Býlingsvegir** og bústaðarvegir eru vegir, sum binda saman einstøku eindirnar í býlingunum, m.a. til skúlar, barnaansingarstovnar o.a. Ferðslutrygdin er góð fyri bleytu ferðsluna.
- **Aðrir vegir** binda saman einstøku eindirnar í býlingunum.

| Vegaflokking | Býarøki Km/t | Óbygt øki Km/t | Ársmiðalferðsla um samdøgrið Bilar/dag |
|---|---|---|---|
| **Landavegir** | - | 60-80 | 10.-20.000 |
| **Ringvegir** | 50-70 | 60-80 | 10.-15.000 |
| **Sambindingar-vegir** | 40-60 | 50-80 | 5.-15.000 |
| **Býlingsvegir** | 40-50 | 40-60 | < 5.000 |
| **Aðrir vegir** | 30-50 | 30-50 | < 3.000 |


Vegir og ferðsla
Ringvegur
Landavegur
Býlingsvegur
Sambindingarvegur
Uppskot til linjuføring
Glyvursvegur (Landsverk)
Innkomuvegur (Landsverk)

> EITT STÓRT YNSKI FRÁ KOMMUNUNI ER TÓ, AT FØROYA LANDSSTÝRI GEVUR KOMMUNUM HEIMILD AT TAKA GJALD FYRI PARKERING Í ÁVÍSUM ØKJUM. TAÐ KANN MINKA UM TRÝSTIÐ Á VERANDI PARKERINGSØKI Í MIÐBÝNUM.

## Parkering

Á heysti 2015 samtykti býráðið parkeringspolitikk fyri Tórshavnar kommunu. Kommunan fremur átøk úr parkeringspolitikkinum í verki. Endamálið er stigvíst at dagføra og betra parkeringsviðurskiftini í kommununi. Parkeringspolitikkurin verður dagførdur, tá Kommunuætlanin er samtykt.

Nógv trýst er á parkeringsøkjunum í miðbýnum í Havn. Arbeitt verður við fleiri møguligum loysnum fyri at royna at nøkta tørvin á bæði stutt- og langtíðarparkering. Ein loysn, ið verður kannað, er ein møguligur parkeringstunnil undir Havnini. Aðrar loysnir, ið hava verið umrøddar, eru at gera parkeringshús ella parkeringskjallara.

Eitt stórt ynski frá kommununi er tó, at Føroya Landsstýri gevur kommunum heimild at taka gjald fyri parkering í ávísum økjum. Tað kann minka um trýstið á verandi parkeringsøki í miðbýnum. Tað kann eisini gera, at áhugi verður frá privatum at gera parkeringshús ella parkeringskjallarar í býnum.

Í 2016 varð eitt stórt parkeringspláss gjørt á Hálsi í sambandi við útbyggingina av høllini. Á hesum plássum ber eisini til at langtíðarparkera. Í 2019 varð Bussleiðin løgd um, og allar bussleiðir steðga nú við parkeringsplássið har. Hetta er liður í eini roynd at flyta langtíðarparkeringina longur burtur frá miðbýnum, soleiðis at parkeringspláss í miðbýnum í størri mun kunnu vera til viðskiftafólk hjá handlum og øðrum tænastum mitt í býnum.

Eitt er at økja um talið á parkeringsbásum. Tórshavnar kommuna arbeiðir eisini støðugt við at geva borgarum og vitjandi eina betri talgilda tænastu. Tí ber nú til at fáa dagførdar upplýsingar um staðsetingar og møguligar tíðaravmarkingar á parkeringsbásum.

Stigvíst verður kortið víðkað til at fata um alla kommununa.
Parkeringsøkini í Tórshavn eru skipaði soleiðis og við ymiskum tíðaravmarkingum:

- Parkeringsøki í miðbýnum.
- Á Hálsi: Títlingsvegur, Heykavegur og Staravegur.
- Á økinum hjá SMS og Tjaldurs Apoteki.
- Við Havnarskrivstovuna á Eystaru Bryggju.
- Á Vestaru Bryggju
- Við Landssjúkrahúsið.

Parkeringsøkið á Argjum er á Argjavegi (frá Rættargøtu til Traðagøtu) og á Traðagøtu (frá Argjavegnum til Fíggjarmálaráðið).

Parkeringsansarar hava eftirlit við parkeringini. Gjaldið fyri ólógliga parkering er 200 krónur.

## 4.4.2 ÚTBYGGINGAR AV VEGAKERVINUM

Vegakervið í Føroyum verður áhaldandi útbygt, bæði kommunalt og hjá Landsverki. Hetta er neyðugt til tess at betra um samferðslumøguleikarnar í Føroyum, at kunna rúma vaksandi tali av akførum og fyri at kunna beina eina vaksandi framtíðar bilferðslu suður- og norður um Havnina, trygt rundan um bústaðarøki.

Umframt verandi vegir í dag fevnir framtíðar vegakervið í Tórshavnar kommunu um hesar ætlaðu nýggju vegirnar.

### Innkomuvegur til Havnar

Landsverk hevur saman við uttanhýsis ráðgeva gjørt framrokningar av, hvussu nógvir bilar koma inn í Havnina gjøgnum Eysturoyartunnilin. Mett verður, at 3.640 fleiri bilar koma at koyra til høvuðsstaðin. Tí er týdningarmikið at tryggja, at linjuføringin á innkomuvegnum verður løgd soleiðis, at hesir bilar verða leiddir uttan um býin.

Ætlanin er at gera veg frá Kaldbaksfjarðarvegnum uttan um verandi bygd økir til Velbastaðvegin. Nýggi innkomuvegurin fer at beina stóran part av ferðsluni uttan um kommunalu vegirnar í Tórshavnar kommunu. Innkomuvegurin er býttur upp í tveir partar. Fyrsti partur fer úr Kaldbaksfjarðarvegnum til Oyggjarvegin og annar partur úr Oyggjarvegnum til Velbastaðvegin í Havnardali.

Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommuna gjørdu í oktober 2016 semju um, hvussu fyrsta byggistig av innkomuvegnum skuldi gerast. Avtalan fevndi um at gera innkomuvegin frá Kaldbaksfjarðarvegnum við Skarðshjalla, umvegis nýggja rundkoyring við Hvítanesvegin, oman fyri munnan til Eysturoyartunnilin, norður um Havnina og til Krákugjógv við Oyggjarvegin.

Avtalað var, hvat ávikavist land og kommuna skuldu gera og nær. Seinasti teinurin skuldi vera ein tunnil frá Villingardalsvegnum og vestureftir til Oyggjarvegin. Hesin nýtist ikki at vera liðugur, tá Eysturoyartunnilin letur upp. Restin av avtaluni skuldi verða framd, tá Eysturoyartunnilin verður tikin í nýtslu.

Enn er ikki endaliga gjørt av, hvussu vegurin skal gerast frá Villingardalsvegnum til Oyggjarvegin. Tórshavnar kommuna og Landsverk skulu í felag finna út av, hvør loysn verður gjørd.

Annar parturin av innkomuvegnum verður íbundin oman fyri vegin undir Krákugjógv, fer eftir verandi Oyggjarvegi til á leið við Hotel Føroyar og síðani vestur til Velbastaðvegin vestan fyri fjósið í Havnardali.

Verkætlanin er undir viðgerð, og fleiri kanningar mugu gerast í samstarvi við Landsverk fyri at staðseta vegaføringarnar endaliga.

Kommunan hevur støðug arbeitt fyri at fáa Havnadal til eitt fríøki til borgarin og hendan linjuføringin er ikki í trá við hesa ætlan. Tí fer Tórshavnar kommuna at arbeiða fyri at linjuføringin verður flutt longur niðan í dalin, so at ætlaða frítíðarvirksemi ikki verður tarna.

Við innkomuvegnum, tá hann er endaliga framdur, verður møguligt at koyra uttan um bygt øki, tá farið verður ígjøgnum Havnina. Hetta fær stóran týdning í sambandi við Sandoyar- og Suðuroyartunnilin.

> VEGAKERVIÐ Í FØROYUM VERÐUR ÁHALDANDI ÚTBYGT, BÆÐI KOMMUNALT OG HJÁ LANDSVERKI. HETTA ER NEYÐUGT TIL TESS KUNNA BEINA EINA VAKSANDI FRAMTÍÐAR BILFERÐSLU SUÐUR- OG NORÐUR UM HAVNINA, TRYGT RUNDAN UM BÚSTAÐARØKI.

### Vegasamband millum Marknagilsvegin og innkomuvegin

Sum liður í verkætlanini at gera nýggjan innkomuveg til Havnar, sum Landsverk stendur fyri, er eisini ætlanin at gera nýtt vegasamband millum Marknagilsvegin og innkomuvegin. Eftir ætlan verða vegirnir knýttir saman við vegasambandi, sum verður íbundið tætt við nýggju skúlarnar í Marknagili.

Yvirskipaða vegakervið í høvuðsstaðnum verður sostatt samanhangandi úr Hoyvík og út á Argir, eftir brúnni um Sandá og knýtt í nýggja Glyvursvegin.

Hetta ger alt økið í Vesturbýnum, á Norðasta Horni og á Argjum lættari atkomuligt til víðari býarmenning, samstundis sum tað kann leiða nógva ferðslu út um Miðbýin í Havn.

### Glyvursvegur

Glyvursvegur er dagførdur frá Brúnni um Sandá og niðan til Skúlan á Argjahamri. Eftir ætlan verður Glyvursvegurin í framtíðini eisini dagførdur longur suður eftir Glyvursnesi. Hetta ger økið á Glyvursnesi lættari atkomuligt til víðari býarmenning, eins og tað fer at lætta munandi um atkomuna til golfvøllin.

Verður í framtíðini gjørt av at fara undir býarmenning og bústaðarbygging á Glyvursnesi, verður Glyvursvegur ein av høvuðsferðsluæðrunum til hetta økið.
Verður tað í framtíðini gjørt av at fara undir at gera ein altjóða flogvøll á Glyvursnesi, er hugsandi, at eitt heilt nýtt vegakervi skal gerast, sum knýtir flogvøllin beinleiðis upp í vegakervið rundan um Havnina, eins og Landsverk hevur skotið upp í Samferðsluætlanini 2018 – 2030.

Tá eiga møguleikar við at knýta Glyvursveg upp í nýggja vegakervið at kannast nærri og umhugsast.

### Eysturoyartunnilin

Undirsjóvartunnilin knýtir Skálafjørðin og Havnina saman og er 11.250 metrar langur. Tunnilin styttir um farleiðina millum Tórshavn og Runavík/Strendur, Klaksvík og Toftir.
Fyrsta skotið í Eysturoyartunnlinum varð latið av 21. februar 2017.

Í sambandi við gerð av Eysturoyartunlinum er vegasamband gjørt frá rundkoyringini við tunnilsmunnan á Hvítanes til staðið, har nýggi innkomuvegurin verður frá

Kaldbaksfjarðarvegnum við Skarðshjalla. Hetta letur upp fyri í størri mun at leiða ein part av ferðsluni norðan- og vestaneftir uttan um býin. Tá Sandoyartunnilin er skotin ígjøgnum og báðir partar av innkomuvegnum eru gjørdir, kann ferðsla sunnaneftir eisini koyra uttan um býin á veg norður- ella vestureftir.

### Sandoyartunnilin

Undirsjóvartunnilin knýtir Sandoynna fasta í meginpartin av føroyska vegakervinum og er 10,9 kilometra langur. Fyrsta skotið í Sandoyartunilinum var latið í Traðardali 27. juni 2019.

Sandoyartunnilin kemur upp í Traðardali millum Skopun og Sand, og streymoyarmegin kemur hann upp á Gomlurætt. Ferðingin millum Streymoynna og Sandoynna verður munandi stytt; men størsti fyrimunurin er, at fólk tá kunnu ferðast alt samdøgrið. Eftir ætlan verður koyrandi ígjøgnum tunnilin í desember 2023.

Mett verður, at 300-400 bilar fara at koyra gjøgnum tunnilin um samdøgrið. Verður farið undir at gera ein Suðuroyartunnil, skal tann ferðslan leggjast afturat, og fara tá munandi fleiri bilar at koyra gjøgnum tunnilin um samdøgrið.

### Suðuroyartunnil

Landsstýrið og Tunnilsfelagið arbeiða við uppskoti til ein Suðuroyartunnil. Hesin kemur í framtíðini at ávirka ferðsluna og skipanina av veganetinum í Tórshavnar kommunu, og tí er ynskiligt, at Tórshavnar kommuna gerst partur av hesi tilgongd

## 4.4.3 GRØN FERÐSLA

Tórshavnar kommuna ynskir at stuðla undir, at munandi fleiri borgarar ganga, súkkla ella velja bussleiðina fram um bilin. Tað skal vera lætt at vera virkin og taka lut í samfelagnum uttan at brúka bil. Hetta er lýst undir ‘Mál 2’ í Grønu Leiðini, sum er Umhvørvispolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu.

Til tess at røkka hesum málinum ger Tórshavnar kommuna átøk, sum kunnu stuðla undir, at fleiri velja grønu leiðina.

### Gøtuskipan

Gøturnar eru týðandi partur av uttandura frítíðarvirkseminum í kommununi. Verandi gøtur eru gjørdar yvir eini 30 ár, og arbeitt verður við at víðka munandi um hesar. Kommunan arbeiðir við at gera eina samanhangandi og lætt atkomuliga gøtuskipan í og kring Havnina, soleiðis at tað skal gerast dámligt og áhugavert at ferðast hjá fólki til gongu og á súkklu.

Nógvar gøtur eru í Havn, soleiðis at borgarar kunnu ferðast trygt millum býlingar og út í lendið kring býin. Hetta er serliga galdandi í nýggju býarpørtunum, har rúm hevur verið fyri at leggja gøturnar til rættis. Í eldri býarpørtum eru gøturnar ikki eins samanhangandi. Tó ber til at ferðast trygt í hesum økjum eftir gøtum og vegum við lítlari ferðslu.

Í Tórshavn verður arbeitt við verkætlanini 'Gøtan kring havnina', hvørs endamál er at binda gøturnar saman í ein ring kring Havnina. Gøturnar eru til fleirnýtisendamál, so sum gongutúrar, renning, rossagøta, súkkling og so framvegis, tó ikki til motordrivnar súkklur og akfør.

Á kortinum síggjast útbygdar gøtuskipanir í Havn, umframt at stiplaða linjan vísir ætlaðu leiðina á verkætlanini 'Gøtan kring havnina'. Hetta er áhaldandi arbeiði. Nakrar av hesum gøtunum, sum tilsamans skulu verða ‘Gøtan kring havnina’ eru gjørdar, meðan aðrar gøtur eru eftir at fremja í verki.

Upplivingin av gøtunum verður støðugt víðkað við at gera eina røð av virknis- og vitjanarstøðum á rutuni. Hetta fyri at leggja dent á teir fjøltáttaðu møguleikarnar, sum eru í kommununi fyri fólk í øllum aldri, sum bæði geva møguleika fyri rørslu og frálíkari náttúruuppliving.

Teir grønu frílendiskílarnir eru óbygd øki, skipað við gøtum, og eru til uppihald og frítíðarítriv. Ansast skal væl eftir teimum virðum, sum har eru, tá nýggj býarbygging verður skipað. Tá gøtuskipanin verður útbygd, skal atlit takast til markviðurskifti, staðlýsing og planting.

Kommunan arbeiðir støðugt við at økja um útboðið av gøtum. Gøturnar skulu merkjast, og kommunan eigur at kunna borgarar, tilflytarar og ferðafólk um gøturnar við skelting og faldarum.

**Kort av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu sæst inni á www.torshavn.fo.**




• Viðmerkjast skal at allar gøtur eru ikki eru á hesum kortinum, víst verður til heimasíðuna www.torshavn.fo.

## Gongu- og súkklubreytir

Gongubreytir eru gjørdar fram við flestu vegum í Havn, umframt at fleiri gøtur eru gjørdar og fleiri verða gjørdar millum býlingarnar og í ymsu fríøkjunum í kommununi.

Fyri at betra um ferðslutrygdina og at gera tað høgligari at ferðast á annan hátt enn í bili, eru ávísir menningarmøguleikar við at gera gongu- og súkklubreytir fram við vegnum.

Alsamt fleiri og fleiri velja at súkkla heldur enn at koyra í bili. Kommunan hevur í støðum gjørt súkklubreytir, men væntar enn eina samanhangandi súkklubreytaskipan, og tí verður ofta súkklað á vegnum ella á gongubreytini. Hetta er ein ótrygg ferðsluloysn á stóru vegunum, serliga har ferðsluhámarkið er upp í 80 km/t.

Kommunan hevur samtykt, at tá umvælingar verða gjørdar á vegum skal atlit takast til súkklandi og gangandi. M.a. skulu gongu- og súkklubreytir gerast framvið vegunum, har tað er møguligt. Somuleiðis skal atlit takast til atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum.

Harumframt arbeiðir kommunan við eini verkætlan, har Tórshavnar kommuna miðvíst og yvirskipað skal leggja til rættis, so Havnin verður ein góður súkklubýur. Í hesum sambandi skal heildarætlan fyri burðardygga ferðslu gerast, sum m.a. skal lýsa súkklukervið nærri. Bygdirnar í kommununi verða eisini partur av hesi ætlan.

Málið hjá býráðnum er, at gangandi og súkklandi fáa munandi tryggari umstøður í ferðsluni.

## Bussleiðin

Almenna samferðslan í Tórshavnar kommunu er á høgum stigi. Tann 1. apríl 2019 kom nýggj ferðaætlan fyri Bussleiðina í gildi, sum útbyggir bussleiðina munandi við fleiri leiðum, fleiri fráferðum, at bussarnir koyra longri út á kvøldið í vikuskiftinum, umframt at bussarnir nú eisini koyra sunnudagar.

Tað er gjaldfrítt at fara við bussinum. Kommunan ynskir at varðveita hesa skipan í framtíðini sum eina góða tænastu til allar borgarar í kommununi. Góð almenn flutningstænasta skal verða tryggjað við at tillaga bussleiðina, so hon koyrir út í nýggju býarvakstrarøkini, so hvørt sum økini verða gjørd liðug. Tá farið verður í holt við at skipa byggingina í økjunum, eigur at verða hugsað um, at tað ikki skal vera langt at ganga til busssteðgistøðini.

Málið er at Bussleiðin skal vera eitt veruligt alternativ til at ferðast við bili.


1
2
3
4
RINGLEIÐIN
5
6
7
8
Til Kollafjarðar
og Kaldbaks
Sandvíkarhjalli
Hvítanes
HOYVÍK
Løgmannabreyt
Millum Gilja
Hoyvíkar
skúli
Undir Brúnni
Hoydalar
Tórsbreyt
Svimjihøllin
Á Hálsi
Eysturskúlin
SMS
TÓRSHAVN
Steinatún
Farstøðin
Glasir
Vesturkirkja
Landssjúkrahúsið
Norðasta Horn
Til Velbastaðar
og Kirkjubøar
Smiðjugerði/
Velbastaðvegur
AB vøllurin
ARGIR
Hamarin


GRUNDARLAG
Norðuri í Sundi
skúlin
KOLLAFJØRÐUR
SIGNABØUR
KALDBAK
skúlin
Kaldbaksbotnur
Fríkúlin
Til Havnar
Til Havnar
skúlin
VELBASTAÐUR
KIRKJUBØUR
við kirkjuna
6
7
8

## 4.4.4 TEKNISKAR VEITINGAR

Tekniskar veitingar teljast millum kjarnu-uppgávurnar hjá kommununi.

Neyðugt er tí áhaldandi at viðlíkahalda og útbyggja teknisku leiðingarnar í kommununi.

Ruskinnsavning og burturbeining av ruski er eisini ábyrgd hjá kommununi. Í Tórshavnar kommunu er tað Kommunala Brennistøðin, ið stendur fyri hesum.

Harumframt veitir Fjarhitafelagið fjarhita til sethús, vinnulív og almennar stovnar í býnum. Fjarhitafelagið gagnnýtir avlopshita frá Brennistøðini á Hjalla og frá EL-verkinum á Sundi.

### Vatnveiting

Kommunan veitir húsarhaldum, virkjum og stovn-um um 4,2 milliónir tons av brúksvatni um árið. Regnvatn verður savnað í størri og smærri vatn-brunnar/byrgingar, og síðani leitt inn á eitt av teimum 15 reinsiverkunum. Størstu byrgingar og vatnverk eru tey í Villingadali og Havnardali. Hesar byrgingar rúma áleið 500.000 $m^3$ av vatni hvør, og rensa hesi vatnverk ávikavist uml. 2,1 og 0,9 milliónir tons um árið. Hesir báðir brunnar veita alt vatnið til Havnar, Hoyvíkar, Hvítanes og inn á Hjalla. Vatnskorpan á brunnunum er so mikið høg í lendinum, í Villingadali 274 m yvir havinum, at vatnið rennur av sær sjálvum til allar býarpartar. Á Argjum er tó neyðugt at pumpa vatnið niðan til nýggjastu býlingarnar.

Meginparturin av øllum reinsaðum vatni kemur úr brunninum í Villingadali, meðan reinsiorkan í Havnardali er meira avmarkað.

Mett verður, at nóg mikið av vatni er til at nøkta núverandi tørv. Men fyri áhaldandi at kunna nøkta tørvin á reinsaðum drekkivatni til borgarar, virki og stovnar í Hoyvík, Tórshavn, Argjum og á Norðasta Horni, við atliti at øktum virksemi og stórum býarvøkstri, kann skjótt verða neyðugt við útbyggingum.

Møguleiki er t.d. at økja vatngoymsluna í Villingadali við 250.000 $m^3$, sum svarar til eina øking á 50 prosent, við at hækka byrgingina við tveimum metrum.

Í Havnardali er nóg mikið av vatni, men avmarkað reinsiorka. Við einum nýggjum vatnreinsiverki til vatnbrunnin í Havnardali ber tí til at økja mun-andi um veitingina av reinsaðum vatni.

Av øðrum møguleikum er eisini at menna vatn-veitingina við at seta upp vatnmátarar, sum halda eyga við, hvussu nógv vatn verður veitt gjøgnum ymsu leiðingarnar, og sum eisini kann geva skjótari ábendingar um møguligar smærri ella álvarsligari lekar.

Bygdirnar hava egnar vatnbrunnar og vatnreinsi-verk, sum vanliga veita nóg mikið av vatni. Tó kunnu avbjóðingar vera, tá óvanliga turt er gjøg-num longri tíð um summarið.



Vatnveiting
Høvuðsleiðing


Kloakkskipan
Leiðingar

## Kloakkir

Galdandi umhvørvislóggáva ásetur, at alt spillivatn og yvirflatuvatn verður leitt burtur í serleiðingum. Tilsamans eru umleið 470 km av spillivatnsleiðingum í Havn. Ásett er í landslóg um spillivatn, at allar kommunur skulu skipa og leiða spillivatn út á sjógv. Í ávísum økjum er spillivatnsskipanin ikki heilt nøktandi, og arbeitt verður støðugt við at viðlíkahalda og bøta um skipanina, serstakliga í teimum økjum, sum í dag ikki lúka umhvørviskrøvini. Spillivatnsleiðingarnar í bygdunum eru eisini serleiðingar.

**Spillivatn**
Í dag verður spillivatnið í Tórshavnar kommunu einans reinsað við mekaniskari reinsan, t.v.s. at bara bitlar verða afturhildnir og øll loyst evni fara óviðgjørd út. Í nøkrum økjum hevur hvørt hús sín egna rottanga, meðan í øðrum økjum eru fleiri hús felags um smá mekanisk reinsiverk.

Í 2009 komu nýggj krøv á spillivatnsøkinum, sum krevja

- Kortlegging av øllum spillivatnsleiðingum og skráseting av, hvørjum tilfari leiðingarnar eru gjørdar av

- At alt spillivatnið verður leitt út á streymasjógv. Einki skal renna í áir og vøtn ella út í havnarøki, har lítil útskifting er av sjógvi

- At útleiðingar verða savnaðar í størri útleiðingar. Nógvar smærri útleiðingar hava verið vanligar. Miðað eigur at verða ímóti at samla hesar í ein tunnil, sum leiðir vatnið gjøgnum eitt nýmótans reinsiverki, har spillivatnið verður mekaniskt, biologiskt og kemiskt reinsað, soleiðis at mikroplast, evnafrøðilig evni, medisinrestir o.a. verður reinsað úr, áðrenn restin verður leitt út á streymasjógv.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at skilja spillivatn og yvirflatuvatn við at leiða spillivatnið í stongdum PP-rørum út á streymasjógv, meðan yvirflatuvatnið verður leitt til áir.

Nógvar kloakkir eru tíverri í ógvuliga ringum standi. Tí verða flestu pengar brúktir til at "sløkkja eldar", eitt nú tá kloakkir brotna. Tað merkir sostatt eisini, at minni peningur er til at arbeiða miðvíst frameftir við eini burðardyggari kloakkskipan.

Ynskiligt er at gera ein stóran spillivatnstunnil gjøgnum Havnina, sum kann savna og leiða spillivatnið út á Glyvursnes. Tá spillivatnið er savnað úti á Glyvursnesi, er møguligt at byggja eitt spillivatnsverk, sum kann reinsa fastar bitlar og onnur skaðilig evni úr vatninum, áðrenn tað verður leitt út á sjógv.
Hetta hevði veri ein sera kostnaðarmikil verkætlan og stig er tí ikki tikið til at gera ítøkiliga ætlan.

> Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU VERÐUR ARBEITT VIÐ AT SKILJA SPILLIVATN OG YVIRFLATUVATN VIÐ AT LEIÐA SPILLIVATNIÐ Í STONGDUM PP-RØRUM ÚT Á STREYMASJÓGV, MEÐAN YVIRFLATUVATNIÐ VERÐUR LEITT Í ÁIR.

**Yvirflatuvatn**
Vanliga seyrar tað mesta av regninum gjøgnum bleytar yvirflatur sum bø og onnur grøn øki og er tá sjáldan ein trupulleiki. Hinvegin eru sera nógvar harðar yvirflatur í býum í dag, eitt nú vegir, parkeringspláss og tekjur. Regnið seyrar ikki gjøgnum hørðu yvirflaturnar og má tí leiðast út í áir sum yvirflatuvatn.

Hørðu yvirflaturnar gerast fleiri, so hvørt sum vit byggja. Týdningarmikið er tí at hava virðing fyri stóru regnmongdunum, tá bygt verður. Nógva vatnið kann gera stóran skaða á bygningar, lendi og býarøki, og skulu neyðug atlit tí takast, tá útstykkingar verða gjørdar og tá bygt verður. Møguleikar eru fyri, at yvirflatuvatn kann seinkast við færri hørðum fløtum og grúskílum fram við húsaveggjum, sum vatnið frá takgreinum kann seyra niðurí.

Í Tórshavnar kommunu verður yvirflatuvatnið ofta leitt í somu rørum sum spillivatnið. Arbeitt verður við at skilja spillivatn og yvirflatuvatn við at leiða spillivatnið í stongdum PP-rørum út á streymasjógv, meðan yvirflatuvatnið verður leitt í áir.

At lata yvirflatuvatn út í áir er tó ikki uttan trupulleikar. Um veturin slítast vegir av nýtsluni av píkum, umframt av salting av vegunum. Ein onnur dálkingarkelda er tað, ið rennur úr privatum túnum eftir bilvask, máling o.a. Tí samtykti býráðið í 2005 at áleggja umsitingini at skipa so fyri, at dálkað yvirflatuvatn verður reinsað so nær dálkingarkelduni sum gjørligt, so reina yvirflatuvatnið verður leitt út aftur í áir og vøtn.

Leiðingarnar eru ofta lagdar í nærmastu á, og áin er síðan løgd í rør og undir jørð. Tórshavnar kommuna arbeiðir við at lata áirnar upp aftur. Tá áir liggja í rørum, verður uppihaldstíðin hjá vatninum minni, av tí at vatnið rennur skjótari ígjøgnum. Tískil kemur nógv trýst á, sum kann elva til vatnskaðar.

Ein máti at verja seg ímóti hesum er at halda vatninum so leingi sum møguligt á fyrsta staðnum. Tí er ynskiligt at arbeiða fram móti einum leisti um at hava fyrivarni við at lata áir aftur, bæði fyri at verja seg móti vatnskaða men eisini fyri at varðveita tær sjónligu áirnar í býnum.

Alt ov oftani henda tíverri vatnskaðar á lendi og bygningar, tá áir leypa, av tí at tær ikki megna at svølgja stórar mongdir av regni uppá stutta tíð. Ein máti at fyribyrgja hesum er at dýpa áirnar og soleiðis økja rúmdina. Hetta er gjørt við eitt nú Hoydalsá, og soleiðis er tann fyrrverandi trupulleikin við yvirflóð á fløtuni í Hoydølum loystur.






# Fjarðhitaskipan

## Fjarhitaskipanin

Fjarhitafelagið veitir fjarhita til húski og virki í kommununi. Støðugur vøkstur hevur verið í talinum av fjarhitabrúkarum. Í 2013 vóru 991 brúkarar knýttur í fjarhitanetið í høvuðsstaðnum, meðan talið í 2019 er umleið 1300 brúkarar.

Í dag er fjarhitaveiting mest útbygd í norðara parti av Hoyvík, tó at fjarhitaleiðingin nú er bygd út eitt nú til Blómubrekku og oman í Gundadal, har eitt nú Svimjihøllin, Hotel Brandan, Hotel Hilton og Bank Nordik er knýtt uppí. Eisini er fjarhiti nú lagdur oman eftir Hoydalsvegnum. Hetta hevur latið upp fyri, at eitt nú SMS og Apotekið eru knýtt í Fjarhitanetið, eins og nærn-ingaheimið Finsen, umframt nýggja politistøðin, sum verður bundin í seinni í ár. Fjarhitaleiðingar eru eisini lagdar, soleiðis at klárt er at knýta Glasir, Skúlan á Fløtum og Musikkskúlan upp í Fjarhitanetið, tá netið verður útbygt til Vestur-býin. Somuleiðis er klárt at knýta fjarhita í byggingina Undir Kongavarða og Við Klingurs-tjørn, tá netið er útbygt hagar.

Fjarhitin verður í høvuðsheitum framleiddur á kommunalu brennistøðini á Hjalla, hagani 84 prosent av hitanum varð framleiddur í 2018. Fjarhiti verður eisini framleiddur á EL-verkinum hjá SEV á Sundi. Harumframt er ætlanin, at hiti frá biogassverkinum á Skarðshjalla verður latin inn á fjarhitanetið. Nóg mikið av orku er til fjar-hitaveitingina, sum hon er í dag, og veitingin virkar eftir ætlan. Fjarhitaveitingin er fíggjað við brúkaragjaldi.

Arbeitt verður støðugt við at byggja út fjarhita-skipanina, og brúkaratalið væntast framhaldandi at vaksa. Ætlanin er at menna skipanina, so hon kann røkka einum størri parti av Hoyvík, Havn og Argjum, enn hon ger í løtuni. Hús og bygningar fara so við og við at kunna knýtast í skipanina, tá leiðingar eru lagdar til aðrar partar av býnum, tó er tað ikki sannlíkt at fjarhitakervi kemur at røkka bygdunum í Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna og SEV eiga í felag Fjarhitafelagið.

## Burturkast

Innsavnan og viðgerð av burturkasti í Tórshavnar kommunu verða røktar av Kommunalu brennistøðini á Hjalla.

Arbeitt verur við at útgreina renovasjónsøkið við atliti til fíggjarligu, umhvørvisligu og rakstrarligu viðurskiftini.

**Kommunan kannar m.a. í hesum sambandi:**

- Hvørjir møguleikar eru fyri at víðka verandi virksemi
- Møguligt samstarv ella samanlegging av IRF og kommunalu brennistøðini
- Endurnýtslumøguleikar í mun til sølu og móttøku uttanlands
- Effektivisering av arbeiðsorkuni á økinum
- Betri samskifti og kunning til borgaran í Tórshavnar kommuna

Tó er eingin ítøkilig ætlan orðað í løtuni.

Sambært kunngerð nr. 147 frá 1995 um burturkast hava húski í Tórshavnar kommunu skyldu til at nýta innsavningarskipanirnar hjá kommunustýrinum ella tann avhendingarmøguleika, ið kommunustýrið vísir á. Tað merkir í stuttum, at tað áliggur øllum húskjum at skilja burturkastið í samsvari við endurnýtsluskipanirnar hjá kommununi.

Málið er, at alt, sum kann endurnýtast og endurvinnast, skal skiljast frá tí vanliga húsarhaldsruskinum. Krøv verða tí sett til nýggj bústaðarøki, at pláss skal setast av til ruskstøð, soleiðis at møguleiki er at savna og skilja burturkast á staðnum.

Vinnuburturkast og annað privat burturkast, sum ikki er fevnt av innheintingarskipanini, verður latið inn á móttøkustøðum. Hesi eru Endurnýtslan á Hjalla, Endurnýtslan í Kollafirði, Endurnýtslan í Hesti og Endurnýtslan í Nólsoy. Í Kollafirði, Hesti og í Nólsoy verður bert tikið móti privatum burturkasti.

Í sambandi við burturkast røkir Kommunala brennistøðin hesar uppgávur vegna kommununa, tó at ruskinnsavnanin er útveitt:

- Ruskinnsavnan av burturkasti at brenna, pappi og pappíri og serliga dálkandi burturkasti
- Endurnýtslur
- Brenning av burturkasti
- Skrottviðgerð, íroknað umhvørvisviðgerð av bilum úr øllum landinum
- Tøming og reinsan av rottangum, reinsiverkum og feittbrunnum
- Mold- og tyrvingarpláss, íroknað evjuviðgerð

Endurnýtslan á Hjalla verður nógv vitjað, bæði av borgarum og vinnulívi. Serliga leygardagar er nógv trýst á, tá vanliga einir 900 privatir borgarar í bili koma inn á endurnýtsluna. Nógv trýst er á verandi endurnýtslu, og so hvørt sum størri krøv verða sett til at skilja meira burturkast, veksur tørvurin á øki hjá endurnýtsluni. Møguleiki er at víðka endurnýtsluna suðureftir, til tess at gera meira pláss fyri at skilja burturkast.

Til Endurnýtsluna hoyrir eisini Jarnplássið á Hjalla. Her verður alt jarn pressað saman, áðrenn tað verður avskipað uttanlands. Í 2018 vóru 6000 tons av jarni send til endurvinning. Skrott- og umhvørvisviðgerð av bilum er eisini á Jarnplássinum, og er hendan nøktandi. Einir 1.500 bilar verða skrottaðir árliga.

Brennistøðin á Hjalla koyrir so at siga allar tímar í árinum. Í 2018 brendi í ovninum 92,4% av samlaðu tímunum í árinum. Tá eru bert steðgir í sambandi við viðlíkahald og heiligdagar. Árliga verða umleið 17.000 tons av burturkasti brend, og 17.000 tons av burturkasti er eisini samlaða brenniorkan við verandi ovni.

Flogøska er tað, ið verður reinsað úr roykinum, meðan ilska er t.d. glas og jarn, sum ikki brennur. Ilskan verður tyrvd í Føroyum, meðan flogøskan verður viðgjørd og tyrvd uttanlands. Í 2018 vóru umleið 2.000 tons av ilsku og 400 tons av flogøsku framleidd.

Tyrvingin fatar um asbest, ilsku, burturkast, ið ikki kann brennast t.d. gips, glas- og steinull, glas, postalín, og oljudálkaða mold. Árliga verða umleið 4.000 tons tyrvd. Samstarv er fingið í lag við IRF um nýtt felags tyrvingarpláss.

Mold- og avgrevstrarmóttøkan tekur móti umleið 55.000 m3 um árið. Núverandi øki í Húsahaga er fult, og tí er tørvur á at finna meira pláss til at taka móti mold- og avgrevstri.

Árliga verður tikið ímóti upp til 1.600 tonsum av spillvatnsevju frá 5.000 rottangum og 125 reinsiverkum í Tórshavnar kommunu. Samstarv er fingið í lag við IRF um móttøku og viðgerð av spillivatnsevju og aðrari evju.

Umframt at taka móti spillivatnsevju frá rottangum og reinsiverkum er tørvur á eini tømingarstøð til kampingvognar, soleiðis at kampingvognar og bilar kunnu tøma spillivatnstangarnar, meðan tey ferðast í Føroyum og áðrenn fráferð úr Føroyum aftur.

Burturbeiningarskipanin í Tórshavnar kommunu er fíggjað við brúkaragjaldi og skatti. Fyri at fylgja við menningini og einum vaksandi tørvi á at skilja, endurnýta og brenna, verður komandi árini tørvur á at vaksa um møguleikarnar viðvíkjandi:

- Nýggjari brennistøð ella útbygging av verandi brennistøð á Hjalla
- Víðkan av øki til endurnýtsluna á Hjalla
- Nýggjum evjuplássi til rottangaevju
- Nýggjum tyrvingarplássi
- Nýggjum mold- og avgrevstrarplássi
- Tømingarstøð til kampingvognar

## Kirkjugarðar

Tórshavnar kommuna varðar av 12 kirkjugørðum í kommununi. Kommunan skal tryggja at nóg mikið av plássi til gravir, soleiðis at gravarpláss altíð eru tøk.

**Kirkjugarðarnar eru:**
- Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin
- Kirkjugarðurin á Svínaryggi
- Kirkjugarðurin í Kaldbak, gl. og nýggi
- Kirkjugarðurin í Kollafjørður, gl. og nýggi
- Kirkjugarðurin í Nólsoy, gl. og nýggi
- Kirkjugarðurin í Kirkjubø, gl. og nýggi
- Kirkjugarðurin í Hesti
- Kirkjugarðurin í Hoyvík

Uttanum Dómkirkjuna, á Tinganesi og í Koltri eru kirkjugarðar frá gamlari tíð.

Høvuðsuppgávan hjá kommununi er at útvega nóg mikið av plássi, at skipa kirkjugarðarnar, at syrgja fyri, at gravari er, umframt at røkja og viðlíkahalda kirkjugarðarnar. Hesar uppgávur eru í dag partvís útveittar.

Størsti kirkjugarðurin í kommununi, við Velbastaðvegin í Havn, verður víðkaður við uml. 11.000 m2, og var fyrsta byggistig av víðkanini liðugt í 2019.

Nýggjur kirkjugarður er gjørdur við Stórutjørn í Hoyvík. Eitt øki á tilsamans uml. 26.500 m2 er lagt av til kirkjugarð í Hoyvík, íroknað øki til framtíðar víðkan av kirkjugarðinum. Fyrsti parturin av kirkjugarðinum var liðugur og kirkjugarðurin tikin í nýtslu á sumri í 2019.

Umframt at taka sær av sjálvum kirkjugørðunum hevur kommunan eisini ábyrgd av at føra yvirlit yvir, hvørji fólk eru jarðaði og hvar tey liggja. Tórshavnar kommuna arbeiðir við at gera eitt talgilt yvirlit yvir kirkjugarðarnar, soleiðis at til ber at reika á netinum og leita eftir grøvum í kirkjugørðunum í kommununi. Talgilt yvirlit yvir kirkjugarðarnar við Velbastaðvegin og í Hoyvík eru tøk. Arbeitt verður við at fáa talgilt allar kirkjugarðarnar.

Arbeitt verður við at gera reglugerð fyri kirkjugarðarnar í kommununi við lýsingum av ábyrgdarbýti, tænastu- og røktarstøði og nýtslu av kirkjugørðunum.

# **MENTAN**, FRÍTÍÐ OG **ÚTILÍV**

# 5.0 >

# MENTAN, FRÍTÍÐ OG ÚTILÍV


| | | |
|---|---|---|
| **5.1** | **LÝSING** | 143 |
| **5.2** | **LEIÐREGLUR** | 146 |
| 5.2.1 | Stuðul | 147 |
| **5.3** | **KARMAR** | 148 |
| 5.3.1 | Lógir á økinum | 148 |
| 5.3.2 | Byggisamtyktir | 149 |
| 5.3.3 | Politikkir og ætlanir | 149 |
| | Umhvørvispolitikkur | 149 |
| | Frítíðar- og ítróttapolitikkur | 149 |
| | Miðbyarætlan | 149 |
| **5.4** | **GRUNDARLAG** | 150 |
| 5.4.1 | Mentan og frítíð | 150 |
| | Mentanarmiðdepil í Tórshavn | 151 |
| | Tjóðpallur Føroya | 151 |
| | Bókasøvn | 152 |
| | Søvn | 152 |
| | Tórshavnar Musikkskúli | 152 |
| | Tórshavnar Kvøldskúli | 152 |
| 5.4.2 | Ítróttur | 154 |
| | Hallir og vøllir | 154 |
| | Stórhøll við Stórutjørn | 154 |
| | Fótbóltshøll | 155 |
| | Golfvøllur | 155 |
| | Kappróður | 155 |
| | Ríðing | 156 |


FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU >

# MENTAN, FRÍTÍÐ OG ÚTILÍV FRAMHALD

**( 5.4 GRUNDARLAG )**


Telving og kortspæl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 156
Bogaskjóting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 156
Klintring, rennifjøl, rennihjól, rulluskoytu,
buldring, parkour . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 156
Fjallasúkklubreyt og motocrossbani . . . . . . . . . . . 157
Skótahús- og øki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 157
Skíðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 157
5.4.3 Grøn frítíðarøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 158
Gøtuskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 158
Spælipláss og bóltvøllir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 160
Frílendisætlan fyri Havnardal . . . . . . . . . . . . . . . . 160
Frílendisætlan fyri Boðanes – Hoydalar . . . . . . . . 161
Útferðarstøð nær býnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 161
5.4.4 Blá frítíðarøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 162

# 5.1 LÝSING >

RÍKT OG FJØLBROYTT MENTANARLÍV, FRÍTÍÐARLÍV OG ÚTILÍV SKAPAR TRIVNAÐ OG EGGJAR ØLLUM BORGARUM TIL EITT VIRKIÐ, SKAPANDI OG HUGVEKJANDI LÍV

**Evnið Mentan, frítíð og útilív** snýr seg um, hvussu mentan, útilív og frítíðarvirksemi eru skipað í kommununi, uttandura eins væl og innandura. Tað snýr seg um, hvørjir mentanarmøguleikar eru í kommununi og hvørjir møguleikar eru innan frítíðarvirksemi og útilív.

## Vit virka fyri

**Mentan og frítíð**

- at skapa góðar karmar fyri mentan, frítíð og útilívi
- at geva eitt javnt býti av tilboðum og góðar atkomumøguleikar fyri øll
- at gera íløgur í mentan, frítíð og list
- at karmarnir fyri ítrótti verða áhaldandi útbygdir, bæði fyri breiddina og úrvalsítrótt
- at skapa góðar karmar fyri útilívs- og frítíðarvirksemi
- at høvuðsstaðurin skal kunna hýsa enn fleiri altjóða kappingum
- at trivnaður og frítíðarvirksemi eru nøktandi fyri ung og eldri

**Grøn frítíðarøki**

- at skapa samanhang millum grøn øki og samband til hagan
- at býarmenning skapar spennandi og góðskurík grøn býarøki
- at tryggja fjølbroytt fríøki í bústaðarøkjum og ymisku býarpørtunum
- at tryggja fjølbroyttar og ríkar upplivinga í býi og bygdum
- at varðveita og menna áhugavert landslag og mentanarligu virðini í býi og bygdum

FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU >

## 5.1 LÝSING FRAMHALD

- at menna fríøki nær við bústaðarøki, sum geva fólki lætta og skjóta atgongd til at íðka og ganga; hetta til tess at fyribyrgja m.a. lívsstílssjúkum, hjarta-æðrasjúku, fiti og strongd
- at kunna um virðini í náttúruni, sum eru í kommununi

**Blá frítíðarøki**

- at tryggja møguleikar fyri frítíðarvirksemi á sjógvi og við sjóvarmála
- at fremja bæði stilt og meira virkið virksemi á sjógvi og við sjóvarmála
- at skapa samanhangandi gøtur, sum eisini ganga fram við fjøru og bryggjukanti
- at stuðla undir nýtt og fjølbroytt virksemi á sjógvi og við sjóvarmálan
- at skapa tryggar karmar fyri ítróttarligum virksemi og frítíðarvirksemi á sjónum





# 5.2 LEIÐ-REGLUR

MENTAN, FRÍTÍÐ OG ÚTILÍV ERU TÝDNINGARMIKLIR PARTAR AV GERANDISLÍVINUM HJÁ NÓGVUM BORGARUM. TÓRSHAVNAR KOMMUNA SKAPAR KARMAR OG SKIPAR NÓGV AV TEIMUM TILBOÐUNUM, IÐ ERU TIL BORGARAR, SERLIGA Á FRÍTÍÐAR- OG ÚTILÍVSØKINUM. HESAR LEIÐREGLUR VERÐA NÝTTAR, TÁ UM MENTAN, FRÍTÍÐ OG ÚTILÍV RÆÐUR.



Í Tórshavn og í bygdunum verða eftir umstøðunum løgd øki til almenn endamál, eitt nú til mentan, ítrótt, frítíð og útilív annars.

Innan mentan, frítíð og útilív er neyðugt at hava eina røð av hentleikum og stovnum. Dentur verður lagdur á at miðsavna í deplar, har tað gevur fyrimunir, og annars tryggja ávísa spjaðing av anleggunum. Neyðugt er at hava miðvíst viðlíkahald fyri at tryggja góðskuna av anleggunum.

Uttandura anlegg verða, í tann mun tað ber til, løgd í innangarðsøki, um tað er sambærligt við verndaráhugamál og onnur býarskipanarlig atlit.

Málið er, at slík anlegg so nógv sum til ber kunnu brúkast til ymisk endamál og verða alment atkomulig. Tá anlegg verða løgd innangarðs, skal dentur verða lagdur á at hugsa um óljóð og ljós, og at bygging skal avmarkast og tillagast, soleiðis, at fyrilit verður sýnt nærumhvørvinum. Harumframt skulu nøktandi atkoma og parkeringsviðurskifti tryggjast í sambandi við ítróttaranlegg og mentanarstovnar.

Øki verða løgd av til almenn endamál við støði í framtíðar anleggum til mentan og frítíð. Tórshavnar kommuna arbeiðir samstundis miðvíst við eini samanhangandi gøtuskipan kring allan býin í Havn, eins og millum býlingar og býarpartar, sum skal eggja fólki til rørslu og útilív. Ætlanin er, at teinurin er avskorin frá bilferðslu, og at hann hevur ymisk sereyðkenni og virksemi at bjóða.

Kommunuætlanin er ein yvirskipaður karmur fyri frítíðarvirksemi, nýtslu og menning av frítíðarøkjunum.

## 5.2.1 STUÐUL

Á mentanarøkinum eru leiðreglur fyri stuðul til mentan, rakstur og íløgur

Á mentamálaøkinum eru nágreiniligar leiðreglur fyri stuðul til mentan, rakstur og íløgur.

**Mentan:** Endamálið við stuðulsskipanunum er at stuðla verkætlanum, tiltøkum og átøkum, sum ríka og menna mentanarlívið í kommununi.

**Rakstur:** Endamálið er, at greina mannagongd og treytir á mentamálaøkinum hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við árligan rakstrarstuðul (ískoyti) til ymiskar felagsskapir, sum ríka og menna mentanarlívið í kommununi og sum stuðla undir visjónina fyri Tórshavnar kommunu.

**Íløgur:** Endamálið er, at stuðla íløgur í bygging, sum ítróttafeløg og frítíðarfelagsskapir standa fyri.



# 5.3 KARMAR

FYRI EVNIÐ MENTAN, FRÍTÍÐ OG ÚTILÍV ERU SERLIGA HESAR LÓGIR OG POLITIKKIR, IÐ SKULU TAKAST VIÐ Í SAMBANDI VIÐ ARBEIÐIÐ AT MENNA ØKIÐ Í KOMMUNUNI.

## 5.3.1 LÓGIR Á ØKINUM

- Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir
- Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m.
- Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum
- Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a.
- Løgtingslóg um landsvegir
- Løgtingslóg um umhvørvisvernd
- Løgtingslóg um verju av havumhvørvinum
- Løgtingslóg um náttúrufriðing
- Løgtingslóg um viðarlundir
- Løgtingslóg um landsjørð

## 5.3.2 BYGGISAMTYKTIR

Við heimild í lóggávuni um býarskipanir og byggisamtyktir nýtir Tórshavnar kommuna byggisamtyktir til at stýra hvussu alt øki í kommununi skal skipast og gagnnýtast. Byggisamtyktirnar lýsa galdandi ásetingar fyri øki í mun nýtslu, bygging vm., og eru ein fortreyt fyri at ein ætlan kann fremjast á einum øki, t.d. um útstykking ella bygging kann loyvast. Tórshavnar kommuna deilir byggisamtyktirnar í tveir partar

- **Almenna byggisamtyktin, sum fevnir um alt í øki í kommununi**
- **Serstakar byggisamtyktir, sum fevna um ávís avmarkað øki.**

Byggisamtyktirnar eiga at samsvara við kommunuætlanina umframt aðrar ætlanir og politikkir í kommununi, og skulu tryggja at neyðug atlit verða tikin í mun til býarskipan.

**Allar byggisamtyktir eru tøkar á heimasíðuni www.torshavn.fo.**

## 5.3.3 POLITIKKIR OG ÆTLANIR

### Umhvørvispolitikkur

Umhvørvispolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu hevur eisini stóran týdning fyri evnið Mentan, frítíð og útilív. Umhvørvispolitikkurin er ein politisk ætlan, har kommunan tryggjar, at fyrilit verður sýnt umhvørvinum; hetta verður gjørt við at leggja dent á orkunýtslu frá reinum varandi orkukeldum, við at minka um orkunýtslu og útlát og við nýhugsan og nýskapan at raðfesta eina grøna framtíð. Ein partur av umhvørvispolitikkinum er eisini at eggja fólki til at ganga og røra seg meira, eitt nú við at skapa góðar karmar fyri einum virknum útilívi og við at skapa samanhangandi gøtuskipanir í býnum.

### Frítíðar- og ítróttapolitikkur

Ein frítíðar- og ítróttapolitikkur verður orðaður og verður hesin grundarlag undir arbeiðinum hjá kommununi á mentamálaøkinum, innan frítíð og ítrótt. Frítíðar- og ítróttapolitikkurin er eitt yvirskipað boð uppá, hvussu økið framyvir skal umsitast og mennast. Við einum politikki innan frítíð og ítrótt verður fokus sett á virknar borgarar og sosialar felagsskapir.

Høvuðsboðskapurin við einum slíkum politikki er, at øll, ið búgva í Tórshavnar kommunu, skulu hava møguleika at luttaka í onkrum virksemi ella felagsskapi, og at eitt nú børn og ung hava góðar virkisumstøður og á tí støði, ið hóskar til teirra. Tórshavnar kommuna vil styðja undir framhaldandi menning, har ljós verður varpað á umstøður og ágóðar av hesum, og vil somuleiðis tryggja góðar upplivingar, trivna og heilsufremjan fyri okkara borgarar við at stimbra átøk ella skipanir, ið kunnu menna virksemi innan ítrótt og frítíð.

### Miðbýarætlan

Í 2016 tók Tórshavnar kommuna stig til at evna eina miðbýarætlan. Í ætlanini verður sett orð á ynski hjá Tórshavnar kommunu um at víðka og betra um miðbýin, og samstundis varðveita upprunalig snið við atliti at bygging og landslagi, herímillum Tinganes og virksemið á havnarlagnum, so leingi tí er lív lagað. Somuleiðis verður sett orð á møguleikar at byggja hægri og tættari og á tann hátt geva rúmd fyri spennandi arkitekturi í miðbýnum. Miðbýarætlanin er stýrandi amboðið fyri menningini í miðbýnum.

# 5.4 GRUNDAR-LAG

HER VERÐUR LÝST GRUNDARLAGIÐ UNDIR EVNINUM MENTAN, FRÍTÍÐ OG ÚTILÍV. HER VERÐUR Í SMÆRRI LUTUM GREINAÐ, HVAT ER Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU Á HESUM ØKI, HVUSSU TAÐ VERÐUR BRÚKT Í LØTUNI OG HVØRJAR ÆTLANIR ERU FYRI FRAMTÍÐINA Á HESUM ØKI.

## 5.4.1 MENTAN OG FRÍTÍÐ

Tórshavnar kommuna ynskir at stuðla undir eitt virkið mentanar- og frítíðarlív fyri yrkis- og áhugafólk og fyri skipað og sjálvskipað virksemi. Kunning um teir mongu møguleikarnar innan mentan og náttúru skal eisini breiðast út. Endamálið er at geva borgarunum ríkar møguleikar fyri mentanarligum upplivingum og frítíðarvirksemi.

Tórsgøta er mentanargøtan í miðbýnum í Havn. Mentanargøtan strekkir seg frá sjónleikarhúsinum og oman til torgið á Vágsbotni, har leiðin býtir seg í tvey, yvir móti neystunum undir Bakka og yvir móti Müllers pakkhús. Á leiðini eru hesi mentanartilboðini og –støðini at finna:

- **Sjónleikarhúsið**
- **Finsen**
- **Tilhaldið**
- **Grasagarður**
- **Margarinfabrikkin**
- **Tjóðpallur Føroya**
- **Posthúskjallarin**
- **Reinsaríið**
- **Perlan**
- **Ostahúsið**
- **Müllers Pakkhús**

Umframt frítíðartilboð, sum Froskmannafelagið og Kajakfelagið bjóða undir Bakka

Mentanar- og frítíðartilboðini verða dúgliga nýtt av borgarum í kommununi. Hetta gevur borgar-unum eitt virkið lív við upplivingum, rørslu, samveru, sambondum og førleikum.

Tað eru hópatals mentanar-, ítróttar- og frítíðar-feløg í Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna arbeiðir fyri at tryggja eitt breitt og fjølbroytt útboð av frítíðarmøguleikum til allar borgarar. Hetta er eisini galdandi fyri borgarar við serligum tørvi, eins og at bólkar, ið yvirskipað ikki verða umboðaðir nóg væl, skulu sameinast meiri.

Mentanarligu tiltøkini eru við til at savna komm-ununa; tískil er hetta eisini nakað, sum kommunan ynskir at stuðla.

## Mentanarmiðdepil í Tórshavn

Reinsaríið, Perlan og Ostahúsið eru mentanarhøli í miðbýnum í Havn og eru partar av mentanar-gøtuni Tórsgøtu. Støðini eru mentanarlig savning-arstøð; tey eru karmar um fjølbroytt mentanar-tiltøk og frítíðarupplivingar. Ynskið er í enn størri mun at kunna hava tiltøk í Tórsgøtu, í Vágsbotni og undir Bryggjubakka sum ein samlað mentan-argøta.

Perlutún, ið er túnið uttan fyri Perluna við taki yvir, er eitt býarrúm, ið bæði virkar sjálvstøðugt sum mentanarpallur og í sambandi við virksemi í Reinsarínum, Perluni og Ostahúsinum. Aulan í Finsen er nú eisini vorðin partur av mentanar-gøtuni og virkar í dag sum alment mentanarstað, har møguleiki er fyri alskyns konsertum, fram-sýningum og øðrum tiltøkum. Harafturat eru fleiri mentanarlig savningarstøð nærhendis mentanar-gøtuni í Tórsgøtu, so sum Müllers Pakkhús, Lista-høllin í Finsen, Virknishøllin í Finsen, Kongshøll Smiðjan í Lítluvík og Hornahúsið, ið verða nýtt til framsýningar, list og tiltøk, og harumframt eisini til føroyskan dans.

Alt í alt eru hesi – mentanargøtan Tórsgøta, Finsen, Müllers Pakkhús, Smiðjan í Lítluvík og Hornahúsið – ein sameindur mentanarmiðdepil í Tórshavnar kommunu og í øllum Føroyum.

Harafturat eru onnur mentunarstøð so sum Listasavn Føroya og Norðurlandahúsið umframt kirkjur, samkomur og størri og smærri søvn.

## Tjóðpallur Føroya

Tórshavnar kommuna ynskir at vera ein virkin viðleikari til ætlanina at byggja eitt nýtt Tjóðleik-hús Føroya, ein nýggjan Tjóðpall. Á vestara parti av Skálatrøð hevur Tórshavnar kommuna ávíst eitt hóskandi øki til ein komandi Tjóðpall. Hetta kann vera við til at sameina økið millum mentan-argøtuna Tórsgøtu, Vágsbotn og Müllers Pakkhús sum ein veruligan mentanarmiðdepil fyri alt landið.

Tórshavnar kommuna hevur fyri landsmyndug-leikum víst á møguleikar fyri at sameina virk-semið í einum nýggjum Tjóðpalli við eitt møguligt nýtt býarbókasavn í tilbygningi til Tjóðpallin. Soleiðis kunnu hølisavbjóðingar hjá Býarbóka-savninum loysast, samstundis sum tað er við til at skapa lív og virksemi allar dagar kring Tjóðpallin.

Avbjóðingar eru við parkeringsviðurskiftunum í býnum, og verða parkeringsviðurskiftini á Skála-trøð tí tryggjaði saman við bygging av nýggjum Tjóðpalli, t.d. við parkeringskjallara, parker-ingshúsi ella eini samanseting av báðum.

# GRUNDARLAG

## Bókasøvn

Bókasøvnini eru støð, har mentan, vitan, kunning, uppliving, íblástur, virksemi og samvera fara fram. Bókasøvnini stuðla undir lívslanga læring hjá borgaranum, eins og tilevningina av mentan og fólkaræði. Tey eru lokalir kunnleikamiðdeplar, har borgarar kunnu fáa fakliga vegleiðing og ávísingar til at nema sær uppaftur størri vitan. Tórshavnar kommuna hevur sum mál, at bókasøvnini støðugt skulu mennast, soleiðis at tey framhaldandi fylgja við tíðini og eru atkomulig fyri borgaran.

Býarbókasavnið í miðbýnum í Havn er høvuðsbókasavnið í kommununi og virkar sum eitt fólkabókasavn. Umframt hetta eru eisini fólkabókasøvn í skúlanum við Sjógv í Kollafirði og í skúlanum í Nólsoy. Allir skúlarnir hava skúlabókasavn. Kannað verður, í hvønn mun ávís onnur skúlabókasøvn lutvíst eisini kunnu virka sum fólkabókasøvn. Her verður serliga hugsað um Hoyvík og Argir. Hugsanin er at gera royndir við ómannaðum bókasavni, har borgarin sjálvur kann læsa seg inn við bókasavnskorti ella líknandi. Umframt høvuðsbókasavnið og fólkabókasøvnini er Landsbókasavnið á J.C. Svabos gøtu í Havn.

Í nøkur ár hevur ætlanin verið at gera høvuðsumvæling av Býarbókasavninum. Samráðingar eru við landsmyndugleikar um stigvíst at fremja verkætlanina, herundir eisini fígging av verkætlanini.

## Søvn

Fleiri áhugaverd søvn eru í Tórshavnar kommunu, har til ber at nema sær vitan og kunning. Søvnini eru ein týðandi partur av mentanarlívinum og eru støð, har bæði søga og samtíð verða tvinnaði saman.

Eftir at arbeitt hevur verið í longri tíð við at útvega **Tórshavnar býarsavni** tryggar karmar at virka undir, er í 2020 avgjørt at Tórshavnar býarsavn skal flyta inn í gamla musikkskúlan á Frúutrøð 1.

**Sjósavnið** er í Sandágerði. Peningur er settur av til at menna eina nýggja verkætlan um at menna og útbyggja Sjósavnið í økinum, ið er eitt D1 øki. Fleiri atlit skulu tí takast, sum tryggja, at verkætlanin kann virða og hóska seg væl í náttúruvakra umhvørvinum.

Leingi hevur Tórshavnar kommuna eisini havt ynski um at seta øki av til at staðseta **Tjóðsavnið** nærri miðbýnum. Hetta ynskið er framvegis galdandi. Tó so at Tjóðsavnið og kommunan samstarva um at Tjóðsavnið árliga fær høvi til at hava framsýning í onkrum av mentanarhølunum í miðbýnum og soleiðis komma nærri býnum.

## Tórshavnar Musikkskúli

Kommunan hevur Tórshavnar Musikkskúla, sum bjóðar góðar møguleikar fyri tónleikaundirvísing á høgum stigi. Tórshavnar Musikkskúli húsast nú í stásiligum umstøðum í nýbygda musikkskúlanum við Landavegin. Saman við Skúlanum á Fløtum og miðnámsdeplinum Glasir verður hetta økið ein miðdepil fyri útbúgving, ungdóm og menning. Musikkskúlin hevur eisini ymisk tilboð, ið røkka øðrum pørtum av kommununi t.d. Ljóð í Leiki í Skúlanum við Løgmannabreyt.

Tætt tilknýti verður eftir ætlan millum bygningarnar hjá Skúlanum á Fløtum og Musikkskúlan við Landavegin.

## Tórshavnar Kvøldskúli

Tórshavnar Kvøldskúli hevur umleið 3000 næmingar og bjóðar út frítíðarundirvísing í umleið 300 skeiðum. Undirvísingin er býtt í tríggjar partar, tann almenna frítíðarundirvísingin fyri øll yvir 14 ár, tann serstaka frítíðarundirvísingin fyri øll yvir 14 ár og frítíðarvirksemi fyri børn og ung undir 25 ár.

Høvuðshøliskarmarnir hjá skúlanum eru í verandi fólkaskúlum. Harumframt hevur Kvøldskúlin serhølir í Vørðsluni og í M.A. Winthers gøtu 1 og 3.


Mentan og frítíð
Blá frítíðarøki
Mentanardepil
Ítróttardepil

## 5.4.2 ÍTRÓTTUR

Tórshavnar kommuna fevnir um nógv kommunal ítróttaranlegg við høgari góðsku. Hesir karmar skulu áhaldandi útbyggjast og haldast við líka, soleiðis at ítróttar- og frítíðarvirksemi kann fremjast á øllum stigum. Miðað eigur eisini at verða eftir í mestan mun at skipa ítróttaranlegg í ítróttarmiðdeplar, soleiðis at fleiri ítróttaranlegg verða savnaði í miðdeplar og á tann hátt kunnu fáa gagn av t.d. felags parkeringsmøguleikum.

### Hallir og vøllir

Kommunan hevur eina røð av ítróttaanleggum. So hvørt kommunan veksur, er tørvur á at útbyggja hesi.
Meginítróttaøkið í Havn er Gundadalur saman við Tórsbreyt. Í Gundadali eru:

- Tveir fótbóltsvøllir
- Tjóðarleikvøllurin Tórsvøllur
- Badmintonhøllin
- Høllin á Hálsi
- Gundadalshøllin
- Tennisanlegg við 2 tennisvøllum
- Svimjihøllin
- FIMI
- Dansifrøi

Tórsvøllur verður útbygdur sambært heildarætlanini fyri Tórsvøll. Skýlið á vestursíðuni væntast at standa liðugt í 2021.

Svimjihøllin í Gundadali verður útbygd við einum nýggjum tilbygningi við einum 50m langhyli, umframt eina røð av vælveruhentleikum innan- og uttandura. Byggiverkætlanin byrjar ætlandi í endanum av 2020.

Arbeitt verður við at skipa alt økið í Gundadali sambært einari heildarætlan nevnd 'Skipan av Gundadali', sum skal umskapa Gundadal til ein sambundnan ítróttardepil og ein trivnaðardepil, har øll hava hug at koma og kenna seg væl. Heildarætlanin skal seta út í kortið miðvísar ætlanir, so at Gundadalur eisini komandi áratíggjuni kann geva verandi og nýggjum ítróttagreinum bestu virkis- og vakstrarlíkindi. Ætlanin er eisini, at Gundadalur framhaldandi er miðstøð fyri altjóða kappingar.

Frælsi ítrótturin heldur í høvuðsheitum til á Tórsbreyt. Ávísar frælsar ítróttargreinar hava um veturin møguleika fyri at húsast partvís á Tórsvølli og á skúlanum við Løgmannabreyt. Tó eru umstøðurnar til innandura frælsan ítrótt ikki komnar á mál enn og vilja sum langtíðarmál krevja eina innandura høll til endamálið, umframt eina røð av betranum við Tórsbreyt.

Ítróttarhøll er í Hoyvík, í Kollafirði og á Glasi og harafturat eru hallirnar á Stórheyggi, og hallirnar í fólkaskúlunum á Argjahamri, Skúlanum á Fløtum á Argjavegi og í nýggja bygninginum í Markagili, í skúlabygningunum á Frælsinum, í Sankta Frans Skúla, Eysturskúlanum, Hoyvíkar skúla, Skúlanum við Løgmannabreyt og Kollafjarðar skúla, umframt ein minni høll í Nólsoyar skúla og virknishøllin í Finsen. Ætlandi verður farið undir at gera eina fimleikahøll í Kaldbak í 2021.

Kommunan hevur harafturat Hoyvíksvøll og fótbóltsvøllir Úti í Vika, í Nólsoy (er ikki fullur vøllur) og Eysturvøll (er ikki fullur vøllur). Afturat hesum eru einir 75 smærri bóltvøllir í kommununi. Kommunan hevur stuðlað gerð av hesum vøllunum, men eigarafeløg í grannalagnum hava ábyrgdina av teimum.

### Stórhøll við Stórutjørn

Í 2018 samtykti meirilutin í býráðnum, at farast skuldi undir eina stórhøll við Stórutjørn. Farið er undir tær innleiðandi fyrireikingarnar og at greina neyðugu krøvini til høllina. Dentur skal leggjast á, at hendan høllin verður til allar viðkomandi ítróttargreinar, hondbólt, flogbólt v.m. Men ætlanin við høllini er eisini, at hon skal hýsa stórum ráðstevnum, messum, konsertum og øðrum við møguleika at hýsa upp til uml. 5000 fólkum. Talan er um ein bygning á leið 5000 m2 og lendi á umleið 10-20.000 m2.

> ARBEITT VERÐUR VIÐ AT UMSKAPA GUNDADAL TIL EIN SAMBUNDNAN ÍTRÓTTARDEPIL OG EIN TRIVNAÐARDEPIL, HAR ØLL HAVA HUG AT KOMA OG KENNA SEG VÆL.

## Fótbóltshøll

Ætlanir hava verið um at byggja eina fótbóltshøll í Hoyvíkshaganum, soleiðis at fótbóltur kann spælast innandura alt árið. Arbeitt verður við at finna eina endaliga staðseting. Væntað verður, at øki á einar 20.000m2 skal setast av til eina komandi fótbóltshøll, sum verður umleið 8-10.000m2 til støddar.

Hóskandi er at kanna møguleikarnar fyri felags staðseting saman við eini stórhøll, soleiðis at møguleiki er fyri t.d. felags parkeringsumstøðum.

## Golfvøllur

Golfvøllurin í kommununi er á Glyvursnesi. Vøllurin hevur 9 hol/breytir, men er ikki bygdur frá grundini og lýkur ikki vanligar nýmótans treytir fyri ein golfvøll. Tórshavnar kommuna hevur ætlanir um at gera golfvøll og frítíðarøki á Glyvursnesi, og avtala er gjørd við Búnaðarstovuna um leiguavtalu fyri umleið 600.000m2 av lendi. Ætlanin er síðani at gera eina nýggja golfbreyt við níggju holum, sum kann útbyggjast til 18 hol, um mett verður, at tørvur er á tí. Skotið er upp, at trý hol verða gjørd um árið í trý ár, soleiðis at níggju hol skuldu verið klár umleið ár 2022-2023.

Ætlanin er, at annað ítróttar- og frítíðarvirksemi verður hugsað inn, og soleiðis at økja um nyttuvirðið av anlegginum og náttúruøkinum øllum, harundir møguleikan at endurnýta grótbrotini á Glyvursnesi. Hugsað er bæði um maritimt umhvørvi við sjóvarmálan, bogaskjóting, lendisrenning, fjallasúkling v.m. Harumframt er golfvøllurin eitt týðandi aktiv í ferðavinnuhøpi.

## Kappróður

Kappróður í føroyskum árabáti er tjóðarítróttur føroyinga og ein kappingarítróttur, sum í høvuðsheitum fer fram á Havnarvág, í Sandágerði og á redini, umframt á Kollafirði og í Nólsoy. Róðrarneyst eru í Vágsbotni, í Álakeri, á Argjum, við Sjógv í Kollafirði, á Malarenda í Nólsoy og í Hoyvík.

Økið undir nýggju útbyggingini av Landssjúkra-húsinum (H-bygningurin) verður lagt av til komandi frítíðarhavn.

> YNSKI ERU FRÁ FLEIRI YMISKUM SMÆRRI OG STØRRI ÍTRÓTTAGREINUM UM AT FINNA HÓSKANDI STAÐSETINGAR TIL ÍTRÓTTAR- OG FRÍTÍÐARVIRKSEMI BÆÐI INNAN- OG UTTANDURA.

## Ríðing

Í kommununi eru ríkir møguleikar fyri ríðing. Bæði á ríðibreytini í Marknagili (Kerjum) og ríðiskúlanum har, umframt á økinum hjá ríðifeløgunum við Tvørá í Havnardali, har Føroya Ríðingarfelag og Íslandsrossafelagið halda til. Harumframt er umfatandi kervi av rossagøtum í Flatnahaga, umframt eftir fjøllunum vestureftir umvegis Stíggjarnar ella Núgvuna og Fjallið millum Botna til Leynar.

Fyrispurningar eru eisini um at fáa ríðiøki ovarlaga í dalinum í Kollafirði ella aðrastaðni, umframt at fyrispurningar eisini eru um at fáa serøki sett av til onnur rossafeløg.

Økið á Kráarheyggi og fram við Tvørá er lagt av til framtíðar útbyggingar av ríðiítróttini, tó so at tað eisini verður mett so hvørt, um annað frítíðarvirksemi kann vera í sama øki t.d. náttúrufrítíðarskúli.

Við Kerjar verður nærri tilskilað øki lagt av til framtíðar víðkan av kappríðibreytini har.

Ynskið er at víðka rossagøturnar, serliga aktuell er leiðin til Kirkjubøar bæði umvegis Reynsmúla og umvegis Kirkjubøhamar og í dalinum í Kollafirði frá Langasandi til Leynavatn.

## Telving og kortspæl

Havnar Telvingarfelag hevur langtíðarleiga hølið í Finsen.

Bridgehúsið, er í vánaligum standi og eftir ætlan verður húsið tikið niður í sambandi við útbygging av Tórsvølli.

## Bogaskjóting

Í nøkur ár hevur verið skotið um summarið í Hoydølum. Tørvur er á at avseta øki á umleið 60 m x 100 m til endamálið. Samtykt er at arbeiða víðari við endaligari staðseting av eini komandi bogaskjótibreyt í grótbroti á Glyvursnesi.

## Klintring, rennifjøl, rennihjól, rulluskoytur, buldring, parkour

Ynski eru frá fleiri ymiskum smærri og størri ítróttagreinum um at finna hóskandi staðsetingar til ítróttar- og frítíðarvirksemi.

Klintring á háveggi er í Norðradali hjá Føroya Klintrifelag. Felagið hevur fingið betri innandura møguleikar fyri klintring. Avtala er gjørd við Havnar Klintrifelag um uppbygging, menning og

rakstur av klintrianleggi í eini fyrrverandi frystihøll í Bacalao. Í fyrsta umfari er talan um eina høll við sonevndum buldriveggjum. Talan er um ein ítrótt, ið kann fevna um luttakarar í øllum aldri, frá heilt smáum børnum til eldri. Alt eftir gongdini er eisini ynskiligt at fáa ein 10-12 m høgan hávegg í framtíðini. Klintrihøllin í Bacalao verður væntandi tikin í nýtslu á heystið 2020.

Bacalao er blivið karmur um virksemi innan skate og klintring. Skatehøllin er tikin í nýtslu og er karmur um frítíðargreinar sum rennifjøl, rennihjól og rulluskoytur.  Klintrihøllin er væl áleiðis. Umsókn er komin um slík anlegg í Bacalao.

Við slíkum loysnum, har hesar ítróttargreinar eru samlaðar, kunnu teir ymsu íðkararnir fáa gagn av hvørjum øðrum, og tiltøk so sum kappingar og framsýningar kunnu verða fyriskipaðar. Við at gera eina tílíka staðseting til hetta virksemið, verður lív lagt afturat býnum, ítrótturin gerst sjónligur og ein pallur skaptur, har øðrvísi ítróttargreinar kunnu spíra.

## Fjallasúkklubreyt og motocrossbani

Fjallasúkklufelagið fekk í 2019 fyribilsloyvi til eina royndarsúkklubreyt til fjallasúkkling í Flatnahaga. Breytin verður uml. 300 metrar long og umleið 2 metrar breið. Møguleiki er fyri at víðka um breytir í sama øki.

Harumframt er eitt øki við Bøllureyn, har motocrossíðkarar hava sítt virksemi við vælvild frá festaranum.

## Skótahús- og øki

Kommunan hevur fleiri skótalið. Ávísar útbyggingar hava verið farnu árini. Hóskandi er at avseta ávís øki til framtíðar útbyggingar av hesum virksemi í náttúruøki.

Kannað verður, um hóskandi øki er at finna í Havnardali, umframt nýggja økið, sum longu er avsett á Fjallinum Lítla nærhendis rossaøkinum í Havnardali.

## Skíðing

Oman av Sornfelli er ein breyt, sum áhugaskíðfólk hava gjørt yvir nøkur ár. Økið hevur lutfalsliga nógvar dagar árliga, har til ber at standa á skíð. Í 2018 gjørdi Tórshavnar kommuna samstarvsavtalu við Skíðfelagið Fjalir fyri 2018-20 um stuðul til uppbygging, menning og rakstur av skíðbreyt á Sornfelli.

Endamálið við royndarverkætlanini við skíðbreyt við skíðsleipilyftu á Sornfelli er at vekja ans fyri og betra um umstøðurnar at íðka skíðítróttargreinar her á landi. Felagið og kommunan eru í holt við at fyrireika eina møguliga eyka lyftu frá Skeiðsskarði niðan á verandi skíðøkið.

## 5.4.3 GRØN FRÍTÍÐARØKI

Hagin og grønu økini eru eitt tilfeingi við góðum møguleikum fyri uttandura virksemi og uppihaldi hjá borgarum og vitjandi í Tórshavnar kommunu.

Náttúran, mentanin og tey virði, ið eru í hesum, skulu varðveitast. Tí skal nóg nógv pláss tryggjast til grøn frítíðarøki og ein vaksandi tørv á økjum til útilív. Nýggj grøn øki skulu knýtast saman við vegum og gøtum bæði borgarum og vitjandi at gagni. Í haganum verða gjørdar rørslu- og upplivingargøtur, har tað letur seg gera, til tess at stuðla undir ein sunnan lívsstíl og at tryggja góða fólkaheilsu í øllum aldursbólkum.

### Gøtuskipan

Gøturnar eru týðandi partur av uttandura frítíðarvirkseminum í kommununi. Verandi gøtur eru gjørdar yvir eini 20 ár, og arbeitt verður við at víðka munandi um hesar. Kommunan arbeiðir við at gera eina samanhangandi og lætt atkomuliga gøtuskipan í og kring Havnina, soleiðis at tað skal gerast dámligt og áhugavert at ferðast hjá fólki til gongu og á súkklu.

Nógvar gøtur eru í Havn, soleiðis at borgarar kunnu ferðast trygt millum býlingar og út í lendið kring býin. Hetta er serliga galdandi í nýggju býarpørtunum, har rúm hevur verið fyri at leggja gøturnar til rættis. Í eldri býarpørtum eru gøturnar ikki eins samanhangandi. Tó ber til at ferðast trygt í hesum økjum eftir gøtum og vegum við lítlari ferðslu.

Í Tórshavn verður arbeitt við verkætlanini 'Ringurin', hvørs endamál er at binda gøturnar saman í ein ring kring Havnina. Gøturnar eru til fleirnýtisendamál, so sum gongutúrar, renning, rossagøta, súkkling og so framvegis, tó ikki til motordrivnar súkklur og akfør.

Á kortinum síggjast útbygdar gøtuskipanir í Havn, umframt at stiplaða linjan vísir ætlaðu leiðina á verkætlanini 'Ringurin'. Hetta er áhaldandi arbeiði. Nakrar av hesum gøtunum, sum tilsamans skulu verða 'Ringurin' eru gjørdar, meðan aðrar gøtur eru eftir at fremja í verki.

Upplivingin av gøtunum verður støðugt víðkað við at gera eina røð av virknis- og vitjanarstøðum á rutuni. Hetta fyri at leggja dent á teir fjøltáttaðu møguleikarnar, sum eru í kommununi fyri fólk í øllum aldri, sum bæði geva møguleika fyri rørslu og frálíkari náttúruuppliving.

Teir grønu frílendiskílarnir eru óbygd øki, skipað við gøtum, og eru til uppihald og frítíðarítriv. Ansast skal væl eftir teimum virðum, sum har eru, tá nýggj býarbygging verður skipað. Tá gøtuskipanin verður útbygd, skal atlit takast til markviðurskifti, staðlýsing og planting.

Kommunan arbeiðir støðugt við at økja um útboðið av gøtum. Gøturnar skulu merkjast, og kommunan eigur at kunna borgarar, tilflytarar og ferðafólk um gøturnar við skelting og faldarum.


Gøtuskipan
Gøtuskipanir
Gøtan kring havnina
Verandi gøtur
Ætlaðar gøtur
• Viðmerkjast skal at allar gøtur eru ikki eru á hesum kortinum, víst verður til heimasíðuna www.torshavn.fo.

> ÍBÚGVARNIR HAVA Á NÓGVUM STØÐUM LAGAÐ SPÆLIPLÁSSINI Í TEIRRA GRANNALAGIÐ TIL OG PLANTAÐ YMISKT FYRI AT SKAPA LÍVD OG TRIVNAÐ.

## Spælipláss og bóltvøllir

Eitt eyðkenni fyri teir flestu býarpartarnar eru spælipláss og bóltvøllirnir, sum liggja í ella nær ymisku bústaðaøkjunum. Í einstøku býarpørtunum eru fleiri størri fríøki, sum venda sær til alt grannalagið.

Í teimum nýggjaru býarpørtunum er krav, at spælipláss er partur av arbeiðinum at stykkja út. Lokalu spæliplássini hava í flestu førum gøtur til høvuðsgøturnar, sum allar føra til størri fríøki. Íbúgvarnir hava á nógvum støðum lagað spæliplássini til og plantað ymiskt fyri at skapa lívd og trivnað.

## Frílendisætlan fyri Havnardal

Tórshavnar kommuna gjørdi í 2018 uppskot til eina yvirskipaða ætlan fyri, hvussu økini í Havnardali í framtíðini kunnu mennast og skipast. Her verður greitt frá høvuðsmálunum við frílendisætlanini fyri Havnardal.

Serligur dentur verður í fyrstu atløgu lagdur á eitt øki, ið hevur eina samlaða vídd á umleið 2,5 milliónir fermetrar (ein kilometur breitt og tveir kilometrar langt). Ein partur av økinum, umleið 283.000 fermetrar, er skógfriðað øki við viðarlund, mosa- og mýrulendi, og ber hesin parturin av økinum brá av at vera náttúrulund. Lendið er serstakt við bleytum morenuheyggjum, opnum vátlendisfløtum, mosa og mýrulendi. Sandá rennur mitt gjøgnum dalin, og góðar gøtur eru í hesum økinum. Økið verður mett at hava nógvar dygdir og góðar menningarmøguleikar sum eitt frílendisøki til heilsubót.

Nógvar dygdir eru í økinum í dag, og mælt verður tí til, at hóvliga verður farið fram, tá tiltøk verða framd. Økið kring verandi viðarlund, leigutraðirnar og rossagøturnar verður nógv nýtt í dag til ymisk endamál, serliga av traðar- og rossafólki, men eisini av dagstovnum og skúlum, ið nýta økini fram við ánni til spæl, ítriv og uppihald. Seinnu árini eru fólk farin at tjalda í økinum, og súkklukappingar verða hildnar á eyrgøtunum.

Frílendisætlanaruppskotið leggur upp til, at økini í Havnardali verða skipað,  og at nýggj tiltøk verða sett í verk, sum eitt nú styðja upp undir verandi viðarlund, sum víðka um gøtukervið og skapa atgongd til størri part av økinum. Samstundis verður skotið upp at gera fleiri benkur fram við gøtunum og at lætta um atgongd tvørtur um ánna á ávísum støðum við at gera smáar timburbrýr.

Eisini verður skotið upp at gera útsýnisstøð frá hægstu heyggjunum, og at smá skýli verða gjørd, ið kunnu nýtast til uppihald, lívd og at gista í.

Eisini verður mælt til at gera skipaði vesi- og vatnviðurskifti í økinum.

Eisini vera leigutraðirnar mettar at hava eitt ávíst virði og møguleikar fyri at vísa børnum og øðrum áhugaðum vanligt djórahald. Umhugsast kann, um partar av traðunum kunnu leggjast undir skipaði viðurskifti, har dagstovnar og skúlar kunnu koma at vitja í sambandi við lembing, fletting, gásaroyting og annað.

Endamálið er, at tað í størri mun verður stuðlað undir ymisku nýtsluna av økinum, so sum tjalding, útferðir av ymsum slag, til gongutúrar, sílaveiðu og annað, við at gera hesi smáu tiltøk, ið gera økið meira atkomuligt og nýtiligt.

Øll tiltøkini skulu tó fremjast soleiðis, at fyrilit verður sýnt lendinum og teimum dygdum, sum eru har í dag.

## Frílendisætlan fyri Boðanes – Hoydalar

Á vári í 2017 varð frílendisætlanin fyri økið Boðanes – Hoydalar liðug og almannakunngjørd. Ætlanin hevur verið leingi ávegis. Upprunaliga varð arbeiðið sett í gongd í juni 2006, tá Føroya Landsstýri gjørdi av at leggja hetta stóra økið í niðastu Hoydølum, sum Føroya Landsstýri eigur, til frílendi til gagns fyri almenningin.

Eftir at Umhvørvisstovan var skipað, varð tað litið stovninum upp í hendi at varða av lendinum, og á heysti í 2009 varð ein arbeiðsbólkur settur at gera uppskot til eina dispositiónsætlan fyri økið. Í 2017 var ætlanin liðug. Her verður greitt frá høvuðsmálunum í frílendisætlanini fyri Boðanes - Hoydalar.

Við grundarlagi í útgreiningum av teimum ymsu viðurskiftunum í økinum við atliti at lendinum, náttúru, siðsøgu og tekniskum virðum og bindingum v.m. er gjørd ein brúksætlan, har dentur verður lagdur á møguleikarnar fyri náttúru- og frílendisupplivingum í økinum.

Frílendisætlanin leggur upp til, at gøtuskipanin í Hoydølum og yvir á Boðanes verður bygd út við fleiri samanhangandi gøtum. Samstundis verður lagt upp til, at økið verður skipað við ymiskum virknisplássum fram við gøtunum, umframt at økið undir Óðinshædd verður sett av til fríøki at lufta húsdjórum í.

Eisini mælir ætlanin til, at farið verður undir gróðurseting í Hoydølum, fyri at skapa betri lívd og skjól, eins og verju móti høvuðsvegunum. Somuleiðis er eitt av málunum at skapa framsýningarmøguleikar fyri ymiskum gróðri, eisini føroyskum upprunavøkstri. Mælt verður til, at skipað verður eitt sonevnt “in situ” savn at verja og vísa uppruna føroyskan viðarvøkstur umframt at skipa ein villblómugarð at sýna fram ymiskan villan føroyskan gróður.

Frílendisætlanin vísir á eina brúksskipan, har tey yvirskipaðu atlitini eru umrødd og lýst, soleiðis at hesi kunnu verða tikin við sum partur av teimum ítøkiligu menningar- og røktarætlanunum fyri økið.

Í 2018 fóru Tórshavnar kommuna og Umhvørvisstovan undir at gera tær fyrstu gøturnar sambært ætlanini. Aðrir partar av verkætlanini bíða eftir at formligu viðurskiftini kring verkætlanina falla endaliga upp á pláss.

## Útferðarstøð nær býnum

Kring býin eru fleiri støð, sum fólk leita til, tí útsýnið er serliga gott ella náttúran serliga vøkur. Hesi eru tilhaldsstøð, støð at íðka eitthvørt og at njóta útsýnið. Dømini eru fleiri, eitt nú við Kongavarða, á Hvítasandi, í Havnardali og Likkudali. Økini skulu gerast alment atkomulig við neyðugum hentleikum, og leiðin til støðini verður sjónlig. Hetta er eisini liður í arbeiðinum at skipa samanhangandi lendisgøtur í allari kommununi og í frílendisætlanunum fyri Boðanes-Hoydalar og fyri Havnardal.

## 5.4.4 BLÁ FRÍTÍÐARØKI

Frítíðarvirksemi í fjøruni og á fjørðinum er týdningarmikil partur av Tórshavnar kommunu. Tórshavnar kommuna vil leggja dent á, at borgarin í Tórshavnar kommununi er tilvitaður um at vatn í sær sjálvum er karmur um at skapa trivnað og somuleiðis eitt gott og spennandi umhvørvi.

Tá býarskipað verður fram við sjóvarmálanum og áunum, hevur tað við sær, at menniskjuni flyta seg burtur frá asfalteraðu vegunum og fáa ágóðan av náttúruni. Hjá børnunum er hetta ein ókeypis lærubók, meðan tey eldru kunnu njóta náttúruna og eina løtu leita sær burtur frá strongd og gerandisdegnum. Hetta økir um trivnaðin og lívskorini hjá øllum borgarunum.

Nógv virksemi er í teimum bláu frítíðarøkjunum í Tórshavnar kommunu. Sjósvimjing er vorðin alsamt vanligari, og dagliga eru fólk at síggja, sum svimja á sjónum í Hoyvík, í Sandágerði, í Kollafirði og á Gomlurætt.

Kajakkrógving er á firðunum kring Havnina og í Hestfirði, og alsamt fleiri veitarar og feløg bjóða seg fram á hesum øki. Frítíðarkaving hevur drúgva søgu her, og Tórshavnar Froskmannafelag er hitt næstelsta í danska kongaríkinum. Bátafeløg eru eisini í Kollafirði og í Havn.

Undir Bakka í Havn hava Tórshavnar Froskmannafelag og Havnar Kajakfelag leigusáttmálar við Tórshavnar kommunu um nýtslu av tveimum neystum. Eisini er nógv bátavirksemi undir Bryggjubakka, har Tórshavnar kommuna hevur lagt eina nýggja bátabrúgv, soleiðis at Tórshavnar Froskmannafelag, Havnar Kajakfelag og Tórshavnar Bátafelag hava fingið betri umstøður til atløgu og at flota smábátar sum kajakkir og smáar seglbátar.

Á Eystaru og Vestaru Bryggju er nógv vinnuvirksemi, umframt at bæði undirvísing og frítíðarvirksemi eru í Sjóvinnuhúsinum og Bacalaobygninginum. Samstundis eru eisini góðir møguleikar fyri býarmenning og meira av bláum frítíðarvirksemi á bæði Eystaru vág, í Álakeri, í Sandágerði og á Argjum, umframt í Nólsoy, Kaldbak og við Gomlurætt.

Hetta má tó verða neyvt skipað fyri at tryggja neyðugu fyrilitini, soleiðis at vinna og ídnaður kunnu fara fram, har bústaðir, skrivstovur og skúlavirksemi eru staðsett. Havnarøkið og virksemi knýtt at sjónum skulu áhaldandi mennast, meðan bíðað verður eftir einari nágreiniligari ætlan fyri havnina.









# TÆNASTUØKIÐ

# 6.0 >

# TÆNASTUØKIÐ


**6.1 LÝSING** . . . . 169
**6.2 LEIÐREGLUR** . . . . 172
6.2.1 Børn og ung . . . . 173
6.2.2 Heilsa- og umsorgan . . . . 173
**6.3 KARMAR** . . . . 174
6.3.1 Lógir á økinum . . . . 175
6.3.2 Politikkir og ætlanir . . . . 175
6.3.3 Tilmæli og frágreiðingar . . . . 175
**6.4 GRUNDARLAG** . . . . 176
6.4.1 Børn og ung . . . . 178
Barnaansing og frítíðarskúli . . . . 178
Framtíðar tørvur á dagstovnum . . . . 180
Fólkaskúlaøkið . . . . 181
Framtíðar tørvur á skúlaøkinum . . . . 183
Samstarv millum skúla og frítíðarskúla . . . . 184
Ungdómstilboð . . . . 185
Barnaverndartænastan . . . . 186
Barnatannrøktin . . . . 186
6.4.2 Heilsa og umsorgan . . . . 187
Framtíðar tørvur á eldrarøkt . . . . 188
Útbyggingar á eldraøkinum . . . . 190
URD - Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin í Hoyvík . . . . 190
Dagtilboð og tilhald til eldri . . . . 191
Eldraíbúðir . . . . 193
Átøk á eldraøkinum . . . . 193
Kommunulæknaskipanin . . . . 194
Heilsufrøðiskipanin . . . . 194
Sosial tilboð . . . . 195
Serflutningsskipanin . . . . 195



# 6.1 LÝSING >

TÆNASTUØKIÐ FEVNIR UM KJARNUTÆNASTUR Í KOMMUNALA VIRKSEMINUM, SUM ER VENT BEINLEIÐIS MÓTI BORGARUM Í ØLLUM ALDRI. GÓÐIR OG NÚTÍÐARHÓSKANDI KARMAR RUNDAN UM KOMMUNALA VIRKSEMIÐ ERU VIÐ TIL AT LYFTA TÆNASTUSTIGIÐ, OG TÍ HEVUR TAÐ HØGA RAÐFESTING AT TRYGGJA GÓÐAR KARMAR RUNDAN UM ALLAR HESAR TÆNASTURNAR.

**Evnið Tænastuøkið** er býtt í tvey undirevni, ið eru knýtt at tí kommunalu tænastuni: 'Børn og ung' og 'Heilsa og umsorgan'. Evnið Børn og ung snýr seg um fólkaskúlaøkið og dagstovnaøkið. Heilsa og umsorgan snýr seg um eldraøkið, og kommunalar tænastur innan heilsu, sosial mál og til fólk við serligum tørvi. Her verður tænastuøkið lýst, hvussu Tórshavnar kommuna arbeiðir og raðfestir á tænastuøkinum, og hvussu kommunan arbeiðir fyri at tryggja teir neyðugu karmarnar.

## Vit virka fyri

**Børn og ung**

- At geva børnum og ungum ein tryggan og mennandi gerandisdag
- At geva børnum og ungum best møguligar umstøður at vaksa upp í
- At børn og ung hava møguleika at taka lut í fjøltáttaðum og virknum dagstovna- og frítíðarlívi
- At veita góð tilboð og nútímans karmar á dagstovna- og skúlaøkinum
- At børn og ung fáa møguleika til at menna síni evni og sínar førleikar
- At geva dagstovnunum betri rúmd til námsfrøðiligt innihald, trivnað og menning
- At skapa tryggar og góðar karmar um familjuráðgevinginaa
- At nøkta hølistørvin á dagstovna-, fólkaskúla-, kvøldskúla- og musikkskúlaøkinum
- At stuðla undir nýhugsan á skúlaøkinum, eitt nú so at skúlarnir kunnu styrkja kreativu lærugreinarnar
- At tryggja nøktandi barnatannrøkt
- At tryggja nøktandi barnaverndartilboð

**Heilsa- og umsorgan**

- At tryggja ein góðan aldurdóm við virðiligum loysnum
- At dagføra eldrabústovnar, at nøkta tørvin á búplássum og at styrkja heimatænastuna
- At útvega stutttíðarpláss til borgarar ið hava tørv á umlætting, tørvsmetan og rehabilitering

FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU >

# 6.1 LÝSING FRAMHALD

- At kanna tørvin á og finna hóskandi loysnir til, at eldraíbúðir kunnu byggjast, og sostatt gera bústaðarmarknaðin meira fjøltáttaðan. Valið skal ikki standa millum at búgva í sethúsi ella á røktarheimi
- At hugsa nýtt og leggja upp fyri broyttari fólkasamanseting í framtíðini
- At veita góða og tíðarhóskandi tænastu til eldri, við høgari dygd og trygd, og í samsvari við tað, ið okkara eldru ynskja
- At endurskoða og nýhugsa eldraøkið í tøttum samstarvi við Eldraráðið, nærumhvørvið, avvarðandi, brúkarar, starvsfólk og fakfólk
- At veita nøktandi og nútímans tilboð um fyribyrging, soleiðis at okkara eldru varðveita likamligar og sálarligar førleikar sum longst og harvið fáa betri lívsdygd
- At fáa til vega hóskandi vælferðartøkni innan eldraøkið
- At stuðla undir virksemi so sum venjing, dagtilhald v.m. og samstarv við privat og sjálvboðin um at taka stig til fleiri átøk fyri eldri
- At veita tíðarhóskandi høli til kommunulæknar og heilsufrøðiligu tænasturnar til børn
- At skipa eina nøktandi serflutningstænastu





# 6.2 LEIÐ-REGLUR

TÆNASTUØKIÐ FEVNIR UM TÝDNINGARMIKLAR OG BORGARAVENDAR KOMMUNALAR KJARNUTÆNASTUR. TAÐ ER EIN GRUNDLEGGJANDI TÆNASTA TIL BORGARAR, SUM KREVUR LUTFALSLIGA NÓGVAN PENING TIL GÓÐAR KARMAR OG STARVSFÓLK. FLESTU BORGARAR ERU Í SAMBANDI VIÐ TÆNASTUØKIÐ HVØNN DAG, SO ELLA SO, ANTIN SUM FORELDUR ELLA AVVARÐANDI. TÓRSHAVNAR KOMMUNA ARBEIÐIR VIÐ HESUM LEIÐREGLUM, TÁ TÆNASTUØKIÐ VERÐUR SKIPAÐ.



### 6.2.1 BØRN OG UNG

Í Tórshavnar kommunu er tað Barna- og ungdómsdeildin, ið tekur sær av umsitingini, at veita námsfrøðiliga ráðgeving og menning, og átøkum innan dagstovnaøkið, undir hesum vøggustovur, barnagarðar, ungdómsklubbar og frítíðarskúlar, og mentamáladeildin, sum tekur sær av umsitingini og menningini av fólkaskúlaøkinum. Barnatannrøktin er skipað undir trivnaðarstjóranum. Sosiala deild umsitur barnaverndartænastuna.

Út frá depilsbygnaðinum í kommununi, sum lýst undir Fólk og bústaðir, verða øki sett av til almannagagnlig endamál, so sum dagstovnar, skúlar, frítíðartilboð, ellis- og røktarheim, eldraíbúðir og annars til sosial endamál.

### 6.2.2 HEILSA- OG UMSORGAN

Í Tórshavnar kommunu er tað Heilsu og umsorganartænastan, ið skipar og veitir allar tænastur og tilboð innan eldraøkið. Harumframt umsitur Heilsu- og umsorganarfyrisitingin, serflutningsskipanina, stuðulsskipan til tiltøk innan almanna- og heilsumál umframt fólkaheilsu. Heilsu- og umsorganartænastan er, umframt yvirskipaða umsiting við heilsu- og umsorganarstjóra, skipað í trimum eindum við hvør sínum leiðara, sum hava tilvísing til Heilsu- og umsorganarstjóran.

Mentamáladeildin umsitur ávísar tænastur til heilsufrøðingar á skúlum og børn undir skúlaaldur. Sosiala deild umsitur sosialar íbúðir, harundir samskiftið við leigararnar, umframt onnur sosial mál.

Út frá depilsbygnaðinum í kommununi, sum lýst undir Fólk og bústaðir, verða øki sett av til almannagagnlig endamál, so sum dagstovnar, skúlar, frítíðartilboð, ellis- og røktarheim, eldraíbúðir og annars til sosial endamál.

# 6.3 KARMAR

FYRI EVNIÐ TÆNASTUØKIÐ ERU TAÐ SERLIGA HESAR LÓGIR, ÆTLANIR OG POLITIKKIR, IÐ ATLIT SKULU TAKAST TIL Í SAMBANDI VIÐ ARBEIÐIÐ VIÐ TÆNASTUØKINUM Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU.



## 6.3.1 LÓGIR Á ØKINUM

- Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir
- Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a.
- Løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt
- Løgtingslóg um fólkaskúlan
- Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
- Løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung
- Løgtingslóg um kommunulæknaskipan
- Løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt
- Løgtingslóg um barnavernd

## 6.3.2 POLITIKKIR OG ÆTLANIR

- Eldrapolitikkur hjá Tórshavnar kommunu
- Barna- og ungdómspolitikkur fyri námsfrøðiliga økið

## 6.3.3 TILMÆLI OG FRÁGREIÐINGAR

- Tilmæli um skúlabygnað og skúlabygging í Tórshavnar kommunu 2017-2021
- Frágreiðing um framtíðartørvin á búplássum til eldri í Tórshavnar Kommunu, 2016.

# 6.4 GRUNDAR-LAG

TÆNASTUØKIÐ FEVNIR UM TÝDNINGARMIKLAR OG BORGARAVENDAR KOMMUNALAR KJARNUTÆNASTUR. FLESTU BORGARAR ERU Í SAMBANDI VIÐ TÆNASTUØKIÐ HVØNN DAG SUM FORELDUR, BARN, NÆMINGUR, ELDRI ELLA SUM AVVARÐANDI.

Ein stórur partur av øllum rakstrarútreiðslum hjá kommununi verður nýttur til almanna- og heilsumál og til barnaansing. Samstundis verða stórar íløgur gjørdar í út- og nýbygging á eldraøkinum, eins og í bygningar á útbúgvingarøkinum, har kommunan varðar av skúla-bygningunum. Meginparturin av øllum starvsfólkunum í Tórshavnar kommunu starvast á tænastuøkinum.

Her lýsa vit grundarlagið undir evninum Tænastuøkið.



## Børn og ung

- Kvøldskúlin
- Skúli
- Frítíðarskúli
- Dagstovnur

## 6.4.1 BØRN OG UNG

Barna- og ungdómsøkið er eitt tað størsta í allari kommunalu fyrisitingini. Økið fevnir um alt frá vøggustovu og barnagarði, frítíðarskúla, fólkaskúla, ungdómstilboð, barnavernd og barnatannrøkt.

Tórshavnar kommuna vil á hesum økinum veita bestu karmar, soleiðis at øll børn fáa eina trygga og mennandi byrjan upp á lívið, bestu karmar til frálæru í skúlaaldri og frítíðartilboð, sum eru við til at skapa trivnað millum børn og ung í kommununi.

### Barnaansing og frítíðarskúli

Ein stórur partur av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu er at bjóða dagtilboð til børn og ung í kommununi. Størsti parturin av hesum er dagstovnapláss, sum fevnir um øll børnini undir skúla-aldur, og um frítíðarskúla til børn frá forskúlaaldri til og við 3. flokki.

Í Tórshavnar kommunu eru íalt 29 dagstovnar, sum eru skipaðir við vøggustovu og/ ella barnagarðsstovum. Harafturat eru 9 frítíðarskúlar til børn til og við 3. flokki. 38 stovnar við børnum frá 0 árum til og við 3. flokki. Í Skúlanum á Argjahamri, Skúlanum á Fløtum og Skúlanum við Løgmannabreyt eru frítíðarskúlar í bygningunum.

**Á hesum stovnum eru tilsamans:**

- 616 vøggustovupláss
- 1213 barnagarðspláss
- Umleið 800 børn í frítíðarskúla
- Umleið 5-600 í ungdómstilboð

Dagstovnaøkið hevur verið í stórari menning síðan aldarskiftið, og eru dagstovnarnir í kommununi vorðnir nógv fleiri í tali. Málið fyri framhaldandi at menna dagstovnaøkið er, at øll børn í Tórshavnar kommunu fáa eitt gott og mennandi námsfrøðiligt tilboð. Har børn og ung skulu hava møguleika at menna síni skapandi evni, sína undran og sítt forvitni.

Tá nýggj øki verða skipaði til býarvøkstur, eiga hóskandi øki at verða løgd av til almannagagnlig endamál, eitt nú til dagstovnar. Miðað eigur at verða eftir, at dagstovnatørvurin kann verða nøktaður í nærøkinum, í samsvari við deplabygnaðin í kommununi (sí Deplabygnaður undir evninum Fólk og bústaðir).

Talið av børnum í Tórshavnar kommunu er grundarlagið undir ráðleggingini og menningini av kommunalu tilboðunum fyri børn og ung tey komandi árini. Tí eigur áhaldandi at verða mett um tørvin á dagstovnaplássum frameftir (sí eisini næsta brot um framtíðar tørv á dagstovnum).

Her er eitt yvirlit yvir núverandi stovnar og stovnspláss í Tórshavnar kommunu:

## YVIRLIT YVIR DAGSTOVNAR

### Dagstovnar:

- Býlingshúsið á Norðasta Horni
- Býlingshúsið á Ternuryggi
- Býlingshúsið í Maritugøtu
- Býlingshúsið Inni á Gøtu
- Býlingshúsið millum Gilja
- Býlingshúsið undir Brúnni
- Býlingshúsið undir Fjalli
- Býlingshúsið Vesturi á Flat
- Dagstovnurin á Argjum
- Dagstovnurin á Hamrinum
- Dagstovnurin á Velbastað
- Dagstovnurin Birkilund
- Dagstovnurin Flatnagarður
- Dagstovnurin í Hoyvík
- Dagstovnurin í Løkjatúni
- Dagstovnurin í Øksnagerði
- Dagstovnurin Kura
- Dagstovnurin Kurla
- Dagstovnurin Látrið
- Dagstovnurin Lítliskógur
- Dagstovnurin Sólareygað
- Dagstovnurin við Landavegin
- Dagstovnurin við Løgmannabreyt
- Dagstovnurin við Velbastaðvegin
- Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarður
- Fríðriksgarður
- Lonirnar í Hoydølum (fyribils)
- Miðstovnurin í Gundadali
- Sankta Josef's Barnagarður

### Frítíðarskúlar

- Frítíðarskúlin á Argjahamri
- Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini
- Frítíðarskúlin í Hoyvík
- Frítíðarskúlin Sankta Frans
- Frítíðarskúlin Smílibýlið
- Frítíðarskúlin Spírin
- Frítíðarskúlin við Botnánna
- Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt
- Frítíðarskúlin í Kongagøtu / Skúlin á Fløtum

## Framtíðar tørvur á dagstovnum

Talið av børnum í Tórshavnar kommunu er grundarlagið undir ráðleggingini og menningini av kommunalu tilboðunum fyri børn og ung tey komandi árini. Tí eigur áhaldandi at verða mett um tørvin á ansingarplássum frameftir.

Í árunum 2016 og 2018 eru serliga nógv børn komin afturat yngsta aldursbólkinum frá 0-6 ár. Frá at vera 1.900 børn í aldursbólkinum tann 1. januar 2016 øktist talið til 2.142 børn 1. januar 2019. hava sæst eisini aftur á dagstovnunum, har flestu stovnarnir í Tórshavnar kommunu eingi tøk pláss høvdu í 2019.

Útbyggingar eru tí settar í verk til tess at nøkta tørvin á ansingarplássum frameftir. Útbyggingarnar fevna bæði um víðkan av verandi dagstovnum og um bygging av nýggjum dagstovnum. Harumframt eru fyribilsloysnir funnar við eitt nú Lonunum í Hoydølum, ið geva neyðugu ansingarplássini, meðan arbeitt verður við at víðka verandi stovnar.

Við teimum útbyggingum á dagstovnaøkinum, ið eru settar út í kortið í 2020 og 2021, verður mett, at tørvurin á dagstovnaplássum verður nøktaður í nøkur ár framyvir. Tó er áhaldandi neyðugt at tryggja, at nóg mikið av plássum eru til at kunna bjóða øllum børnum í kommununi dagstovnapláss.

Til tess at meta um framtíðar tørvin á dagstovnum í Tórshavnar kommunu er neyðugt at hyggja at burðatølum og fólkaflytingum. Stórur fólkavøkstur hevur verið í Tórshavnar kommunu seinastu árini. Eins og lýst er undir Fólk og bústaðir, verður eisini roknað við lutfalsliga stórum fólkavøkstri í Tórshavnar kommunu komandi árini. Hetta sæst og fer væntandi at síggjast í burðatølunum tey komandi árini.

Stór sveiggj eru í burðatølunum fyri Tórshavnar kommunu, men síðani 2011, tá burðatalið í Tórshavnar kommunu var lægst, sær út til, at burðatølini eru vaksandi.

Hartil kemur, at stór tilflyting eisini er til kommununa, og at hetta eisini merkist í minstu árgangunum, har í miðal millum 5 og 13 børn eru løgst afturat hvørjum árgangi millum 0 og 6 ár í árunum 2013-2019. Sostatt hava fleiri árgangir síðani 2015 talt oman fyri 300 børn, og tað legst afturat á hvørjum ári.

| Føðitøl fyri Tórshavnar kommunu | | |
|---|---|---|
| **Ár** | **Livandi fødd í Tórshavnar kommunu** | **Livandi fødd í Tórshavnar kommunu / mánað** |
| **2015** | 251 | 20,9 |
| **2016** | 304 | 25,3 |
| **2017** | 265 | 22,1 |
| **2018** | 295 | 24,6 |
| **2019** | 298 | 24,8 |

Kelda: Hagstova Føroya

Við einari varligari framrokning av hagtølunum, har mett verður um talið á føddum, og har mett somuleiðis verður um tilflytingina, verður roknað við, at tørvurin á ansingarplássum verður støðugur, men nøkulunda javnt vaksandi tey komandi árini.

Tí verður roknað við, at tær útbyggingar, sum eru settar út í kortið í 2020, kunnu nøkta tørvin í nøkur ár frameftir, men at neyðugt kann eisini verða við fleiri dagstovnum og/ella útbyggingum av teimum stovnum, ið longu eru.

> ROKNAÐ VERÐUR EISINI VIÐ LUTFALSLIGA STÓRUM FÓLKAVØKSTRI Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU KOMANDI ÁRINI. HETTA SÆST OG FER VÆNTANDI AT SÍGGJAST Í BURÐATØLUNUM TEY KOMANDI ÁRINI.

## Fólkaskúlaøkið

Í Tórshavnar kommunu eru í dag 10 kommunalir fólkaskúlar og tveir frískúlar. Hesir rúma øllum skúlabørnum í kommununi, og seinastu 10 árini hava í miðal verið 2.975 børn í fólka- og frískúlunum í Tórshavnar kommunu.

Roknað verður við, at í mesta lagi kunnu útivið 3.500 næmingar rúmast í fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu. Tó er talan tá meira um eitt hugsað ovara mark, heldur enn hvussu nógvir næmingar í roynd og veru rúmast. Tann praktiska avmarkingin liggur í, hvussu nógvir næmingar í mesta lagi rúmast í hvørjum árgangi. Har verður roknað við, at í mesta lagi 351 næmingar rúmast í hvørjum árgangi, áðrenn tørvur verður á meira plássi til fleiri flokkar.

Fólkaskúlarnir í kommununi eru bæði av eldri og av nýggjari slagi. Seinastu árini hevur Tórshavnar kommuna gjørt stórar íløgur í byggingina av Skúlanum á Fløtum. Hetta er ein nýggjur og framkomin fólkaskúli, sum fer at hýsa børnum, sum í fleiri ár hava verið spjadd í ymsar bygningar í kommununi. Undan hesum eru nýggir stórir skúlar bygdir á Argjahamri og við Løgmannabreyt. Eisini eru onkrir av skúlunum útbygdir og dagførdir, eitt nú Eysturskúlin og Skúlin í Kollafirði. Fleiri dagføringar og neyðugar umvælingar standa eisini fyri framman. Fremstir í røðini eru Hoyvíkar skúli og Sankta Frans skúli.

Til tess at skipa bestu karmarnar til frálæru og trivnað í fólkaskúlanum, er neyðugt áhaldandi at meta um plásstørvin á fólkaskúlaøkinum, eins og hugt verður eftir skúlabygnaðinum í kommununi.

Kring nakrar av skúlunum í kommununi eru ferðslu-, atkomu- og parkeringsviðurskiftini ónøktandi, eins og skúlagarðarnir eru tað. Skúlagarðarnir verða so við og við dagførdir, so uttandura økini verða meira kveikjandi og stimbrandi fyri næmingarnar og verða góðir karmar um spæl og rørslu umframt at vera eitt uttandura læringarrúm.

Tá nýggj øki verða skipaði til býarvøkstur, eiga hóskandi øki at verða løgd av til almannagagnlig endamál, eitt nú til skúlar. Miðað eigur at verða eftir, at fólkaskúlatilboð eru í nærøkinum, í samsvari við deplabygnaðin í kommununi (sí Deplabygnaður undir evninum Fólk og bústaðir).

Her er eitt yvirlit yvir fólkaskúlar og frískúlar í Tórshavnar kommunu, sum eisini vísir, hvussu nógvir næmingar í mesta lagi rúmast í hvørjum árgangi og í hvørjum skúla:

## Mesta næmingatal í fólkaskúlum og frískúlum í Tórshavnar kommunu

| Næmingatal | Forskúli | 1. árg. | 2. árg. | 3. árg. | 4. árg. | 5. árg. | 6. árg. | 7.árg | 8. árg. | 9. árg. | 10. árg og Serfl. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eysturskúlin** | | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 72 | 72 | 220 | **700** |
| **Hoyvíkar skúli** | | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | | **432** |
| **Kollafjarðar skúli** | | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 | | **180** |
| **Sankta Frans skúli** | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | | | | **384** |
| **Skúlin á Argjahamri** | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | | **480** |
| **Skúlin á Fløtum** | 72 | 72 | 72 | 72 | 72 | 72 | 72 | 72 | 120 | 120 | 120 | **816** |
| **Skúlin við Løgmannabreyt** | | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | | **432** |
| **Fríksúlin Lítliskúli** | 18 | 18 | 18 | 18 | 18 | 18 | 18 | | | | | **108** |

| Næmingatal | Forskúli | Yngsti bólkur | Mið bólkur | Elsti bólkur | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Kaldbaks skúli** | | 20 | 10 | 20 | **50** |
| **Nólsoyar skúli** | 6 | 16 | 18 | | **40** |
| **Velbastaðar skúli** | | 20 | 20 | 20 | **60** |
| **Frískúlin í Havn** | | | | | |

## Framtíðar tørvur á skúlaøkinum

Á skúlaøkinum merkist eisini, at fólkatalið í Tórshavnar kommunu hevur verið støðugt vaksandi í fleiri ár. Sambært tølum frá Hagstovu Føroya var talið á børnum í skúlaaldri í kommununi stórt sæð óbroytt millum 2009 og 2015. Frá 2016 og fram til 2019 eru børnini í skúlaaldri vorðin eitt vet fleiri. Væntast kann eisini, at skúlabarnatalið fer at vaksa eitt vet komandi árini, so hvørt sum stóru árgangirnir, sum í dag eru á dagstovnaøkinum, gerast eldri og røkka skúlaaldri.

Samstundis síggja vit, at burðatalið í Tórshavnar kommunu er kvinkað spakuliga uppeftir seinastu árini eftir fleiri ár í minking, og at árgangirnir tí kunnu væntast at vera um somu stødd ella størri komandi árini, alt eftir hvussu til- og fráflytingin í kommununi er. Tískil er áhaldandi neyðugt at tryggja, at nóg mikið av plássi er til at hýsa øllum skúlanæmingum í Tórshavnar kommunu.

Vaksandi næmingatal í fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu kann hava avbjóðingar við sær á skúlaøkinum. Við støði í framrokning av skúlabarnatalinum komandi 12 árini ber til at síggja, at avbjóðingar kunnu vera við plássi í skúlunum longu í 2021.

Í grunddeildini (1.- 3.fl.) og miðdeildini (4. – 7.fl) er í mesta lagi pláss til 312 næmingar í hvørjum árgangi í Havn, á Argjum og í Hoyvík. Tá er roknað við 13 sporum í skúlunum í hesum øki. Haraftrat koma skúlarnir í bygdunum og báðir frískúlarnir, sum hava árgangir til og við 6. flokki.

Frá 2021 verður roknað við, at næmingatalið í nøkrum árgangum frá 1.- 7. fl. verður so mikið høgt, at tað verður neyðugt at útvega fleiri høli. Hetta tí at fleiri stórir árgangir koma í skúlaaldur, umframt at næmingar leggjast afturat í verandi stóru árgangum. Tí kann verða neyðugt at útvega fleiri høli. Hetta kann vera við fyribilshølum, um talan er um óvanliga stórar árgangir. Verður talan um varandi vøkstur, verður hinvegin neyðugt at meta, um neyðugt eisini verður at byggja skúlar út.

Í hádeildini (7. – 9. fl.) er í mesta lagi pláss til 351 næmingar í hvørjum árgangi. Tá er roknað við 15 næmingum í Kollafjarðar skúla og 24 næmingum í 14 sporum í øllum hinum flokkunum.

Í hádeildini kunnu avbjóðingar vísa seg frá 2022 og fram. Er talan um nakrar fáar stórar árgangir, kann hetta loysast við at hava fyribilshøli, sum verða brúkt til skúla eitt tíðarskeið, meðan trýstið er størst. Verður talan um varandi vøkstur, kann gerast neyðugt við útbyggingum av verandi skúlum.

Til tess at kunna nøkta framtíðar tørvin á skúlaøkinum er hóskandi at leggja eitt sindur av eyka øki av kring nakrar av verandi skúlabygningum. Hetta er neyðugt fyri í framtíðini at kunna víðka útiøki, betra atkomu-, ferðslu- og parkeringsviðurskifti og til at byggja út til skúla-, frítíðarskúla- ella frítíðarendamál.

Ítøkiliga er støðan kring nakrar av skúlunum henda:

**Skúlin á Argjahamri**
Tørvur er á at leggja uppfyri til møguliga víðkan av skúlagarðinum ella annan tørv niðan í hagan.

**Skúlin við Løgmannabreyt**
Tørvur er á at leggja eitt øki eystanfyri parkeringsøkið av til framtíðar endamál, so sum at víðka útiøkið, størri parkeringsøki ella framtíðar útbyggingar av skúlanum, eitt nú við forskúlaflokki.

**Hoyvíkar skúli**
Arbeitt verður við at gera byggiskrá fyri høvuðsumvæling og útbygging av skúlanum. Møguleiki er ikki fyri at útvega meira lendi til skúlan, og tí er neyðugt at kanna aðrar møguleikar í økinum, t.d. flyting av parkeringsøki v.m.

> TIL TESS AT KUNNA NØKTA FRAMTÍÐAR TØRVIN Á SKÚLAØKINUM ER HÓSKANDI AT LEGGJA EITT SINDUR AV EYKA ØKI AV KRING NAKRAR AV VERANDI SKÚLABYGNINGUM, TIL VÍÐKAN AV YMSUM HENTLEIKUM.

**Eysturskúlin**
Møguligar útbyggingar í framtíðini, sum kunnu avloysa fyribilsloysnir, kunnu gerast í økjumn nærhendis Eysturskúlanum. Øll Lützenstrøð er ognartikin til Eysturskúlan, og kunnu framtíðar útbyggingar tískil gerast á trøðni. Hetta krevur tó at Eysturvøllur verður fluttur.

**Sankta Frans skúli**
Innan nøkur ár verður væntandi farið undir høvuðsumvæling og útbygging av skúlanum. Tørvur er á betri parkeringsviðurskiftum.

**Velbastaðar skúli**
Við støði í komandi viðgerðini av skúlabygnaðinum í kommununi er hóskandi at leggja eina framtíðar ætlan fyri skúlan. Eitt nú húsast skúlin lutvíst í barakkum, eins og parkeringsviðurskiftini ikki eru nøktandi.

**Nólsoyar skúli**
Lendið kring skúlan er nøktandi, men ynski eru frammi um eina høll eystanfyri skúlan, har kommunan eigur nakað av lendi.

**Kaldbaks skúli**
Tórshavnar kommuna hevur keypt lendi vestanfyri skúlan til bygging av eini fimleikahøll til skúlan. Farið er undir at gera byggiskrá og kann møgulig bygging ætlandi byrja í 2021.

## Samstarv millum skúla og frítíðarskúla

Mentamáladeildin í Tórshavnar kommunu hevur ábyrgdina av skúlaøkinum, og Barna- og ungdómsdeildin hevur ábyrgdina av dagstovnaøkinum. Hesar deildirnar fylgja tveimum ymsum lógum, fólkaskúlalógini og dagstovnalógini.

Barna- og ungdómsdeildin og Mentamáladeildin samstarva við at kunna gagnnýta bygningar betur, eitt nú við at fáa frítíðarskúlar og klubbtilboð inn í skúlar, har tað ber til.

Samstarvið er í samsvari við ætlanina um at tætta í býnum og við burðardygga býarmenning, har møguleikar eru at savna felagsvirksemi og samstundis leysgeva bygningar, sum kunnu fáa annað virksemi.

Sum heild eru møguleikar í at gagnnýta skúlabygningarnar meiri enn í verandi støðu. Til ber at fáa størri kapasitetsnýtslu, og umsitingin fer at leggja seg eftir at betra um støðuna, soleiðis at tørvurin á øðrum bygningum minkar og samlaði fermetratørvurin kann minka.

Grundað á hetta hevur Tórshavnar kommuna sett í verk tvær leiðreglur um samstarvsskipan millum skúla og frítíðarskúla, sum ávikavist húsast í sama bygningi og sum ikki húsast í sama bygningi.

## Ungdómstilboð

Sjey ungdómstilboð eru fyri børn frá 4. flokki upp til 18 ár. Hesi ungdómstilboðini bjóða børnum og ungum ymiskt skipað virksemi, so sum aktivitetir, útferðir, fyrilestrar, umframt eitt tilhaldsstað, har møguleiki er fyri at spæla borðspøl, telduspøl, playstation, at síggja film o.a.

Í umbúna er at skipa ungdómstilboð á Velbastað.

Ungdómstilboðini eru hesi:

- Margarinfabrikkin
- Barna- og Ungdómshúsið í Nólsoy
- Klubb 188
- Ungdómskafé í Vesturbýnum
- Ungdómshúsið Flatnakrókur
- Úthangið
- Argjaskotið

**Margarinfabrikkin**
Margarinfabrikkin bjóðar børnum og ungum í Tórshavnar kommunu ymiskt skipað virksemi, so sum seiðaberg, matgerð, drama, yoga, hip hop, útferðir, fyrilestrar, húsakonsertir, kafekvøld v.m. Eisini eru borðspøl, telduspøl, playstation, filmur o.a., sum børnini og tey ungu tíma sera væl.

Margarinfabrikkin er seinnu árini vorðin karmur um alt fleiri átøk fyri ung. Nevnast kunnu kór og samrøðubólkar. Barnafestivalur, Talent, Sement, Barnamentanardagurin um jóltíðir og Summarnám eru árlig afturvendandi tiltøk. Heilafabrikkin er ein verkætlan, sum byrjaði í september 2014. Hendan verkætlanin er ætlað børnum, sum hava trupult við at læra støddfrøði.

**Barna- og Ungdómshús í Nólsoy**
Ungdómshúsið í Nólsoy er eitt savningarstað fyri børn og ung í Nólsoy og er við til at styrkja samanhaldið í bygdini. Húsið hevur á leið somu tilboð sum hini ungdómshúsini í kommununi. Húsið er opið fyri teimum yngru seinnapartar kl. 13-18, og tey eldru eru í húsinum um kvøldarnar.

**Klubb 188**
Klubb 188 er tilboð ætlað ungdómi í Hoyvík. Opið er trý kvøld um vikuna. Klubb 188 húsast í hølunum hjá Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

**Ungdómskafé í Vesturbýnum**
Ungdómskaféin heldur til í Býlingshúsinum á Norðasta Horni og hevur opið tríggjar ferðir um vikuna. Tey flestu, sum ganga á kaféini, búgva á Norðasta horni.

**Ungdómshúsið Flatnakrókur**
Flatnakrókur í Kaldbak læt upp 1. februar 2013. Virksemið er býtt upp, soleiðis at børn og ung í 4. - 8. flokki hittast mánakvøld og hóskvøld, meðan tey eldru hittast týskvøld og fríggjakvøld. Flatnakrókur húsast í dagstovninum Flatnagarði.

**Úthangið**
Úthangið er tilboðið til tey ungu í Kollafirði. Latið varð upp í 2016 fyribils tvey kvøld um vikuna, aldursbólkurin er frá fjórða flokki til 16-18 ár.

**Argjaskotið**
Ungdómstilboðið á Argjum byrjaði í juni 2018 undir navninum Argjaskotið. Opið er trý kvøld um vikuna. Ungdómshús á Argjum er tilboð til tey ungu á Argjum. Argjaskotið heldur til í skúlabygninginum á Argjahamri.

> HØLISVIÐURSKIFTINI HJÁ BARNATANNRØKTINI ERU IKKI NØKTANDI. BETRI KARMAR MUGU TIL FYRI AT FRAMHALDANDI ARBEIÐIÐ Á BARNATANNLÆKNASTOVUNI KANN VERA NØKTANDI.

## Barnaverndartænastan

Sosiala deild umsitur Barnaverndartænastuna. Størsti parturin av starvsfólkunum starvast við barnavernd burturav. Á Sosialu deild starvast sálarfrøðingar, familjuráðgevar og sosialráðgevar, umframt skrivstovufólk og ein deildarleiðara.

Barnaverndartænastan arbeiðir sambært lóg um Barnavernd. Barnaverndartænastan húsast á Sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu.

Endamálið hjá Barnaverndartænastuni er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum at fáa ein tryggan uppvøkstur.

Harumframt fevnir barnaverndartænastan um eina familjustovu, ið burturav hevur til uppgávu at ráðgeva foreldrum, sum á ein ella annan hátt hava trupulleikar við børnunum ella sjálv hava tílíkar trupulleikar.

Barnaverndarstova Føroya er ein felagskommunalur stovnur, sum Tórshavnar kommuna eisini er ein partur av. Uppgávan hjá Barnaverndarstovuni er m.a. at ráðgeva barnaverndartænastunum kring landið og ráðgeva landsstýrismanninum í almannamálum í stevnumiðum á økinum. Barnaverndarstovan umsitur eisini fosturforeldraskipanina og savnar inn og umsitur hagtøl viðvíkjandi barnavernd. Harumframt umsitur Barnaverndarstovan Barnahúsið.

## Barnatannrøktin

Barnatannrøktin arbeiðir sambært lóg um Barna- og ungdómstannrøkt. Barnatannrøktin hevur egnan leiðara við tilvísing til trivnaðarstjóran. Barnatannrøktin bjóðar øllum børnum og ungum frá 0 til 18 ár í Tórshavnar kommunu alla neyðuga tannrøkt. Tilboðið fatar bæði um vanligt eftirlit og viðgerð - og um tannrætting og skaðar. Kommunan rindar rakstur og lønir

Hølisviðurskiftini hjá barnatannrøktini eru ikki nøktandi. Eitt álit varð skrivað í 2008, har hølisviðurskifti v.m. verða lýst. Í álitinum stendur, at betri karmar mugu til fyri at framhaldandi arbeiðið á barnatannlæknastovuni kann vera nøktandi. Í álitinum verður mælt til, at alt virksemið innan barnatannrøktina verður skipað sum ein megintannlæknastova, har allar eindir í barnatannrøktini eru savnaðar.

Tannlæknastovan heldur til í Tórsgøtu umframt í fýra øðrum støðum. Sertannlæknastovan er í Skúlanum við Løgmannabreyt. Sambært avtalu røkir tannlæknastovan eisini barnatannrøktina í Sandoynni, har tannlæknastovan er í Meginskúlanum á Sandi.

Tískil mugu nýggj høli til barnatannrøktina setast á skrá. Uppskot er at staðseta nýggja tannlæknastovu á einum øki hjá kommununi úti á Fløtum, oman fyri Musikkskúlan. Ein fyrimunur við hesum er, at tannlæknastovan fer at vera tætt við fleiri skúlar umframt Glasir, har eisini stórt tal av næmingum undir 18 ár ganga.

## 6.4.2 HEILSA OG UMSORGAN

Í Tórshavnar kommunu er tað Heilsu- og umsorganarfyrisitingin, ið umsitur alt eldraøkið og heimatænastu til allar borgarar í kommununi. Økið fevnir um alt frá eldrabústovnum, heimarøkt, heimasjúkrarøkt, tilboð og tænastur til fólkapensjónistar, serflutningsskipan, , stuðulsskipan til tiltøk innan almanna- og heilsumál umframt fólkaheilsu. Afturat hesum hevur heilsu- og umsorganarfyrisitingin um hendi øll fíggjarviðurskifti, dygdarmenning, at upptaka búfólk, at viðgera ansingarsamsýningar, at gera vegleiðingar av ymsum slag, at gera greiningar og hagtøl, svara kærum og umbønum um innlit v.m.

Heilsu- og umsorganartænastan arbeiðir eftir løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er málsøkið eldrarøkt kommunalt ábyrgdarøki frá 1. januar 2015

Lógin ásetur, at kommunan skal veita borgarum við tørvi á hjálp eina samskipaða heildartænastu. Endamálið við tænastuni er:

**a)** At fyribyrgja sjúku
**b)** At stimbra sálarligu og likamligu heilsu og trivna borgarans
**c)** At endurmenna mistan førleika
**d)** At stimbra møguleika hins einstaka at klára seg sjálvan
**e)** At veita røkt og umsorgan

Lógin ásetur krøv til kommunurnar um at veita tænastur, skipanir og tilboð.

Heilsu- og umsorganartænastan er, umframt yvirskipaða umsiting við heilsu- og umsorganarstjóra, skipað í trimum eindum við hvør sínum leiðara, harav tvær eindir eru røktareindir, og triðja eindin er Heilsuhúsið.

**Røktareindirnar eru búeindir við á leið 220 plássum tilsamans. Talan er um:**

- 203 røktarbúpláss
- 11 umlættingarpláss
- 5 pláss til samdøgursrehabilitering

Í Heilsuhúsinum eru øll tilboð og tænastur til heimabúgvandi skipað, tað verið seg heima- og sjúkrarøkt til heimabúgvandi borgarar, visitatión, fyribyrgjandi heimavitjan til borgarar eldri enn 75 ár, dagtilhald fyri fólk við demenssjúku, virkis- og venjingarstovur, og tilhaldini í Tórsgøtu, Nólsoy og Kollafirði. Viðgerðarstovan hjá heimasjúkrarøktarfrøðingunum, og tær tvørgangandi tænastur, ið ergo- og fysioterapeutar veita, eru eisini staðsettar í Heilsuhúsinum.

Heilsu- og umsorganartænastan skal røkja tær uppgávur, sum álagdar eru kommununi sambært lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. og samsvarandi politisku málsetningum býráðsins í "Virkin og vakin alt lívið".

Virkisøkið er í ávísan mun uppgávustýrt og skipað í toymir, har kjarnuuppgávan er at veita eina samskipaða heildartænastu til borgarar, ið hava tørv á røkt, umsorgan og rehabilitering, við virðing fyri tí einstaka og teirra avvarðandi. Endamálið er at

samskapa og samskipa tvørgangandi og tvørfakligar tænastur og tilboð innan allan bygnaðin.

**Røktarheimini og eldrasambýlini í Tórshavnar kommunu eru hesi:**

**Boðanesheimið**
Boðanesheimið hevur 64 búpláss, harav eru 16 búpláss til fólk við demenssjúku, 41 búpláss til fólk við røktartørvi, og 7 stutttíðarpláss, harav 5 verða nýtt til samdøgursrehabilitering og 2 til umlætting. Tá nýggi Umlættingar- og Rehabiliteringsdepilin (URD) verður liðugur í 2020 (sí brot um útbyggingar á eldraøkinum), verða tey 7 stutttíðarplássini á Boðanesheiminum gjørd um til føst búpláss.

**Lágargarður**
Lágargarður hevur 48 búpláss, harav eru 16 búpláss til fólk við demenssjúku, 30 búpláss til fólk við røktartørvi, og 2 stutttíðarpláss, ið verða nýtt til umlætting. Tá URD verður liðugur í 2020 (sí brot um útbyggingar á eldraøkinum), verða tey 2 stutttíðarplássini á Lágargarði gjørd um til føst búpláss.

**Tjarnargarður**
Tjarnargarður hevur 34 búpláss, harav eru 10 búpláss til fólk við demenssjúku, og 24 búpláss til fólk við røktartørvi. Tann ovari parturin av Tjarnargarði verður í løtuni um- og útbygdur, soleiðis at 7 umlættingarpláss afturat verða til fólk við demenssjúku. Ovari parturin av Tjarnargarði verður tá skipaður sum demensdepil (sí brot um útbyggingar á eldraøkinum).

**Ellisheimið** hevur 25 búpláss til fólk við røktartørvi.

**Eldrasambýlið í Kollafirði** hevur 7 búpláss til fólk við røktartørvi.

**Eldrasambýlið oman Hoydalar** hevur 9 búpláss til fólk við røktartørvi.

**Eldrasambýlið oman Mattalág** hevur 9 búpláss til fólk við demenssjúku.

**Umlættingarheimið** hevur 7 stutttíðarpláss, ið verða nýtt til umlætting.

## Framtíðar tørvur á eldrarøkt

Ein av størstu avbjóðingunum fyri framman hjá Tórshavnar kommunu er økt trýst á eldrarøktina.

Tað eru fleiri avgerandi tættir, ið ávirka tørvin á búplássum til eldri. Eitt er fólkafrøðiligu broytingarnar, sum vísa, at vit verða lutfalsliga nógv fleiri eldri í mun til yngri í komandi árum. Mett verður, at talið á fólkum 80 ár og eldri fer næstan at tvífaldast næstu 10 árini, samstundis sum færri fólk eru í arbeiðsførum aldri. Í 2015 vóru 5 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvørt fólkið í pensjónsaldri, í 2030 verða væntandi 3 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn borgara í pensjónsaldri.

Grundað á fólkafrøðiligu gongdina verður arbeitt miðvíst við at tillaga eldraøkið eftir tørvi. Sum liður í tí lutfalsliga vaksandi talinum av eldri í Tórshavnar Kommunu hevur kommunan lýst tørv og møguleikar sum grundarlag fyri at gera langtíðarstrategi til tess at útvega hóskandi íbúðir og røktarbúpláss til eldri komandi 30 árini, sí eisini “Frágreiðing um framtíðartørvin á búplássum til eldri í Tórshavnar Kommunu, 2016.”

Sambært fólkaframskrivingum hjá Hagstovu Føroya fyri Tórshavnar kommunu fer talið á borgarum, sum eru 80 ár ella eldri, nærum at tvífaldast. Í 2017 vóru tað beint oman fyri 800 fólk í Tórshavnar kommunu, sum vóru 80 ár ella eldri. Í 2022 væntast hetta talið at fara upp um 1000 fólk, og tá hugt verður fram til ár 2030, væntast vit at vera oman fyri 1400 fólk, sum eru 80 ár ella eldri.

Framskriving av fólki, ið eru 80 ár ella eldri




Kelda: "Frágreiðing um framtíðartørvin á búplássum til eldri í Tórshavnar kommunu, 2016"

Vitandi at vit gerast fleiri eldri og færri yngri borgarar, er neyðugt at finna nýggjar hættir at leggja arbeiðið til rættis. Tað er neyðugt at ganga nýggjar leiðir, so tað tilfeingi, sum er til eldraøkið, verður brúkt mest nøktandi fíggjarliga, bygnaðarliga og starvsfólkaliga.

Annar avgerandi táttur er heilsustøðan hjá okkara eldru, og um vit verða frískari ella verri fyri. Aldurin er í sær sjálvum ikki avgerandi fyri, um tørvur er á røktarbúplássi, men hinvegin hvussu stóran røktartørv ein borgari hevur. Heilsuumsorganartænastan arbeiðir miðvíst við fyribyrging, heilsufremjan og rehabilitering. Endamálið er at hjálpa borgarum, soleiðis at til ber at vera virkin sum longst og hava sum minst tørv á hjálp. Tað verður gjørt við fyribyrgandi, heilsufremjandi og rehabilterandi átøkum. Slík átøk betra heilsustøðuna og lívsgóðskuna hjá borgarum og minka um trýstið á eldraøkið.

Bústaðarmøguleikar hjá eldri eru eisini ein avgerandi táttur. Tørvur er á øðrvísi bústaðarbygging í mun til tørvin hjá teimum, sum í dag fáa tænastu frá Heilsu- og umsorganartænastuni. Fleiri eldri ynskja sær ein minni bústað enn sethús, umframt at Heilsu- og umsorganartænastan eisini sær ein stóran tørv á íbúðum, sum liggja í tilknýti til bústovnar ella hava tænastur til eldri knýttar afturat. Eitt nú kunnu eldraíbúðir geva fólki møguleika at búgva longur í egnum heimi. Eisini kunnu vanligar íbúðir vera eitt gott og minni krevjandi alternativ til sethús.

Ein annar avgerandi táttur fyri framtíðar tørvin á eldrarøkt eru verkætlanir, ið snúgva seg um vælferðartøkni. Ymsar verkætlanir eru í gongd hesum viðvíkjandi, og úti í heimi er vælferðartøkni eitt skjótt vaksandi øki. Tí kunnu nýbrot innan vælferðartøkni eisini hjálpa okkara eldru at megna at vera heima sum longst, og kann tað vera við til at minka um tørvin á røktarbúplássum.

Tað skerst tó ikki burtur, at tað er trýst á eldraøkið, og at fólkafrøðiligu broytingarnar í samfelagnum tala fyri, at tørvurin á eldrarøkt fer at økjast.

## Útbyggingar á eldraøkinum

Meðan arbeitt verður við at minka um trýstið á eldraøkið við fyribyrgjandi átøkum, tilboðum til eldri og øðrvísi bústaðarbygging, verður eisini tørvur á útbyggingum á eldraøkinum. Tí arbeiðir Tórshavnar kommuna støðugt við at útbyggja og menna eldraøkið.

Býráði hevur samtykt og er farin undir at byggja ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil í Hoyvík, ið væntandi verður liðugur á heysti 2020.

Býráðið hevur samtykt og er farin undir eina út- og umbygging av eldra partinum av Tjarnargarði, við útbyggingini av Tjarnargarði veksur verandi tal av plássum frá 10 uppí 17 pláss í eldra partinum.

Harumframt hevur býráði samtykt at seta í gongd fyrireikandi arbeiði at byggja eitt nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum.

Ætlanin er at samla eldraøkið í Kollafirði í ein eldradepil.

## URD - Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin í Hoyvík

Umlættingar- og rehabiliteringsdepil í Hoyvík, nevnd URD, verður væntandi liðugur á heysti 2020. Nýggi umlættingar- og rehabiliterings-depilin URD er hugsaður sum ein depil, har mestsum øll umlætting og samdøgurs-rehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram. Samstundis verður møguligt at flyta verandi umlættingar- og samdøgursrehabili-teringspláss av Lágargarði og Boðanesheiminum, og sostatt leggja hesi plássini um til føst búpláss.

Tá URD verður tikið í nýtslu veksur talið av stutttíðarplássum í Heilsu- og Umsorganar-tænastuni úr 16 plássum upp í 27 pláss.

Stutttíðarplássini eru ætlaði heimabúgvandi borg-arum, ið hava tørv á røkt og rehabilitering alt samdøgrið í eitt tíðarskeið, fyri at tey kunnu vera heima og megna sín gerandisdag.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, eins og at tørvurin á nýggjum røktarheimsplássum verður tálmaður.

**Út- og umbygging av Tjarnargarði**
Býráðið hevur samtykt eina út- og umbygging av eldra partinum av Tjarnargarði.

Ætlanin er at gera Tjarnargarð til ein demensdepil. Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku, sum verða knýttir til depilin, fáa nøktandi tilboð til teirra tørv á einum stað. Tað vil siga, at borgarin

> UMLÆTTINGARPLÁSS ERU EISINI STUTTTÍÐARPLÁSS TIL ELDRI FÓLK, SUM BÚGVA HEIMA, MEN ERU ILLA FYRI. TEY KOMA TIL UMLÆTTING FYRI AT LÆTTA UM HJÁ AVVARÐANDI.

við demenssjúku kann fáa dagtilhald, kvøldtilhald, vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er ein fyrimunur fyri borgarar við demensi, tí umhvørvið og starvsfólkini eru kend, og tað skapar tryggleika fyri tann demenssjúka.

Demensdepilin hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi smidligari og alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald, fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting í styttri og longri tíðarskeið og síðan seinni fáa fast búpláss, og alt hetta er í sama bygningi.

Út- og umbygging av Tjarnargarði væntast at vera liðug við árslok 2020.

## Dagtilboð og tilhald til eldri

Fólkapensjónistar í Tórshavnar kommunu hava møguleika fyri at luttaka í einum fjøltáttaðum virksemi, við fyribyrgjandi og heilsufremjandi tilboðum. Trý tilhald og fýra skipað dag- og kvøldtilboð eru undir Heilsuhúsinum. Til ber hjá øllum at koma í tilhaldini, meðan neyðugt er at søkja um at sleppa í skipaðu dag- og kvøldtilboðini.

Tey trý tilhaldini eru Tilhaldi í Tórsgøtu, Tilhaldi í Nólsoy og Tilhaldi millum Bóla, ið er staðsett í Kollafirði. Endamálið við tilhaldunum er at virka til at varðveita og menna heilsuna hjá fólkapensjónistum, at øll skulu kenna seg væl, fáa nýtt síni evnir og førleikar, læra og hava tað stuttligt.

Tey fýra dag- og kvøldtilboðini undir Heilsuhúsinum eru Stjørnulon og Tjarnarlon, ið eru til fólk við demenssjúku, og virkis- og venjingarstovurnar, ið eru til fólk við niðursettum likamligum ella sálarligum virkisførleika, ið hava tørv á sosialari samveru, umsorgan og røkt. Tilboðini verða veitt eldri borgarum, ið hava tørv á einum skipaðum tilboði.

Endamálið við dag- og kvøldtilboðunum er at varðveita og stuðla førleikunum hjá brúkaranum. Í tilboðunum er samveran tað týdningarmesta. Dentur verður lagdur á heilsustimbran og fyribyrging, og at allir borgarar skulu kenna seg sum part av felagsskapinum. Í dagtilboðunum verður dentur lagdur á rørslu, kost og virksemi.


URD
Heilsuhúsið
Eldrasambýlið
oman Hoydalar
Lágargarður
Boðanesheimið
Tjarnargarður
Heimið við Vallalíð
Tilhaldið í Tórsgøtu
Eldrasambýlið
oman Mattalág
Umlættingarheimið
Stjørnulon
Ellisheimið
Eldratænastan
Heilsuhús
Eldrasambýli
Ellis- og røktarheim
Tilhald
Umlættingarheim
Dagtilboð

## Eldraíbúðir

Tó at tey flestu ynskja at liva í egnum húsum sum longst, ynskja fleiri eldri borgarar eisini aðrar og smærri bústaðarmøguleikar, t.d. leigu- ella eigaraíbúðir. Tí arbeiðir Tórshavnar kommuna eisini í býarskipanarligum høpi við at gera ein meira fjølbroyttan bústaðarmarknað, har ynskiligt er, at eitt størri lutfall av bústøðunum í kommununi eru íbúðir.

Hetta kann eisini vera eldraíbúðir, ið eru knýttir at einum eldradepli, haðani møguleiki er at fáa ávísar tænastur. Sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. eru møguleikar nú eisini fyri, at kommunurnar kunnu seta á stovn eldraíbúðir at leiga út til borgarar, ið eru 3 ár frá fólkapensjónsaldri og eldri.

Tórshavnar kommuna sær ein fjølbroyttan bústaðarmarknað og eldraíbúðir sum ein týdningarmiklan lið í at tryggja øllum borgarum góð og virðilig eldraár. Ynskiligt er, at valmøguleikin hjá eldri borgarum ikki einans er millum at búleikast í sethúsum ella á røktarheimi.

## Átøk á eldraøkinum

Tórshavnar kommuna arbeiðir støðugt við at menna tilboðini og tænasturnar á eldraøkinum. Hetta fevnir eisini um at finna nýggjar hættir og nýggja tøkni, ið kunnu betra um tænastuna. Hetta er samstundis neyðugt til tess at tryggja øllum nøktandi tænastu og tryggleika, samstundis sum tað kann taka broddin av tørvinum eftir eldra-búplássum.

**Vælferðartøkni**
Eitt átaksøki hjá kommununi er vælferðartøknin. Vælferðartøknin skal nýtast soleiðis, at hon kemur øllum til góða, bæði brúkaranum og starvs-fólkinum. Við tekniskum hjálpartólum ber til at lætta um arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum, samstundis sum borgarin gerst meira sjálvbjargin og minni tengdur at hjálp frá tí almenna. Tað er vandi í hvørjari vælferð, og tí er eisini umráðandi alla tíðina at samskifta og endurskoða etisku áskoðanina í at nýta vælferðartøkni.
Ein strategiskur leistur skal gerast fyri vælferð-artøkni á eldraøkinum.

**Samskipa heilartænasta**
Tórshavnar kommuna leggur seg eftir at veita eina samskipaða heildartænastu til borgaran. Ein vegur at røkka hesum málið er at skipað tænast-urnar í eindir. Heilsu- og umsorganartænastan er skipað í tríggjar eindir. Frameftir verða eindirnar deildar upp í eina røktareind, eina demenseind og eina eind, ið veitir tilboð og tænastur til heima-búgvandi.

Demenseindin verður skipað í deplum, har eitt ávíst tal av brúkarum verða knýttir at. Hvør depil hevur øll tilboð, soleiðis at brúkarin ikki skal flyta millum stovnar og eindir. Tað merkir, at búpláss, umlætting, dagtilhald, kvøldtilhald, náttartilhald, venjing og so framvegis verða øll knýtt til

einstaka depilin. Hetta ger, at borgarin kennir seg aftur. Ofta byrjar tilgongdin við tilboði um dagtilhald. Borgarin kann tá fáa tilboð um umlætting í sama umhvørvi, sum dagtilhaldið er. Fær borgarin tørv á búplássi, kemur hann á búpláss á deplinum, ið hann er knýttur at.

Til hesar deplar kunnu byggjast eldraíbúðir, sum kunnu fáa tænastu frá eindunum.

Ein eldradepil skal byggjast í Kollafirði, sum rúmar øllum funktiónum, sum nevnt omanfyri. Samstundis verður eldrasambýlið í Kollafirði niðurlagt.

At skipa eldraøkið í Tórshavnar kommunu í eindir gevur størri smidleika til at veita rætta tilboðið, og gevur betri heildartænastu. Avbjóðingin er at skipa og byggja soleiðis, at eindirnar hava smáar deplar, sum tó eru nóg stórir til at geva rakstrarligar fyrimunir.

**Búpláss til yngri borgarar við demenssjúkum**
Tórshavnar kommuna hevur skildu at veita bú pláss til borgarar við demenssjúku, ið eru yngri enn 67 ár.

At hava búpláss til yngri borgarar við demensjúku krevur aðrar førleikar og aðrar skipanir enn at veita búpláss til eldri borgarar við demensjúku. Tórshavnar kommuna ger búpláss fyri yngri borgarar við demenssjúku. Búplássini vera knýtt at demensdepli.

**Endurnýggjan av verandi búplássum**
Stórur tørvur er at endurnýggja nøkur av verandi búplássum í kommununi. Ellisheimið er ikki longur tíðarhóskandi, eins og Umlættingarheimið heldur ikki er tíðarhóskandi. Hesi krevja stórar ábøtur, um tey aftur skulu kunna virka eftir ætlan. Umframt at Umlættingarheimið ikki er egnað, so er tað eisini sera kostnaðartungt, tí tað er ov lítið til at kunna rekast fíggjarliga skynsamt. Tað sama er galdandi við eldrasambýlunum. Tey eru dýr í rakstri, tí tey hýsa so fáum fólkum. Í Tórshavnar kommunu eru 3 eldrasambýlir, harav eitt er staðsett í Kollafirði.

Tórshavnar kommuna fer at endurnýggja búplássini á Ellisheiminum, Umlættingarheiminum og eldrasambýlunum. Fyrireikandi arbeiðið at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum er fari í gongd. Partur av nýggju røktarheimsplássunum skulu brúkast til at endurnýggja ótíðarhóskandi búpláss.

Tá nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin í Hoyvík verður liðugur, verður umlættingarheimi ikki longur brúkt til umlættingar.

## Kommunulæknaskipanin

Kommunulæknaskipanin virkar sambært lóg um kommunulæknaskipan. 14 kommunulæknar eru í Tórshavnar kommunu, 13 teirra hava viðtaluhøli í Havn og ein í Kollafirði.

Sambært kunngerð bera kommunurnar útreiðslurnar til viðtaluhøli hjá kommunulæknum og heilsufrøðingum. Tað eru tí kommunurnar, ið útvega viðtaluhølini, innbúgv, tól og amboð, umframt raksturin av hølunum. Heilsutrygd rindar kommunulæknum og heilsustarvsfólki løn og samsýning.

Menningin, tøknin og uppgávubýti v.m. setur størri krøv til viðtaluhølini hjá kommunulæknunum. Í 2019 vórðu nýggj kommunulæknahøli tikin í nýtslu í Hoyvík, har 5 læknar húsast. Tørvur er á, at endurnýggja 4 kommunulæknaviðtalur. Um fólkatali í kommununi heldur á at vaksa, verður tørvur á fleiri kommunulæknum og sostatt tørvur á at útvega fleiri hølir til kommunulæknaviðtalur.

## Heilsufrøðiskipanin

Heilsufrøðiskipanin virkar sambært lóg um fyribyrgjandi heilsutænastur fyri børn og ung. Sambært lógini bera kommunurnar allar útreiðslurnar til viðtaluhøli hjá heilsufrøðingum í sambandi við veitingina av hesum tænastum til børn og ung.

## Sosial tilboð

Sosiala deild umsitur, umframt barnavernd, eisini sosialar íbúðir og varðar av samskiftinum við leigararnar. Talan er um 30 íbúðir, ið Tórshavnar kommuna varðar av, og sum verða leigaðar út sum sosialar íbúðir.

Harumframt hevur Tórshavnar kommuna eisini tikið stig til at stuðla undir eina hitastova fyri heimleys í dagtímunum. Hitastovan er eitt tilboð, sum tey heimleysu frítt kunnu brúka, og har tey kunnu fáa nærveru og umsorgan undir skipaðum viðurskiftum. Gjørd er avtala við hjálparfelagsskap um at standa fyri hitastovuni, og Tórshavnar kommuna játtar pening til rakstur av hesum.

## Serflutningsskipanin

Serflutningsskipanin verður veitt sum tænasta sambært reglugerð. Endamálið við serflutningstænastuni er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek, eru bundin av koyristóli, og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól, ella hava tørv á flutningi í avmarkaða tíð. Hesi hava tá møguleika fyri at heita á serliga bussin fyri rørslutarnað hjá Tórshavnar kommunu. Tað er ókeypis at koyra við bussinum gerandisdagar. Um kvøldið og um vikuskiftið er møguleiki at nýta bussin sum hýruvogn. Bussurin hevur støð á brandstøðini, haðani hann kann bíleggjast.




sendistovan